**Fíggjarmálaráðið**

# Játtanargreining á almannaøkinum

**Desember 2009**

*Hendan rapportin hevur 125 síður*

# Innihaldsyvirlit


| | | |
|---|---|---|
| 1 | Inngangur | 1 |
| 1.1 | Greining | 1 |
| 1.2 | Framferðarháttur | 2 |
| 1.3 | Avmarking | 3 |
| 2 | Samandráttur og tilmæli | 4 |
| 2.1 | Samandráttur | 4 |
| 2.2 | Tilmæli | 11 |
| 3 | Benchmarking | 16 |
| 3.1 | Samanbering millum útreiðslubólkar í Føroyum | 16 |
| 3.1.1 | Samanbering við aðrar almennar útreiðslur | 16 |
| 3.1.2 | Samandráttur | 20 |
| 3.1.3 | Lógarbundnar útreiðslur ávikavist rakstrarútreiðslur | 20 |
| 3.2 | Samanbering av almannaútreiðslum millum lond | 25 |
| 3.2.1 | Almannaútreiðslur í mun til bruttotjóðarinntøku | 26 |
| 3.2.2 | Almannaútreiðslur í mun til tal av íbúgvum | 28 |
| 3.2.3 | Tal av fyritíðarpensjónistum | 30 |
| 3.2.4 | Fólk á heimum | 31 |
| 3.2.5 | Fólk, sum fáa heimahjálp | 32 |
| 3.2.6 | Tal av fólkum undir 65 ár, sum búgva á heimum | 32 |
| 3.2.7 | Samanbering av samlaðum útreiðslum og inntøkum hjá landi og kommunum í Føroyum og Danmark | 33 |
| 3.2.8 | Samandráttur | 36 |
| 4 | Nýtsla av játtanum | 37 |
| 4.1 | Børn og ung | 39 |
| 4.1.1 | Dag- og samdøgursstovnar | 41 |
| 4.1.2 | Stuðlar til børn | 41 |
| 4.1.3 | Samandráttur | 41 |
| 4.2 | Serforsorg | 42 |
| 4.2.1 | Trivnaðartænastan | 43 |
| 4.2.2 | Stovnsuppihald o.a. í Danmark | 45 |
| 4.2.3 | Deildin fyri sinnisveik | 45 |
| 4.2.4 | Heimið fyri heilaskadd | 46 |
| 4.2.5 | Samandráttur | 47 |
| 4.3 | Eldrarøkt | 47 |
| 4.3.1 | Røktarheim | 49 |
| 4.3.2 | Eldrarøkt á Sandoynni | 51 |
| 4.3.3 | Heimatænastan | 55 |

4.3.4 Økisterapi 58
4.3.5 Áseting av dagsprísi (tyngdarmetingarskipan) 58
4.3.6 Samandráttur 59
4.4 Ansingarsamsýning 60
4.4.1 Samandráttur 61
4.5 Stuðulstænastan 61
4.5.1 Samandráttur 62
4.6 Vanlig forsorg 63
4.6.1 Meirútreiðslur brekað barn 64
4.6.2 Endurbúgving 67
4.6.3 Hjálparráð 71
4.6.4 Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 72
4.6.5 Samandráttur 73
4.7 Fyritíðarpensjón 74
4.7.1 Samandráttur 76

5 Játtanartilgongd 77
5.1 Stýrisskipanarlógin 77
5.2 Ábyrgdarbýti í sambandi við fíggjarlógina 78
5.2.1 Landsstýrismaðurin í almannamálum 78
5.2.2 Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum 78
5.2.3 Løgtingið 78
5.3 Tíðarætlan í sambandi við fíggjarlógararbeiði 79
5.3.1 Fíggjarlógin 79
5.3.2 Eykajáttan 80
5.4 Gongdin í játtanar- og roknskapartølum í árunum 2003 til 2008 83
5.5 Børn og ung 83
5.6 Serforsorg 84
5.7 Eldrarøkt 86
5.8 Ansingarsamsýning 89
5.9 Stuðulstænastan 90
5.10 Vanlig forsorg 90
5.11 Fyritíðarpensjón 94
5.12 Samandráttur 95

6 Fyrisitingarlig greining og fíggjarstýring 98
6.1 Bygnaður 98
6.1.1 Nærverkið 98
6.1.2 Almannastovan 101
6.2 Roknskaparuppfylging 102
6.2.1 Mannagongdin í Almannamálaráðnum 103
6.2.2 Mannagongdin í Nærverkinum 104
6.2.3 Mannagongdin á Almannastovuni 104

6.2.4 Tíðargreining 105
6.3 Vaktplanskipan 106
6.4 Mál og avriksstýring 106
6.5 Samandráttur 108

7 Lógarbundin kontra rakstrarjáttan 109

# Talvur

*Talva 1: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í teimum høvuðskontum, sum eru fevndar av játtanargreiningini* ....1
*Talva 2: Gongdin í netto landskassaútreiðslunum í tíðarskeiðinum 2003 til 2008* ....2
*Talva 3: Hækkingar í tíðarskeiðinum frá 2003 til ávikavist 2007, 2008 og 2010:* ....4
*Talva 4: Útgreining av útreiðsluvøkstrinum frá 2003 til 2008* ....7
*Talva 5: Gongdin í rakstrarútreiðslunum* ....9
*Talva 6: Gongdin í lógarbundnum útreiðslum* ....9
*Talva 7: Útreiðslur til almannamál og útreiðslur fevndar av játtanargreiningini í 2007, bólkaðar sambært COFOG* ....26
*Talva 8: Lutfallið millum sosialar útreiðslur uppgjørdar eftir ESSPROS í mun til BTÚ í 2007* ....28
*Talva 9: Almannaútreiðslurnar sambært COFOG pr. íbúgva fyri árini 2003 til 2008* ....29
*Talva 10: Almannaútreiðslurnar pr. íbúgva í Føroyum og Danmark sambært COFOG í 2007 býtt á øki* ....29
*Talva 11: Samlaðar útreiðslur og útreiðslur pr. íbúgva í 2007, bólkaðar eftir COFOG, í Føroyum og Danmark umframt samlaðu skatta- og avgjaldsinntøkurnar* ....34
*Talva 12: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í høvuðskontuni Børn og ung* ....40
*Talva 13: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstrarútreiðslunum til serforsorg* ....42
*Talva 14: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstarútreiðslunum til Trivnaðartænastuna* .44
*Talva 15: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstarútreiðslunum til Stovnsuppihald o.a. í Danmark* ....45
*Talva 16: Tal av føroyingum á stovni í Danmark* ....45
*Talva 17: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstrarútreiðslunum til Deildina fyri sinnisveik* ....46
*Talva 18: Tal av búplássum* ....46
*Talva 19: Gongdin í tíðarskeiðinum 2004 til 2008 í rakstrarútreiðslunum til Heimið fyri heilaskadd* ....47
*Talva 20: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstarútreiðslunum til Eldrarøkt* ....48
*Talva 21: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstarútreiðslunum til Røktarheim* ....49
*Talva 22: Tal av búplássum á røktarheimum* ....50
*Talva 23: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstarútreiðslunum til Eldrarøkt í Sandoynni* ....52
*Talva 24: Samanbering millum røktarheim og sambýli í ávikavist Sandoynni og restina av landinum* ....53

***Talva 25: Samlaðu rakstrarútreiðslurnar til skipanina á Sandoynni í 2008 ....................................54***
***Talva 26: Mett játtan til skipanina á Sandoynni í 2008 um skipanin varð skipað á sama hátt sum í restini av landinum ................................................................................................54***
***Talva 27: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstrarútreiðslunum til Heimatænastuna.....55***
***Talva 28: Tal av fólki, sum hava fingið heimahjálp í árunum 2005 til 2008 og tal av tímum um vikuna.........................................................................................................................56***
***Talva 29: Tal av búplássum á eldrasambýlum ...................................................................57***
***Talva 30: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í ansingarsamsýning.........................................60***
***Talva 31: Tal av ansarum .....................................................................................................60***
***Talva 32: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðslum til Stuðulstænastuna .....................61***
***Talva 33: Tal av brúkarum ...................................................................................................62***
***Talva 34: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útvaldum høvuðskontum til vanliga forsorg...63***
***Talva 35: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðslunum til meirútreiðslur brekað barn..65***
***Talva 36: Tal av brúkarum ...................................................................................................65***
***Talva 37: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðslunum til "endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku" .........................................................................................................65***
***Talva 38: Tal av móttakarum í sambandi við mista arbeiðsinntøku .................................................66***
***Talva 39: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í meirútreiðslunum til heilivág.........................66***
***Talva 40: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðslunum til "annað" ..............................66***
***Talva 41: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 til endurbúgving ...............................................67***
***Talva 42: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðslum til vanligari endurbúgving...........68***
***Talva 43: Tal av persónum í vanligari endurútbúgving ...................................................................68***
***Talva 44: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðsluni til vart arbeiði...............................68***
***Talva 45: Tal av fólkum í vardum stavi...........................................................................................69***
***Talva 46: Tal av fólkum í vardum stavi og býti millum endurgjaldsbólkar .....................................70***
***Talva 47: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðsluni til gjald fyri stovnar í Danmark....70***
***Talva 48: Tal av persónum .............................................................................................................70***
***Talva 49: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðsluni til hjálparráð ................................71***
***Talva 50: Tal av umsóknum ...........................................................................................................72***
***Talva 51: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðsluni til viðgerð á serligum stovnum .....73***
***Talva 52: Tal av persónum .............................................................................................................73***
***Talva 53: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðslunum til fyritíðarpensjón ....................75***
***Talva 54: Tal av fyritíðarpensjónistum ...........................................................................................75***
***Talva 55: Játtanar- og roknskapartøl fyri børn og ung árini 2003 til 2008 .....................................83***
***Talva 56: Játtanar- og roknskapartøl til serforsorg fyri árini 2003 til 2008 ....................................84***

***Talva 57: Játtanar- og roknskapartøl hjá trivnaðartænastuni fyri árini 2003 til 2008 ....................84***

***Talva 58: Játtanar- og roknskapartøl fyri stovnsuppihald o.a. í Danmark fyri árini 2003 til 2008 .85***

***Talva 59: Játtanar- og roknskapartøl fyri deildina fyri sinnisveik fyri árini 2003 til 2008 ..............86***

***Talva 60: Játtanar- og roknskapartøl til eldrarøkt fyri árini 2003 til 2008......................................86***

***Talva 61: Játtanar- og roknskapartøl til røktarheim fyri árini 2003 til 2008 ..................................87***

***Talva 62: Játtanar- og roknskapartøl til røktarheim fyri árini 2003 til 2008 ..................................87***

***Talva 63: Játtanar- og roknskapartøl til heimatænastuna fyri árini 2003 til 2008 ..........................88***

***Talva 64: Játtanar- og roknskapartøl til ansingarsamsýning fyri árini 2003 til 2008......................89***

***Talva 65: Játtanar- og roknskapartøl til heimatænastuna fyri árini 2003 til 2008 ..........................90***

***Talva 66: Játtanar- og roknskapartøl til vanliga forsorg fyri árini 2003 til 2008............................90***

***Talva 67: Játtanar- og roknskapartøl til meirútreiðslur brekað barn fyri árini 2003 til 2008 .........91***

***Talva 68: Játtanar- og roknskapartøl til endurútbúgving fyri árini 2003 til 2008 ...........................92***

***Talva 69: Játtanar- og roknskapartøl til hjálparamboð fyri árini 2003 til 2008..............................93***

***Talva 70: Játtanar- og roknskapartøl til fyritíðarpensjón árini 2003 til 2008 ..................................94***

***Talva 71: Játtanar- og roknskapartøl fyri rakstrarútreiðslurnar undir einum fyri árini 2003 til 2008..........................................................................................................96***

***Talva 72: Játtanar- og roknskapartøl fyri lógarbundnu útreiðslurnar undir einum fyri árini 2003 til 2008..........................................................................................................96***

# Myndir

***Mynd 1:*** ***Netto landskassaútreiðslur fyri 2008, býtt á greinar*** ***....16***
***Mynd 2:*** ***Gongdin í útvaldum almennum útreiðslum fyri árini 2003 til 2008 og játtan fyri 2009 og 2010*** ***....17***
***Mynd 3:*** ***Gongdin í almannaútreiðslunum sum heild, almannaútreiðslunum, sum eru fevndar av játtanargreininini, netto landskassaútreiðslunum, netto landskassaútreiðslunum undantikið kannaðu almannaútreiðslunum og tøku bruttotjóðarinntøkuni*** ***....19***
***Mynd 4:*** ***Gongdin í netto landskassaútreiðslunum, lógarbundnu útreiðslunum og rakstrarútreiðslunum, sum eru fevnd av hesi játtanargreining*** ***....21***
***Mynd 5:*** ***Býtið av lógarbundnu útreiðslunum í 2008*** ***....22***
***Mynd 6:*** ***Gongdin í lógarbundnu útreiðslunum ansingarsasmsýning, vanlig forsorg og fyritíðarpensjón sammet við netto landskassaútreiðslurnar*** ***....22***
***Mynd 7:*** ***Býtið av rakstrarútreiðslunum í 2008*** ***....23***
***Mynd 8:*** ***Gongdin í rakstrarútreiðslunum Børn og ung, Eldrarøkt og Serforsorg sammett við netto landskassaútreiðslurnar*** ***....24***
***Mynd 9:*** ***Gongdin í nýtsluni til almannaútreiðslur gjørdar upp sambært COFOG í mun til tøku bruttotjóðarinntøkuna fyri árini 2003 til 2007*** ***....27***
***Mynd 10:*** ***Gongdin í almannaútreiðslunum í leypandi krónum sambært COFOG í mun til fólkatalið fyri árini 2003 til 2007*** ***....28***
***Mynd 11:*** ***Persónar millum 18-64 ár, sum fáa fyritíðarpensjón í % av øllum í sama aldri*** ***....30***
***Mynd 12:*** ***Persónar upp á 65 ár og eldri, sum búgva á "institution eller i servicebolig" í % av øllum í sama aldri:*** ***....31***
***Mynd 13:*** ***Persónar upp á 65 ár og eldri, sum fáa heimahjálp í % av øllum í sama aldri*** ***....32***
***Mynd 14:*** ***Persónar undir 65 ár, sum búgva á "institution eller i servicebolig" í % av øllum í sama aldri*** ***....33***
***Mynd 15:*** ***Lutfalsliga býtið av útreiðslunum hjá landi og kommunum í 2007 í Føroyum og Danmark*** ***....35***
***Mynd 16:*** ***Yvirlit yvir hvør varðar av ymsu kannaðu høvuðskontunum við tilskilan av rakstrarupphædd fyri 2008*** ***....37***
***Mynd 17:*** ***Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í teimum høvuðskontum, sum eru fevndar av játtanargreiningini*** ***....38***
***Mynd 18:*** ***Bygnaðurin á Nærverkinum*** ***....98***
***Mynd 19:*** ***Bygnaðurin á Almannastovuni*** ***....101***

# 1 Inngangur

Føroya Landsstýri gjørdi á vári 2009 av at seta í verk eina játtanargreining á almannaøkinum. Endamálið við játtanargreiningini er at lýsa, hvussu játtanirnar á útvaldum høvuðskontum á almannaøkinum hava verið nýttar og orsøkina til stóra útreiðsluvøksturin seinastu árini. Harumframt skal greiningin fevna um eina meting av, hvussu játtanartilgongdin, fíggjar-stýringin og fyrisitingarligi bygnaðurin á økinum hevur verið umframt at játtanargreiningin skal fevna um eina samanberingar við okkara nærmastu grannalond.

Samlaði arbeiðssetningurin er hjálagdur sum skjal 1.

## 1.1 Greining

Gongdin í teimum høvuðskontum, sum eru fevndar av játtanargreiningini, er víst í talvu 1 niðanfyri fyri árini 2003 til 2008[1] umframt gongdin í teimum kontum, sum eru fevndar av fyrisitingarligu greiningini. Samlaðu útreiðslurnar, sum eru fevndar av greiningini, vóru upp á 940 mió.kr. í 2008 svarandi til góð 22% av netto landskassaútreiðslunum hetta árið. Við netto landskassaútreiðslur verður í hesi greining meint landskassaútreiðslur (útreiðslur við frádrátti av inntøkum á einstøku greinunum á fíggjarlógini), tó undantikið løgur og rentuútreiðslur.

***Talva 1: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í teimum høvuðskontum, sum eru fevndar av játtanargreiningini***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Almannastovan | 34.365 | 34.628 | 35.590 | 35.720 | 37.516 | 40.237 |
| Nærverkið, | | 5.623 | 5.297 | 5.690 | 6.158 | 6.848 |
| Børn og ung | 34.980 | 40.259 | 46.354 | 36.895 | 39.380 | 43.107 |
| Serforsorg | 100.965 | 105.444 | 114.862 | 119.964 | 128.824 | 137.497 |
| Eldrarøkt | 213.620 | 227.766 | 244.351 | 265.385 | 287.063 | 315.305 |
| Ansingarsamsýning | 10.082 | 10.558 | 10.444 | 11.016 | 10.800 | 13.943 |
| Stuðulstænastan fyri vaksin | 8.587 | 14.591 | 13.632 | 14.849 | 15.836 | 21.753 |
| Vanlig forsorg | 79.491 | 78.174 | 85.343 | 90.855 | 105.132 | 123.554 |
| Fyritíðarpensjón | 190.520 | 193.456 | 195.893 | 213.939 | 211.402 | 237.820 |
| **Útreiðslur til samans** | **672.610** | **710.499** | **751.766** | **794.313** | **842.111** | **940.064** |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Sum tað sæst eru samlaðu útreiðslurnar, sum eru fevndar av greiningini, øktar úr 673 mió.kr. í 2003 til 940 mió.kr. í 2008 svarandi til ein vøkstur upp á 40%.

[1] Á høvuðskontuni "Vanlig forsorg" eru bert undirkontur "04 Meirútreiðslur brekað barn §17", "05 Endurbúgving §18", "06 Hjálparamboð v.m. §18" og "08 Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum §16" tiknar við í rakstrar-kostnaðin

Í sama tíðarskeiði eru netto landskassaútreiðslurnar øktar úr 3.192 mió.kr. til 4.251 mió.kr. svarandi til eina øking upp á 33,2%, sí talvu 2 niðanfyri.

Almannaútreiðslurnar, sum eru fevndar av játtanargreiningini, svaraðu í 2003 til 21,1% av samlaðu netto landskassaútreiðslunum og í 2008 til 22,1% av samlaðu netto landskassa-útreiðslunum, sí talvu 2 niðanfyri.

***Talva 2:  Gongdin í netto landskassaútreiðslunum í tíðarskeiðinum 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Netto landskassaútreiðslur | 3.192.143 | 3.324.077 | 3.467.142 | 3.578.193 | 3.767.026 | 4.251.233 |
| Lutfall millum útreiðslurnar, sum eru fevndar av greinin-gini og netto landskassa-útreiðslurnar | 21,1% | 21,5% | 21,8% | 22,2% | 22,4% | 22,1% |

*Kelda:  Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Tað skal viðmerkjast, at í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010, sum er lagt fyri tingið seinast í september 2009, eru almannaútreiðslurnar, sum eru fevndar av játtanargreiningini, øktar til 23% av netto landskassaútreiðslunum.

## 1.2 Framferðarháttur

Játtanargreiningin er lutvíst bygd á samrøður við teir persónar, sum varða av ymsu játtanunum og lutvíst á eina gjøgnumgongd av teimum fíggjarligu skrásetingum, sum fyriliggja.

Samrøður hava verið við aðalstjóran í almannaráðnum, stjórarnar á ávikavist Almannastovuni og Nærverkinum umframt leiðandi starvsfólk í Almannamálaráðnum, á Almannastovuni og í Nærverkinum. Harumframt hava vit tosað við stjóran og leiðandi starvsfólk á Hagstovu Føroya og við leiðandi starvsfólk í Fíggjarmálaráðnum og á Gjaldstovuni.

Endamálið við samrøðunum hevur verið at fáa til vega vitan um umsitingina av ymsu økjunum, herundir hvussu játtanartilgongdin og fíggjarstýringin hava verið seinastu árini.

Uppskot til frágreiðing hevur verið til gjøgnumgongd hjá leiðandi embætisfólkum fyri at tryggja at faktuella innihaldið er í lagi.

Roknskapar- og játtanartølini eru fingin til vega frá almennu landsroknskapunum, løgtingsfíggjarlógum og eykajáttanarlógum fyri 2003 til 2008 og frá Búskaparskipan Landsins.  Frágreiðingarnar til meir- og minninýtslu eru í ávísan mun fingnar til vega frá árligu frágreiðingini frá landsgrannskoðaranum.

Tølini, sum eru nýtt í samanberingini millum londini, eru fingin til vega frá Hagstovu Føroya, Danmarks Statistik, Statistic Iceland og árligu frágreiðingunum fyri 2003, 2004, 2005, 2006/07 og 2007/08 um "Social tryghed i de nordiske lande", sum Nordisk Socialstatistisk Komite (hereftir Nososco) gevur út.

Virksemistølini[2] eru í størsta mun fingin til vega frá Almannamálaráðnum, sum hevur umbiðið tey frá avvarðandi stovnum.

Í upprunaliga arbeiðssetninginum stendur, at kanningin eisini skal fevna um gongdina í 2009. Við tað at roknskapartøl bert fyriliggja til og við 2008, er 2009 ikki tikið við í kanningini. Tó skal viðmerkjast, at í samanberingini av gongdini í ymsum útreiðslubólkum í Føroyum eru játtanartølini fyri 2009 og 2010 tikin við fyri at fáa eina fatan av, hvussu gongdin kann væntast at verða í framtíðini.

Tølini fyri 2009 fevna um tølini í upprunaligu samtyktu fíggjarlógini fyri 2009 íroknað eykajáttanir, sum eru samtyktar í árinum fram til 5. november 2009.

Tølini fyri 2010 fevna um tølini í fíggjarlógaruppskotinum, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum legði fram á tingi í september 2009.

Í arbeiðinum við at samanbera rakstrartøl, tað verði seg innanhýsis í Føroyum og millum lond, er dentur lagdur á, at grundarlagið er so samanberligt sum til ber. Sama ger seg galdandi fyri virksemistølini í tann mun hesi verða samanborin millum ymsar kontur.

Av arbeiðssetninginum sæst, at gongdin í lógarbundnu útreiðslunum skal samanberast við útreiðsluvøksturin í samfelagnum annars. Í greiningini er gongdin í lógarbundnu útreiðslunum samanborin við gongdina í netto landskassaútreiðslunum.

## 1.3 Avmarking

Sambært arbeiðssetninginum skal lýsast við hagtølum, hvussu játtanirnar hava verið nýttar seinastu árini, t.v.s. ein lýsing av gongdini í virkseminum í tann mun at hagtøl fyriliggja. Í greiningini er ikki tikið atlit til dygdina av tí arbeiði, sum verður gjørt.

Játtanargreiningin hevur ikki fevnt um kanning av rættleikanum av móttiknum upplýsingum og tølum, m.a. um tíðargreiningin og bólkingin av útreiðslunum er í lagi, ella um útgjøldini eru í tráð við undirliggjandi lóg.

Av arbeiðssetninginum sæst, at úrslitini skulu samanberast við grannalondini Danmark, Ísland og økið Bornholm. Her skal viðmerkjast, at samanberingin einans hevur fevnt um grannalondini Danmark og Ísland, meðan ongin samanbering er gjørd við Bornholm, av tí at tað ikki hevur eydnast at fáa til vega tøl, sum kunnu brúkast til eina samanbering.

[2] Við virksemistøl meinast t.d. tal av búplássum, tal av tímum og tal av stuðulsmóttakarum

# 2 Samandráttur og tilmæli

Endamálið við játtanargreiningini er at lýsa, hvussu játtanirnar á útvaldum høvuðskontum á almannaøkinum hava verið nýttar og orsøkina til stóra útreiðsluvøksturin seinastu árini. Harumframt skal greiningin fevna um eina meting av, hvussu játtanartilgongdin, fíggjarstýringin og fyrisitingarligi bygnaðurin á økinum hevur verið umframt at játtanargreiningin skal fevna um eina samanbering við okkara nærmastu grannalond.

## 2.1 Samandráttur

*Útreiðslugongdin*

Tær høvuðskontur, sum eru fevndar av játtanargreiningini, eru vístar í talvu 1 frammanfyri. Sum tað framgongur av talvu 1 eru samlaðu útreiðslurnar, sum eru fevndar av greiningini, øktar úr 673 mió.kr. í 2003 til 940 mió.kr. í 2008 svarandi til ein vøkstur upp á 40%. Í sama tíðarskeiði eru netto landskassaútreiðslurnar øktar úr 3.192 mió.kr. til 4.251 mió.kr. svarandi til eina øking upp á 33,2%.

Niðanfyri er gongdin í almannaútreiðslunum, sum eru fevndar av játtanargreininigni, sammett við gongdina í netto landskassaútreiðslunum og tøku bruttotjóðarinntøkuni við støði í tølunum fyri 2003.

***Talva 3: Hækkingar í tíðarskeiðinum frá 2003 til ávikavist 2007, 2008 og 2010[3]:***

| Indekstøl | 2003 | 2007 | 2008 | 2010 |
|---|---|---|---|---|
| Gongdin í samlaðu útreiðslunum, sum eru fevndar av játtanargreiningini | 100 | 125 | 140 | 148 |
| Gongdin í lógarbundnu útreiðslunum, sum eru fevndar av játtanargreiningini | 100 | 117 | 134 | 145 |
| Gongdin í rakstrarútreiðslunum, sum eru fevndar av játtanargreiningini | 100 | 132 | 145 | 151 |
| Gongdin í samlaðu netto landskassaútreiðslunum | 100 | 118 | 133 | 136 |
| Gongdin í samlaðu netto landskassaútreiðslunum tó undantikið kannaðu almannaútreiðslurnar | 100 | 116 | 131 | 132 |
| Gongdin í bruttotjóðarinntøkuni | 100 | 126 | 127 | 127 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og fíggjarlógaruppskotið fyri 2010.*

Sum tað sæst eru almannaútreiðslurnar, sum eru fevndar av játtanargreiningini, hækkaðar 7% meira enn netto landskassaútreiðslurnar í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 og 13% meiri enn bruttotjóðarinntøkan.

[3] Játtanartølini fyri 2010 stava frá figgjarlógaruppskotinum. Gongdin í tBTI fyri 2010 stavar frá eini meting frá Landsbankanum

Somuleiðis sæst, at stór øking er hend frá 2007 til 2008 á øllum útreiðsluøkjum, meðan bruttotjóðarinntøkan mestsum stendur í stað í sama tíðarskeiði.

Kannaðu lógarbundnu útreiðslurnar undir einum eru í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 øktar á leið tað sama sum netto landskassaútreiðslurnar til samans, og ikki nógv skjótari soleiðis sum nevnt í arbeiðssetninginum. Gongdin í teimum trimum lógarbundnu høvuðskontunum, sum eru fevndar av játtanargreiningini, er tó ymisk, og vísir eina øking upp á ávikavist 25%, 38% og 55% (fyritíðarpensjón, ansingarsamsýning og vanlig forsorg).

Út frá játtanunum fyri 2009 og 2010 (uppskot) og metingum frá Landsbankanum kann tó roknast við, at almannaútreiðslurnar, sum eru fevndar av játtanargreiningini, fara at hækka væl meira komandi 2 árini enn bæði netto landskassaútreiðslurnar og bruttotjóðarinntøkan. Verður sæð burtur frá kannaðu almannaútreiðslunum hendir stórt sæð ongin broyting í netto landskassaútreiðslunum frá 2008 til 2010 og kannaðu almannaútreiðslurnar gerast sostatt ein alsamt størri partur av samlaðu fíggjarlógini.

Væntaða hækkingin í 2009 og 2010 stavar serliga frá teimum lógarbundnu útreiðslunum, og her er tað serliga útreiðslurnar til fyritíðarpensjón, sum hækka nógv. Verður hinvegin mett um gongdina longri fram í tíðina, kann væntast, at rakstrarútreiðslurnar fara at økjast munandi, serliga á eldraøkinum, har framskrivingar vísa, at talið av eldri fólkum fer at økjast lutfalsliga nógv komandi árini. Viðmerkjast skal, at peningur nýliga er játtaður til bygging av 136 nýggjum røktarheimsplássum. Við verandi eindarprísum kemur hetta at merkja eina árliga rakstrarútreiðslu upp á áleið 64 mió.kr. afturat teimum 187 mió.kr., sum raksturin av røktarheimsplássunum kostaði í 2008.

### *Samanbering við Danmark og Ísland*

Sum nevnt vísir greiningin, at almannaútreiðslurnar, sum eru fevndar av játtanargreiningini, gerast ein alsamt størri partur av samlaðu fíggjarlógini í komandi árum.

Hóast hetta, so vísir ein samanbering millum Føroyum og Danmark, at tað í Føroyum verður brúkt minni upp á almannaútreiðslur, bæði í mun til tøka bruttotjóðarinntøku og pr. íbúgva. Í mun til tøku bruttotjóðarinntøkuna brúktu Føroyar áleið 17% í 2007, meðan Danmark brúkti áleið 22%. Í samanberingini millum Føroyar og Danmark eru COFOG[4]-tølini nýtt fyri at fáa tøl, sum eru so samanberilig sum møguligt millum londini.

Til samanberingar kann nevnast, at í 2007 var tøka danska bruttotjóðarinntøkan pr. íbúgva áleið 8% hægri enn í Føroyum, meðan danska bruttotjóðarúrtøkan pr. íbúgva var áleið 21% hægri enn í Føroyum.

Tølini fyri Ísland eru torfør at samanbera við tølini fyri Føroyar og Danmark, tí fíggingarmynstrið av almannaútreiðslunum í Íslandi er heilt øðrvísi við tað at ein stórur partur av útreiðslunum verður fíggjaður av øðrum enn almennu kassunum. Hóast hesar munir í fíggingarmynstrinum, sum gera eina samanbering trupla, eru greiðar ábendingar um, at í Íslandi verður í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 brúkt lutfalsliga minni til sosiala trygd

[4] COFOG-tølini innihalda allar almennar útreiðslur, tað verði seg útreiðslur hjá landskassanum, kommunukassum og almennum grunnum

enn í Føroyum og í Danmark. Verða COFOG-tølini fyri almannaútreiðslur løgd til grund, nýtti Ísland í 2007 áleið 11% av tøku bruttotjóðarinntøkuni til sosiala trygd.

Hóast greiðar ábendingar eru um, at vit í Føroyum brúka lutfalsliga minni til sosiala trygd enn í t.d. Danmark, mugu tølini takast við fyrivarni, tí skipanirnar í ymsu londunum eru ymiskar, m.a. skattaskipanirnar, brutto- og nettoveitingar og tænastuútboði. So longi vit í Føroyum ikki hava nakran umrokningarfaktor, sum ger tað møguligt at umrokna eina útreiðslu til keypiorku, letur tað seg ikki gera at fremja eina nøktandi samanbering.

Verður hugt at samlaða býtinum av COFOG-útreiðslunum í 2007 sæst, at meðan vit í Føroyum brúka lutfalsliga minni pr. íbúgva upp á almannamál og heilsumál enn í Danmark, brúka vit meiri upp á vinnumál og skúlamál.

*Nýtsla av játtanum*

Sum nevnt eru útreiðslurnar, sum eru fevndar av játtanargreiningini, øktar við 267 mió.kr. í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 (íroknað rakstrarjáttanirnar til Almannastovuna og Nærverkið).

Ein leyslig útrokning vísir, at gott og væl helvtin av hækkingini skyldast vanligan lønar- og prísvøkstur umframt lógarásettu hækkingina av fyritíðarpensjónssatsunum. Útroknaði lønar- og prísvøksturin er ikki neyvur, tí generelli lønar- og prísvøksturin er nýttur og hædd er sostatt ikki tikið fyri ítøkiligum viðurskiftum viðvíkjandi teimum kannaðu útreiðslunum. Ein broyting í satsinum fyri lønar- og prísvøkstur upp á 1%-point broytir lønar- og prísvøksturin við áleið 4,5 mió.kr.

Verandi skráseting av virkseminum á almannaøkinum er ikki fullfíggjað, og tað er tí trupult at greina, hvussu stórur partur av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum stavar frá øktum virksemi. Verandi skrásetingar geva tó eina ábending um, at áleið 109 mió.kr. stava frá øktum virksemi á ymsu økjunum íroknað øking í rakstrarútreiðslunum til Almannastovuna og Nærverkið. Við økt virksemi meinast útreiðslur av virksemi í 2008, sum ikki var í 2003.

Hækkingin av almannaútreiðslunum, sum eru fevndar av játtanargreiningini, kann leysliga sundurgreinast soleiðis:

### *Talva 4: Útgreining av útreiðsluvøkstrinum frá 2003 til 2008*

| mió.kr. | 2003-2007 | 2008 | 2003-2008 |
|---|---|---|---|
| Lønar- og príshækking | 56 | 22 | 78 |
| Lógarásett hækking av fyritíðarpensjónssatsi | 34 | 17 | 51 |
| **Lønar-, prís- og lógarásettar hækkingar til samans** | **90** | **39** | **129** |
| **Fyritíðarpensjón - broyting í eindarprísi (eftirgjøld, inntøka v.m.)** | **-9** | **9** | **0** |
| Fyritíðarpensjón | | | |
| - lækking við 28 fyri tíðarskeiðið 2003-2007 og tilsvarandi hækking í 2008 | -4 | 4 | - |
| Økt virksemi: | | | |
| Børn og ung: | | | |
| - partur av stuðlunum lagdur til kommunurnar í 2006 (umleið) | -9 | - | -9 |
| - 2 nýggir stovnar | 5 | - | 5 |
| Serforsorg: | | | |
| - 4 nýggj pláss á heiminum fyri heilaskadd | 4 | | 4 |
| - 16 nýggj pláss á deildini fyri sinnisveik | 4 | 2 | 6 |
| - ávís hækking í virkseminum undir Trivnaðartænastuni | 2 | | 2 |
| Eldraøkið: | | | |
| - 113 nýggj búpláss á røktarheimum | 45 | 10 | 55 |
| - Økisterapi | 1 | | 1 |
| Vanlig forsorg: | | | |
| - Endurútbúgving, vard størv - umleið 110 fleiri størv harav umleið 30 í 2008 | 8 | 4 | 12 |
| - Endurútbúgving, fólk á stovni í Danmark - talið hækkað við uml. 20 harav umleið 5 í 2008 | 4 | 7 | 11 |
| - Hjálp til viðgerð á serligum stovni § 16 | 3 | | 3 |
| Stuðulstænastan: | | | |
| - Stuðlar til vaksin -talið av brúkarum í árinum er hækkað við umleið 60 harav umleið 20 í 2008 | 2 | 4 | 6 |
| Nærverkið, Meginskrivstovan (Stovnsett í 2004) | 6 | 1 | 7 |
| Almannastovan | 3 | 3 | 6 |
| **Hækking vegna økt virksemi til samans** | **74** | **35** | **109** |
| **Sundurgreinað hækking** | **155** | **83** | **238** |
| Ikki sundurgreinað hækking | 14 | 15 | 29 |
| **Samlað hækking** | **169** | **98** | **267** |

*Kelda: Egnar útrokningar*

Av talvuni sæst, at meira enn helmingurin av økta virkseminum stavar frá nýggjum búplássum á eldraøkinum, meðan økingin í virkseminum annars serliga stavar frá forsorgar- og serstovnaøkinum.

Talið av búplássum er í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 hækkað við 113, harav 17 nýggj pláss komu í 2008. Hækkingin skal síggjast saman við tí veruleika, at kommunurnar í 2002 yvirtóku ein størri part av fíggingini í sambandi við bygging av ellis- og røktarheimum.

Á serforsorgarøkinum eru nøkur nýggj pláss komin á heiminum fyri heilaskadd og deildini fyri sinnisveik, meðan virksemið undir Trivnaðartænastuni ikki er broytt stórvegis í tíðarskeiðinum.

Á økinum Børn og ung er útreiðslan á aðrari síðuni minkað við at ein partur av virkseminum varð lagdur undir kommunurnar í 2006 og á hinari síðuni økt við, at 2 nýggir stovnar eru komnir í tíðarskeiðinum.

Talið av fyritíðarpensjónistum hevur varierað nakað tey ymsu árini og í 2007 var talið 28 persónar lægri enn í 2003. Talið hækkaði aftur í 2008 til sama støði sum í 2003. Harafturat var miðal útgjaldið til hvønn fyritíðarpensjónist lutfalsliga lágt í 2007, tá ið hædd er tikið fyri lógarbundu hækkingini í satsunum. Hækkingin í miðalútgjaldinum frá 2007 til 2008 skyldast m.a., at mótrokningarprosentið orsakað av aðrari inntøku í 2008 varð lækkað úr 60% niður í 30%.

Útreiðslan til endurútbúgving er hækkað nógv seinastu árini, serliga orsakað av stóra vøkstrinum í talinum av vardum størvum og einum vøkstri í útreiðslum til endurútbúgving á stovni/skúla í Danmark. Talið av vardum størvum er økt javnt øll árini eftir at størri fokus varð sett á økið í 2002. Hinvegin er økingin í útreiðslunum á stovni/skúla í Danmark serliga hend í 2008. Útreiðslan hesum viðvíkjandi hækkaði javnt árini 2003 til 2007 úr næstan ongum til 4 mió.kr., meðan hon hækkaði til knappar 12 mió.kr. í 2008.

### *Játtanartilgongd og fíggjarstýring*

Fyri at meta um játtanartilgongdin fyri árini 2003 til 2008 eru samlaðu útreiðslurnar á einstøku høvuðskontunum samanbornar við lutvíst upprunaligu játtanina og lutvíst við endaligu játtanina fyri at síggja hvussu stór frávikini hava verið einstøku árini.

Samanumtikið kann sigast, at tað sum heild hevur verið rímiligt samsvar millum upprunaligu játtanirnar og staðfestu rakstrarútreiðslurnar, meðan frávikið í fleiri førum hevur verið nakað størri viðvíkjandi teimum lógarbundnu útreiðslunum.

Fyri at lýsa frávikini eru tølini fyri árini 2003 til 2008 fyri ávikavist rakstrarútreiðslurnar undir einum og lógarbundnu útreiðslurnar undir einum samanborin við játtanartølini fyri árið, sí talvu 5 og 6 niðanfyri.

### *Talva 5: Gongdin í rakstrarútreiðslunum*

| Rakstrarjáttanir til samans | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 348.444 | 372.092 | 398.259 | 444.712 | 470.591 | 513.424 |
| Eykajáttan | -1.476 | -2.138 | -2.833 | 5.859 | - | 5.399 |
| **Játtan til samans** | **346.968** | **369.954** | **395.426** | **450.571** | **470.591** | **518.823** |
| Staðfest tøl | 345.079 | 362.199 | 390.062 | 437.093 | 471.103 | 517.662 |
| **Meir/minninýtsla** | **-1.889** | **-7.755** | **-5.364** | **-13.478** | **512** | **-1.161** |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | -1,0 | -2,7 | -2,1 | -1,7 | 0,1 | 0,8 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | -0,5 | -2,1 | -1,4 | -3,0 | 0,1 | -0,2 |

*Kelda: Búskaparskipan Landsins.*

Sum tað sæst omanfyri er øll árini uttan 2007 talan um eina minninýtslu fyri allar kannaðar høvuðskontur undir einum í mun til endaligu játtanina og fyri árini 2003 til 2006 eisini eina minninýtslu fyri allar konturnar undir einum í mun til upprunaligu játtanina. Somuleiðis sæst, at fyri øll árini uttan 2006 er frávikið millum endaliga játtanina og staðfestu útreiðsluna lutfalsliga lágt.

Í 2006 vóru 5,9 mió.kr. givnar í eykajáttan, men endaliga nýtslan lá niðanfyri upprunaligu játtanina.

Ein av orsøkunum til frávikið var, at virksemið á stovnunum mátti skerjast grundað á at eykajáttanin ikki varð givin fyrr í november 2006. Harumframt er talan um, at planlagt virksemi á serforsorgarøkinum ikki kom í gongd soleiðis sum upprunaliga ætlað.

Niðanfyri er gongdin í lógarbundnu útreiðslunum undir einum samanborin við ávikavist upprunaligu játtanina og endaligu játtanina.

### *Talva 6: Gongdin í lógarbundnum útreiðslum*

| Lógarbundnar útreiðslur | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 276.519 | 311.626 | 317.803 | 299.584 | 315.607 | 350.400 |
| Eykajáttan | 29.555 | -10.709 | 2.047 | 11.346 | - | - |
| **Játtan til samans** | **306.074** | **300.917** | **319.850** | **310.930** | **315.607** | **350.400** |
| Staðfest tøl | 300.912 | 307.337 | 320.817 | 315.810 | 327.334 | 375.317 |
| **Meir/minninýtsla** | **-5.162** | **6.420** | **967** | **4.880** | **11.727** | **24.917** |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | 8,8 | -1,4 | 0,9 | 5,4 | 3,7 | 7,1 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | -1,7 | 2,1 | 0,3 | 1,6 | 3,7 | 7,1 |

*Kelda: Búskaparskipan Landsins.*

Sum tað sæst vísa lógarbundnu útreiðslurnar hinvegin eina meirnýtslu í mun til endaligu játtanina øll árini uttan í 2003 og øll árini uttan í 2004 eina meirnýtslu í mun til upprunaligu játtanina.

Meirnýtslan í mun til upprunaligu játtanina hevur fyri øll árini uttan 2004 og 2005 verið rímiliga stór.

Í 2008 varð biðið um eykajáttan til lógarbundnu útreiðslurnar, men umbønin varð ikki gingin á møti.

Stóra frávikið í 2003 skyldast serliga meirútreiðslur til hjálpitól, tá ið fokus varð sett á økið og nógvar umsóknir vóru avgreiddar. Orsøkin til umbønina um eykajáttan í 2006 skyldast serliga, at Almannastovan tá avgreiddi størsta partin av fyritíðarpensjonistumbønunum, sum komu frá Færøernes Ulykkeforsikringsråd.

Í 2007 varð biðið um eykajáttan til m.a. hjálpitól, men umbønin fall burtur vegna nýval. Biðið varð um 4,9 mió.kr. í eykajáttan, men staðfesta útreiðslan gjørdist 10 mió.kr. hægri, m.a. tí at útreiðslurnar til umbyggingar av sethúsum og avlamisbilar gjørdist størri enn mett.

Í 2008 varð biðið um eykajáttan, men fíggjarnevndin og tingið vildu ikki ganga umbønini á møti. Meirútreiðslan í 2008 viðvíkir serliga Endurbúgving og Fyritíðarpensjón. Viðvíkjandi Endurbúgving var tað serliga útreiðslan til vard størv og stovnsuppihald á stovni í Danmark, sum gjørdust væl størri enn upprunaliga mett.

Í viðmerkingunum til einstøku økini er gjørt vart við, at tað ikki altíð í nóg stóran mun verður tikið hædd fyri planløgdum tiltøkum, tá ið arbeitt verður við játtanartølunum.

Viðvíkjandi fíggjarstýringini kann samanfatandi sigast, at stovnarnir hava eina skipaða stýring, sum í 2009 er blivin meiri formaliserað. Á Nærverkinum er ein mannagongd, har stovns- og økisleiðarar hvønn mánað skulu góðkenna roknskapin fyri økið formliga yvir fyri leiðsluni á Nærverkinum. Á Almannastovuni verður í løtuni arbeitt við eini mannagongd, har leiðararnir framyvir formliga skulu góðkenna ein útvaldan part av roknskapartølunum hvønn mánað.

Á forsorgarøkinum er í ávísum førum munur á, hvør ávísir eina veiting/tænastu av eini konto og hvør hevur ábyrgdina av játtanini. Í teimum førum, har markamótini millum ymsu myndugleikarnar eru ógreið, verður fíggjarstýringin og roknskaparuppfylgingin óneyðuga trupul.

Økið Børn og ung er í løtuni undir umskipan og varð hin 1. september 2009 lagt undir Nærverkið. Hagtalsgrundarlagið á økinum er ófullfíggjað, men sambært móttiknum upplýsingum var talið av børnum á fleiri av bústovnunum í 2008 væl undir talinum av búplássum. Ein samskipan av ymsu tilboðunum á dag- og samdøgursstovnunum tykist tískil væl grundað fíggjarliga. Í hvønn mun ein samskipan er fakliga ráðilig ella væl grundað hevur ikki verið ein partur av greiningini.

## 2.2 Tilmæli

*Almannaøkið í framtíðini*

Samanfatandi kann sigast, at útreiðslurnar á almannaøkinum væntandi fara at økjast munandi í komandi árum, serliga innan eldrarøktina har talið av eldri fólki fer at økjast komandi árini. Almannaútreiðslurnar koma sostatt væntandi at verða ein lutfalsliga størri og størri partur av samlaðu fíggjarlógini, og tískil er alneyðugt, at skipað verður so fyri, at sum mest fæst fyri tann pening, sum verður nýttur til raksturin á eldraøkinum og at ásett verður, hvørjar tænastur/veitingar skulu fáast fyri peningin.

Í sambandi við væntaða vøksturin í útreiðslunum á almannaøkinum verður mælt til:

- at hildið verður eitt aðalorðaskifti hvørs endamál er politiskt at áseta hvussu vælferðarsamfelagið skal skipast í framtíðini, soleiðis at útreiðslurnar eru á einum hóskandi støði í mun til samlaðu fíggjarlógina. Hetta skal m.a. gerast við at áseta hvørjar tænastur tað almenna skal átaka sær og í hvønn mun hesar skulu vera ókeypis.
- at faklig tilmæli verða útvegað um nýggjar búformar og røktarskipanir, sum betur nøkta framtíðar tørvin hjá tí einstaka á eldraøkinum
- at broytingar verða gjørdar í stuðulslóggávuni, sum í dag einans stuðlar upp undir bygging av røktar- og sambýlum
- at rammulóg verður gjørd fyri eldraøkið, har m.a. verður ásett, hvør hevur ábyrgdina av eldrarøktini, og har rættindini borgaranna verða tryggjað

Støða eigur at verða tikin til nevndu viðurskifti uttan mun til um eldrarøktin verður løgd út til kommunurnar at umsita í framtíðini.

*Samanbering*

Staðfest er, at almannaútreiðslurnar í Føroyum eru lægri enn í Danmark, bæði í mun til pr. íbúgva og í mun til tøku bruttotjóðarinntøkuna. Samanberingar eru tó truplar grundað á ymisleikan í m.a. skattaskipan, netto- og bruttoveitingum og útboði av tænastum. Harumframt er ongin umrokningarfaktorur útroknaður fyri Føroyar, sum ger tað møguligt at samanbera hvussu nógv keypiorka fæst fyri t.d. 1.000 kr. í Føroyum í mun til 1.000 kr. í Danmark.

Fyri at kunna gera neyvar samanberingar av almannaútreiðslunum í Føroyum við onnur lond verður mælt til, at:

- ein umrokningarfaktorur verður útroknaður fyri Føroyar.

*Ófullfíggjað hagtøl v.m.*

Sum nevnt er tað trupult at greina útreiðsluvøksturin neyvt við tað at tað mangla skipaðar, teldutøkar skrásetingar av hagtølum yvir brúkararnar av ymsu skipanunum.

Uttan nøktandi hagtøl er trupult at meta um og samanbera eindarprísirnar á ymsu veitingunum/stovnunum eins og tað er trupult at meta um avleiðingarnar, tá ið nýggjar skipanir verða settar í verk, herundir avleiðingarnar á aðrar skipanir.

Fyri at styrkja um játtanartilgongdina og fíggjarstýringina verður mælt til:

- at betrað verður um hagtalsgrundarlagið við at fáa eina skipaða, teldutøka skráseting av virkseminum á teimum einstøku økjunum út frá eini ítøkiligari meting av tørvinum. Hetta krevur møguliga íløgur í nýggjar skrásetingarskipanir og/ella útbygging av verandi skipanum

*Vaktplanskipan*[5]

Teldutøka vaktplanskipanin, sum nógvir stovnar undir Almannamálaráðnum nýta, tá ið arbeiðið á stovninum verður lagt til rættis, er eitt gott amboð til at leggja arbeiðstíðirnar hjá hvørjum einstøkum starvsfólki til rættis, soleiðis at tey í best møguligan mun nøkta tørvin hjá stovninum.

Mett verður, at vaktplanskipanin kann verða útbygd til eisini at kunna nýtast til fíggjarligar útrokningar og á tann hátt verið við til at betra játtanartilgongdina og fíggjarstýringina á ymsu stovnunum og á ymsu økjunum sum heild.

Mælt verður til:

- at verandi vaktplanskipan verður útbygd til eisini at kunna nýtast til fíggjarligar útrokningar, t.d. avleiðingar av broyting í virksemi og broyting í sáttmálalønum.

*Tyngdarmetingarskipan*[6]

Á bústovnaøkinum sum heild er tað ein trupulleiki, at starvsfólkanormeringarnar ikki í neyðugan mun taka hædd fyri broytingum yvir tíð í røktartyngdini hjá búfólkunum. Á eldraøkinum er dagprísurin tann sami óansæð røktartyngdina hjá búfólkunum, tó undantikið at demensplássini fáa eina hægri játtan, og á serstovnaøkinum eru tillagingar bert gjørdar í mun til upprunaligu normeringina í hendingaførum.

Fyri at tryggja, at sett verður inn har tørvurin er størstur og at sum mest fæst fyri peningin verður mælt til, at:

- ein tyngdarmetingarskipan verður innførd, soleiðis at tilfeingisnýtslan er so skynsom sum møguligt og at dagsprísirnir verða betur grundaðir. Við eini tyngdarmetingarskipan verður tryggjað, at normeringarnar eru eins til ymsu bólkarnar av búfólki. Tað eigur at verða umhugsað eisini at nýta tyngdarmetingarskipanina í sambandi við heimatænastuna og á serforsorgarøkinum.

---

[5] Vaktplanskipanin er ein teldutøk skipan, sum verður nýtt, tá ið arbeiðið á stovnunum verður lagt til rættis.

[6] I Danmark verður ein tyngdarmetingarskipan nýtt á eldraøkinum, sum verður kallað "Fælles sprog". Í Íslandi verður ein skipan nýtt, sum verður kallað RAI. Hendan skipan verður eisini partvíst nýtt í Noregi.

*Økisbygnaður*

Eldraøkið er í dag býtt sundur í 6 ymisk øki, sum eru skipað eftir ymsum leistum umframt at tað er ymiskt frá øki til øki hvussu nógvar visitatiónsnevndir eru. Í sambandi við stýringina hjá Nærverkinum er staðfest, at sjálvsognarstovnarnir geva ávísar trupulleikar, tí við verandi bygnaði hevur Nærverkið ikki møguleika fyri at seta inn yvir fyri teimum stovnsleiðarunum, sum ikki yvirhalda fráboðanarskylduna yvir fyri Nærverkinum ella ikki yvirhalda játtanina.

Undir Trivnaðartænastuni eru nógv bú-, dag- og umlættingartilboð, sum hava verið skipað undir hvør síni leiðslu. Arbeitt verður í løtuni við at samla fleiri stovnar undir somu leiðslu umframt at skipa økið øðrvísi.

Stuðulstænastan fyri vaksin er í løtuni skipað í 2 øki við hvør sínum leiðara.

Mælt verður til:

- at samskipanin millum røktarheim, eldrasambýli og heimarøkt verður gjørd eftir sama leisti í teimum ymsu økjunum, íroknað at verandi bygnaður við sjálvsognarstovnum verður endurskoðaður fyri at fáa eitt greiðari ábyrgdarbýti
- at arbeitt verður við at fáa til vega ein yvirskipaðan bygnað á serstovnaøkinum og stuðulsøkinum har greitt verður allýst hvørjir brúkararnir eru, hvørjir stovnar tørvur er á og hvussu hesir kunnu samskipast fyri at fáa ein so skynsaman rakstur sum til ber og út frá hesum tillaga verandi bygnað
- at ein bygnaður við eini sentralt stýrdari visitatión fyri alt landið verður umhugsaður, tí hetta hevði betrað um bæði fakligu og fíggjarligu stýringina á økinum
    - á fakliga økinum hevði tørvurin í hvørjum øki blivið meiri sjónligur og harvið kunnu stovnsplássini tillutast teimum, sum hava størstan tørv
    - á fíggjarliga økinum vildi hetta betrað um møguleikarnar at stýrt virkseminum, soleiðis at sum mest fekst fyri játtanina.
- at reglur verða gjørdar um virksemið hjá visitatiónsnevndunum
- at visitatiónin eisini skal fevna um tænastuna, sum verður veitt úti í privatum heimum av heimahjálpum og stuðulsfólkum

Greiningin vísir, at búfólk á ávikavist eldra- og serforsorgarøkinum verða viðgjørd ymiskt fíggjarliga alt eftir um tey búgva á røktarheimum/bústovnum ella eldrasambýlum/sambýlum. Á røktarheimum/bústovnum fáa búfólkini onga pensjón, men fáa útgoldið lummapening, meðan búfólk á eldrasambýlum/sambýlum fáa útgoldið pensjón og gjalda leigu fyri bústaðin.

Í hesum sambandi verður mælt til:

- at mett verður um hvørt ójavna fíggjarliga viðgerðin av búfólkunum á ávikavist ellisheimum/bústovnum og eldrasambýlum/sambýlum er hóskandi

*Sandoyggin*

Á Sandoynni er tann serskipan galdandi, at búfólkini á røktarheiminum varðveita pensjónina umframt at kommunurnar á Sandoynni ikki eru við til at fíggja raksturin av eldrasambýlunum eins og í restina av landinum.

Í hesum sambandi verður mælt til:

- at mett verður um hvørt ójavna fíggjarliga viðgerðin av búfólkunum á ellisheiminum á Sandoynni og aðrastaðni í landinum er ynskilig.
- hvørt tað er ynskiligt at fíggjarliga býtið millum land og kommunur av rakstrinum av eldrasambýlum er øðrvísi á Sandoynni enn í restina av landinum.

*Lógir og kunngerðir*

Á forsorgarøkinum er staðfest, at landsgrannskoðarin í fleiri ár hevur viðmerkt, at tað mangla at verða gjørdar kunngerðir, sum kunnu nágreina hvørjar veitingar kunnu/skulu fáast eftir forsorgarlógini. Manglandi kunngerðir eru viðvirkandi til, at lógin gerst óneyðuga trupul at umsita. Harumframt er staðfest, at tørvur er á lógarbroytingum á ymsum økjum serliga innan vanliga forsorg.

Mælt verður tískil til:

- at neyðugar lógarbroytingar verða gjørdar á teimum økjum, har orðingin í lógini er ógreið
- at kunngerðir verða gjørdar í teimum førum, har hetta verður fyriskrivað í lógartekstinum. Endamálið við kunngerðunum skal vera at fáa neyvari ásetingar um hvørjar veitingar kunnu latast í teimum einstøku førunum

*Fíggjarlógararbeiði*

Viðvíkjandi fíggjarlógararbeiðinum hevur tað verið ein trupulleiki, at politiska avgerðin um býtið av samlaða karminum millum ymsu málsøkini hevur drigið út. Hetta hevur gjørt arbeiðið hjá umsitingini óneyðuga trupult, tí tíðarkarmurin at gera neyðugu tillagingarnar hevur verið ov stuttur.

Harumframt hevur arbeiðið við eykajáttanarlógum ofta drigið út, lutvíst tí at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur lagt uppskotið seint fyri tingið og lutvíst tí at viðgerðin í tinginum hevur verið drúgv.

Spurningurin um tað er neyðugt at biðja um eykajáttan, tá ið talan er um meirnýtslu á lógarbundnu útreiðslum, hevur verið umrøddur nýliga, og ymisk sjónarmið hava verið førd fram hesum viðvíkjandi.

Mælt verður til:

- at uppskotið hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum um játtanarkarm, býtt á greinar, sum sambært nýggju játtanarlógini skal verða lagt fyri tingið áðrenn 1. apríl verður avgreitt/samtykt áðrenn tingið fer í summarfrí
- at uppskot til eykajáttanir verða avgreidd fyrr upp á árið enn vanligt hevur verið seinnu árini, har hesi ofta ikki eru endaliga avgreidd í tinginum fyrr enn í seinnu helvt av november. Hetta kann antin gerast við, at Fíggjarmálaráðið leggur eykajáttanaruppskotið fram fyrr ella at viðgerðartíðin í tinginum verður stytt
- at greiða fæst á spurninginum um tað er neyðugt at biðja um eykajáttan, tá ið talan er um meirnýtslu á lógarbundnum útreiðslum.

*Onnur viðurskifti*

Á Almannastovuni verður í løtuni arbeitt við eini mannagongd, har leiðararnir framyvir formliga skulu góðkenna ein útvaldan part av roknskapartølunum hvønn mánað. Mælt verður til:

- at hetta arbeiðið verður uppraðfest, soleiðis at teir ymsu leiðararnir fáa formliga ábyrgd fyri roknskapartølunum

Sum víst á er tað á forsorgarøkinum í ávísum førum munur á, hvør ávísir eina veiting/tænastu av eini konto og hvør hevur ábyrgdina av játtanini. Ógreið markamót gera fíggjarstýringina óneyðuga trupla og tí verður mælt til:

- at samsvar fæst ímillum hvør ávísur av eini játtan og hvør hevur ábyrgdina av hesi

Sum nevnt omanfyri er økið Børn og ung undir umskipan. Talan er um eitt viðkvæmt øki, sum hevur fingið nógva umtalu seinastu tíðina. Mælt verður til,

- at arbeitt verður við at finna ein loysn á bygnaðartrupulleikunum sum bæði fíggjarliga og fakliga er ráðilig.

# 3 Benchmarking

Í hesum fyrsta pettinum er gjørd ein yvirskipað samanbering av gongdini í teimum útreiðslum, sum eru fevndar av hesi kanning, við gongdina í øðrum útreiðslubólkum á fíggjarlógini umframt at ymsar samanberingar eru gjørdar við Danmark og Ísland.

Í samanberingini við aðrar útreiðslubólkar í fíggjarlógini í Føroyum er endamálið at lýsa relativu gongdina í útvaldu útreiðslunum sammett við gongdina annars, hetta fyri at fáa eina fatan av um vøksturin á útvaldu kontunum á almannaøkinum er størri enn á øðrum økjum ella ikki.

Í samanberingini við Danmark og Ísland er endamálið at lýsa nýtsluna í Føroyum á ymsu økjunum við tilsvarandi nýtslu í Danmark og Íslandi. Harumframt verður gongdin lýst í mun til tøku bruttotjóðarinntøkuna. Tøka bruttotjóðarinntøkan er vald sum samanberingar-grundarlag heldur enn bruttotjóðarúrtøkan fyri at fáa samlaðu inntøkuna íroknað blokkstuðulin frá Danmark við í grundarlagið.

## 3.1 Samanbering millum útreiðslubólkar í Føroyum

### 3.1.1 Samanbering við aðrar almennar útreiðslur

Samlaðu netto landskassaútreiðslurnar í 2008 vóru upp á 4.251 mió.kr. Niðanfyri er lutfallið millum ymsu greinarnar lýst.

***Mynd 1: Netto landskassaútreiðslur fyri 2008, býtt á greinar***




*Kelda: Landsroknskapurin fyri 2008.*

Av myndini sæst, at tríggjar tær størstu greinarnar umboða umleið 72% av samlaðu netto landskassaútreiðslunum í 2008. Umframt almannamál, sum fevna um 36%, eru størstu

greinarnar útbúgving og gransking við 20% og heilsumál við 16%. Kanningin fevnir um 62% av samlaðu almannaútreiðslunum svarandi til 22% av netto landskassaútreiðslunum.

Gongdin í netto landskassaútreiðslunum og innan størstu greinarnar í landsroknskapinum fyri árini frá 2003 til 2008 framganga av mynd 2 niðanfyri. Harumframt framganga játtanar-tølini fyri 2009 og 2010.

***Mynd 2: Gongdin í útvaldum almennum útreiðslum fyri árini 2003 til 2008 og játtan fyri 2009 og 2010***




*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008, fíggjarlógin fyri 2009 til og við eykajáttanarlógina, sum varð samtykt 5. november 2009 og fíggjarlógaruppskotið fyri 2010.*

Netto landskassaútreiðslurnar eru í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 hækkaðar við 33%, útreiðslurnar til heilsumál við 39%, útreiðslurnar til útbúgving og gransking við 34% og til almannamál við 26%.

Sostatt eru útreiðslurnar til almannamál undir einum hækkaðar minni enn netto landskassaútreiðslurnar til samans og útreiðslurnar á tveimum teimum størstu greinunum annars.

Meðan samlaðu landskassaútreiðslurnar øktust við 18% í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2007, øktust tær við 13% frá 2007 til 2008. Størstu lutfalsligu økingarnar í landskassaútreiðslunum í 2008 í mun til 2007 stava frá øking í øðrum greinum enn teimum, sum eru nevndar omanfyri, m.a. frá fíggjarmálum við 106 mió.kr., fiskivinnumálum við 58 mió.kr. og vinnumálum við 53 mió.kr.

Tað serliga við fíggjarárinum 2008 var, at ein bráðfeingis játtanarlóg var galdandi heilt fram til 30. mai 2008, orsakað av at nýval varð útskrivað. Landsstýrið legði tí fram uppskot til bráðfeingis fíggjarlóg tann 12. desember 2007 og tann 14. desember 2007 kom álit frá fíggjarnevndini. Í álitinum stendur m.a.:

*"Nevndin leggur dent á, at tað er sera umráðandi at støðan í 2004, tá tað tyktist at alt ov stór nýtsla fór fram á ávísum konti, ikki endurtekur seg. Nevndin skilir, at viðmerkingarnar í uppskotinum nú taka hædd fyri hesum."*

Í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2008 viðmerkti fíggjarnevndin í fíggjarnevndar-álitinum:

*"Meirilutin staðfestir, at ikki er ráðiligt at gera stórar skerjingar í útreiðslunum, nú fíggjarárið næstan er hálvrunnið. Óvist er eisini, um tílíkar skerjingar høvdu havt ætlaða virknaðin í 2008 uttan so, at ógvuslig tiltøk, ið vit ikki kenna avleiðingarnar av, høvdu verið framd."*

Staðfestast kann, at útreiðsluvøksturin í 2008 er væl hægri enn árini frammanundan.

Samlaðu netto landskassaútreiðslurnar í upprunaligu fíggjarlógini fyri 2009 vóru umleið 90 mió.kr. lægri enn tølini í talvuni omanfyri sýna. Til samanberingar kann nevnast, at samlaðu netto landskassaútreiðslurnar sambært fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010 eru á sama støði sum upprunaliga uppskotið fyri 2009 og tí er møguliga ikki í fullan mun tikið hædd fyri hækkingunum í 2009.

Sum tað sæst av mynd 2 omanfyri vísir fíggjarlógaruppskotið fyri 2010 eina lækking í vøkstrinum, sum hevur verið í útreiðslunum til almanna- og heilsumál seinastu árini, meðan útreiðslan til útbúgving og gransking framhaldandi sýnir ein javnan vøkstur. Samlaða lækkingin í netto landskassaútreiðslunum í ætlanartølunum skyldast, at mann í uppskotinum mælir til at skerja játtanina til aðrar greinar.

Tað skal viðmerkjast, at í mun til upprunaligu játtanina fyri 2009 hava bæði almanna- og heilsumál fingið munandi eykajáttanir í 2009. Fíggjarlógin fyri 2010 fyri almannamál er á sama støði sum samlaða játtanin fyri 2009, og byggir hendan m.a. á, at nakrar broytingar skulu gerast í lógarverkinum á økinum.

Játtanargreiningin fevnir bert um ein part av samlaðu útreiðslunum á almannaøkinum. Niðanfyri er gongdin í útreiðslunum, sum eru fevndar av kanningini, samanborin við gongdina í samlaðu útreiðslunum á almannaøkinum eins og við netto landskassa-útreiðslurnar. Somuleiðis er gongdin í tøku bruttotjóðarinntøkuni víst.

***Mynd 3: Gongdin í almannaútreiðslunum sum heild, almannaútreiðslunum, sum eru fevndar av játtanargreininini, netto landskassaútreiðslunum, netto landskassa-útreiðslunum undantikið kannaðu almannaútreiðslunum og tøku bruttotjóðarinntøkuni***




*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008, fíggjarlógin fyri 2009 til og við eykajáttanarlógina, sum varð samtykt 5. november 2009 og fíggjarlógaruppskotið fyri 2010, Hagstova Føroya og Landsbanka Føroya.*

Av myndini sæst, at í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 eru:

- útreiðslurnar, sum eru fevndar av játtanargreiningini, hækkaðar við 40%,
- netto landskassaútreiðslurnar hækkaðar við 33%

- netto landskassaútreiðslurnar undantikið kannaðu almannaútreiðslurnar hækkaðar við 32% og
- almannaútreiðslurnar undir einum við 26%.

Í fimm ára tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 eru kannaðu almannaútreiðslurnar undir einum sostatt hækkaðar við 7%-stigum meira enn netto landskassaútreiðslurnar. Hinvegin sæst av myndini, at kannaðu almanna-útreiðslurnar ætlandi koma at hækka væl meiri enn netto landskassaútreiðslurnar í 2009 og 2010.

Av almannaútreiðslum, sum eru hækkaðar lutfalsliga lítið, kunnu serliga nevnast fólkapensjónin, sum er hækkað við áleið 9% í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 og sjúkradagpeningaskipanin, sum er hækkað við áleið 17%. Viðmerkjast skal, at útgjaldið frá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum til pensjónistarnar ikki inngongur í útreiðslutølini í landsroknskapinum og er tískil ikki tikið við í tølunum omanfyri.

Almannaútreiðslurnar, sum eru fevndar av kanningini, hækkaðu árliga í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2007 við millum 4% og 6%, meðan hækkingin í 2008 var upp á 12%.

Størstu hækkingarnar frá 2007 til 2008 stava frá eldrarøktini, fyritíðarpensjón og vanligari forsorg.

Í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2007 hækkaði tøka bruttotjóðarinntøkan við 26%, sum er nakað meiri enn útreiðslurnar, sum framganga av myndini, hækkaðu. Hinvegin hækkaði tøka bruttotjóðarinntøkan einans 1% frá 2007 til 2008. Í búskaparmeting frá 13. oktober 2009 metir Landsbanki Føroya, at bruttotjóðarúrtøkan fer at lække við umleið 3% í 2009 og hækka við umleið 3% í 2010.

### 3.1.2 Samandráttur

Samanumtikið kann sigast, at kannaðu almannaútreiðslurnar fyri tíðarskeiðið frá 2003 til 2008 eru hækkaðar lutfalsliga á leið tað sama sum útreiðslurnar til heilsumál, umleið 10% meira enn útreiðslurnar til útbúgving og gransking og 7% meira enn netto landskassa-útreiðslurnar.

Nógv tann størsta hækkingini í kannaðu útreiðslunum hendi í 2008, tá ið endaliga fíggjarlógin ikki varð samtykt fyrr enn 30. mai 2008.

Kannaðu almannaútreiðslurnar hækkaðu í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2007 við 1% minni enn tøka bruttotjóðarinntøkan. Hinvegin hækkaðu kannaðu almannaútreiðslurnar frá 2007 til 2008 við áleið 11% meira enn tøka bruttotjóðarinntøkan, og hendan gongdin sær út til at halda fram komandi tvey árini.

### 3.1.3 Lógarbundnar útreiðslur ávikavist rakstrarútreiðslur

Ein partur av útreiðslunum, sum eru fevndar av játtanargreiningini, eru lógarbundnar, meðan aðrar eru vanligar rakstrarútreiðslur.

Niðanfyri er víst ein mynd, har gongdin í ávikavist lógarbundnu útreiðslunum og rakstrarútreiðslunum, sum eru fevndar av játtanargreiningini, er samanborin við gongdina í

netto landskassaútreiðslunum fyri árini 2003 til 2008. Játtanartølini fyri 2009 og 2010 eru somuleiðis víst fyri at vísa mettu gongdina í hesum árum.

***Mynd 4: Gongdin í netto landskassaútreiðslunum, lógarbundnu útreiðslunum og rakstrarútreiðslunum, sum eru fevnd av hesi játtanargreining***




*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008, fíggjarlógin fyri 2009 til og við eykajáttanarlógina, sum varð samtykt 5. november 2009 og fíggjarlógaruppskotið fyri 2010.*

Av myndini sæst, at vøksturin í samlaðu lógarbundnu útreiðslunum, sum eru fevndar av játtanargreiningini, í tíðarskeiðinum er lægri enn vøksturin av vanligu rakstrarútreiðslunum og á leið tann sami sum í netto landskassaútreiðslunum.

### *3.1.3.1 Lógarbundnar útreiðslur*

Av lógarbundnum útreiðslum fevnir kanningin um ansingarsamsýning, vanliga forsorg og fyritíðarpensjón. Samlaða útreiðslan á hesum kontum var í 2008 upp á 375 mió.kr., býtt soleiðis millum ymsu konturnar:

***Mynd 5: Býtið av lógarbundnu útreiðslunum í 2008***




*Kelda: Landsroknskapirnir fyri 2008.*

Sum tað sæst av mynd 5 omanfyri er fyritíðarpensjónin nógv tann størsta lógarbundna útreiðslan, sum er fevnd av kanningini.

Niðanfyri er gongdin í hesum undirkontum samanborin við gongdina í netto landskassa-útreiðslunum.

***Mynd 6: Gongdin í lógarbundnu útreiðslunum ansingarsasmsýning, vanlig forsorg og fyritíðarpensjón sammet við netto landskassaútreiðslurnar***




*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008, fíggjarlógin fyri 2009 til og við eykajáttanarlógina, sum varð samtykt 5. november 2009 og fíggjarlógaruppskotið fyri 2010.*

Av myndini sæst, at útreiðslurnar til ansingarsamsýning og vanliga forsorg eru hækkaðar væl meira enn netto landskassaútreiðslurnar, meðan útreiðslurnar til fyritíðarpensjón eru hækkaðar lutfalsliga minni.

Orsøkin til at lógarbundnu útreiðslurnar undir einum sýna ein vøkstur á sama støði sum netto landskassaútreiðslurnar er, at fyritíðarpensjónin svarar til áleið tveir triðingar av hesum útreiðslum, sí mynd 5 omanfyri.

Nærri verður greitt frá gongdini í einstøku lógarbundnu undirkontunum í kapittul 4.

### 3.1.3.2 *Rakstrarútreiðslurnar*

Rakstrarútreiðslurnar, sum eru fevndar av játtanargreiningini, eru høvuðskonturnar Børn og ung, Eldrarøkt, Serforsorg og Stuðulstænastan fyri vaksin.

Samlaða útreiðslan til hesar høvuðskontur upp á 518 mió.kr. í 2008 var býtt soleiðis millum ymsu konturnar:

***Mynd 7: Býtið av rakstrarútreiðslunum í 2008***




*Kelda: Landsroknskapirnir fyri 2008.*

Av myndini sæst, at eldrarøktin í 2008 fevnir um 61% av teimum rakstrarútreiðslum, sum eru við í hesi greining.

Niðanfyri er víst ein mynd, har gongdin í rakstrarútreiðslunum er samanborin við gongdina í netto landskassaútreiðslunum fyri árini 2003 til 2008.

***Mynd 8: Gongdin í rakstrarútreiðslunum Børn og ung, Eldrarøkt og Serforsorg sammett við netto landskassaútreiðslurnar***




*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008, fíggjarlógin fyri 2009 til og við eykajáttanarlógina, sum varð samtykt 5. november 2009 og fíggjarlógaruppskotið fyri 2010.*

Á myndini omanfyri eru indekstølini fyri Stuðulstænastuna fyri vaksin ikki tikin við. Útreiðslan á hesi konto er økt við 153% frá 2003 til 2008. Sum tað sæst av mynd 8 omanfyri er talan er um eina lutfalsliga lítla játtan, sum er farin frá 8,5 mió.kr. í 2003 til 21,8 mió.kr. í 2008.

Tað skal viðmerkjast, at stóra niðurgongdin í høvuðskontuni Børn og ung frá 2005 til 2006 skyldast, at økið varð umskipað í 2006, soleiðis at kommunurnar yvirtóku ein part av útreiðslunum til børn og ung frá 2006 at rokna. Tølini eru tískil ikki samanberilig fyri tíðarskeiðið sum heild.

Sum tað sæst er tað útreiðslan til eldrarøkt, sum økist lutfalsliga mest í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008. Útreiðsluhækkingin er upp á 48% og stavar í størsta mun frá eini øking í útreiðslunum til røktarheim, har talið av plássum í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 er hækkað úr 257 plássum til 370 pláss svarandi til umleið 44%,

Útreiðslurnar til serforsorg eru øktar eitt vet meira enn netto landskassaútreiðslurnar. Hinvegin sæst av fíggjarlógunum fyri 2009 og 2010 (uppskot), at roknað verður við, at útreiðslurnar til serforsorg fara at økjast væl meira enn netto landskassaútreiðslurnar hesa komandi tíðina.

Í kapittul 4 verður komið nærri inn á gongdina í einstøku rakstrarkontunum.

### *3.1.3.3 Samandráttur*

Samanumtikið kann sigast, at meðan netto landskassaútreiðslurnar í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 øktust við 33%, øktust kannaðu lógarbundnu útreiðslurnar við 34% og kannaðu rakstrarútreiðslurnar við 45%.

Fyritíðarpensjón, sum er størsta kannaða lógarbundna játtanin, hækkaði minst av øllum teimum kannaðu høvuðskontunum, nevniliga við 25%.

Eldrarøktin og serforsorgin, sum eru tær størstu kannaðu rakstrarjáttanirnar, hækkaðu ávikavist 48% og 36% í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008, sum er meiri enn vøksturin í netto landskassaútreiðslunum til samans.

Sostatt kann sigast, at fyri tíðarskeiðið frá 2003 til 2008 er onki sum týðir uppá, at kannaðu lógarbundnu útreiðslurnar eru øktar meiri enn útreiðsluvøksturin í samfelagnum annars soleiðis sum nevnt varð í arbeiðssetninginum. Hinvegin eru kannaðu rakstrarútreiðslurnar hækkaðar lutfalsliga nógv.

## 3.2 Samanbering av almannaútreiðslum millum lond

Í samanberingini av gongdini í almannaútreiðslum millum Føroyar, Ísland og Danmark eru almannaútreiðslurnar gjørdar upp eftir endamáli sambært COFOG-uppbýtinum[7]. Í COFOG-tølunum eru einans útreiðslur tiknar við, sum eru goldnar av landskassanum og kommununum við tilhoyrandi grunnum, t.d. ALS). Talan er sostatt einki um samlaðu sosialu útreiðslurnar í samfelagnum, tí tann parturin, ið verður fíggjaður av t.d. arbeiðsgevaragjøldum og tryggingum er ikki við.

Bæði Danmark og Ísland (og hini Norðurlondini) bólka teirra útreiðslutøl eftir COFOG-leistinum, og bólkingin av útreiðslunum er tískil eins í ymsu londunum.

Samanberingin hevur fyrst og fremst havt sum endamál at staðfesta gongdina í útreiðslum á almannaøkinum. Hinvegin er bert í minni mun kannað eftir, hví munir eru í útreiðslustøðinum og útreiðslugongdini, tí hetta í sær sjálvum krevur eitt stórt kanningararbeiði.

Sum ein fyritreyt fyri neyvt at kunna samanbera útreiðslur í ymsum londum, er eisini neyðugt at hava ein umrokningarfaktor, sum ger tað møguligt at umrokna útreiðslur til keypiorku. Tílíkir umrokningarfaktorar eru útroknaðir í londum, vit vanliga samanbera okkum við, men er ikki útroknaður í Føroyum. Hetta ger m.a., at tað ikki er møguligt at siga, hvussu nógv keypiorka fæst fyri 1.000 kr. í Føroyum í mun til 1.000 kr. í Danmark.

Mælt verður til, at omanfyrinevndi umrokningarfaktorur verður gjørdur fyri Føroyar. Uttan umrokningarfaktorin ber ikki til at gera neyvar samanberingar um ymisk viðurskifti í Føroyum við onnur lond.

[7] Classification Of the Functions Of Government

### 3.2.1 Almannaútreiðslur í mun til bruttotjóðarinntøku

Niðanfyri er gjørd ein samanbering av almannaútreiðslunum í Føroyum sammett við Danmark og Ísland.

Niðanfyri er víst ein uppgerð yvir almannaútreiðslurnar í Føroyum fyri 2007, bólkaðar sambært COFOG.

***Talva 7: Útreiðslur til almannamál og útreiðslur fevndar av játtanargreiningini í 2007, bólkaðar sambært COFOG***

| | COFOG útreiðslur til samans | Fevnt av játtanar-greining | Fevnt í % |
|---|---|---|---|
| **Sjúka og avlamni** | 519 | 417 | 80,4% |
| **Ellistænastur og -veitingar** | 923 | 297 | 32,1% |
| **Eftirsetuhjálp** | 2 | 0 | - |
| **Familja og børn** | 491 | 63 | 12,8% |
| **Arbeiðsloysi** | 71 | 0 | - |
| **Býlisstuðul** | 126 | 0 | - |
| **Forsorgarhjálp i.a.n.** | 1 | 0 | - |
| **Gransking og menning í almannamálum** | 0 | 0 | - |
| **Almannamál annars** | 163 | 64 | 39,3 |
| **Til samans** | **2.297** | **841** | **36,6%** |

*Kelda: Hagstova Føroya, landsroknskapurin fyri 2007 og egnar útrokningar.*

Samlaðu almannaútreiðslurnar í Føroyum, bólkaðar eftir hesum leisti, vóru 2.297 mió.kr. í 2007.

Niðanfyri er víst ein uppgerð, sum sýnir hvussu nógv ávikavist Føroyar, Danmark og Ísland hava brúkt upp á almannaútreiðslur í árunum 2003 til 2007 sammett við tøku brutto-tjóðarinntøkuna.

***Mynd 9: Gongdin í nýtsluni til almannaútreiðslur gjørdar upp sambært COFOG í mun til tøku bruttotjóðarinntøkuna fyri árini 2003 til 2007***




*Kelda: Hagstova Føroya, Danmarks Statistik og Statice Iceland. Tølini fyri 2008 í Føroyum eru ikki tøk enn.*

Av myndini sæst, at Danmark brúkar lutfalsliga nógv størri part av teirra tøku brutto-tjóðarinntøku til almannaútreiðslur enn bæði Føroyar og Ísland. Í 2007 brúkti Danmark 22,3% av tBTI til almannaútreiðslur, meðan Føroyar og Ísland brúktu ávikavist 16,8% og 11%

Sum áður nevnt er tað bara útreiðslurnar hjá landskassanum, kommununum og almennum grunnum, sum eru tiknar við í hesi útreiðslutøl. Tølini siga sostatt bara nakað um, hvussu stóran part av tBTI tað almenna í londunum brúkar upp á almannaútreiðslur.

Verða útreiðslurnar til sosiala trygd bólkaðar eftir ESSPROS[8] bólkingar skipanini, fæst eitt øðrvísi lutfall enn tað, sum er víst omanfyri. Í ESSPROS verða allar veitingar, sum móttakarin ikki rindar fult fyri, tiknar við, óansæð hvussu tær eru fíggjaðar. Umframt landskassan, kommunukassar og almennar grunnar kann verða talan um t.d. arbeiðsgevarafíggjað gjøld og tryggingargjøld. ESSPROS fevnir sostatt um fleiri veitingar enn COFOG uppgerðin.

[8] European system of integrated social protection statistics

***Talva 8: Lutfallið millum sosialar útreiðslur uppgjørdar eftir ESSPROS í mun til BTÚ í 2007***

| Í % av BTÚ | Danmark | Føroyar | Ísland |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur til sosiala trygd | 28,7 | 24,1 | 21,5 |

*Kelda: Social tryghed i de nordiske lande 2007/08*

Hóast ymsu uppgerðarhættirnar er myndin tó tann sama, nevniliga at Danmark brúkar lutfalsliga meiri upp á sosiala trygd enn bæði Føroyar og Ísland.

Við at samanhalda talvu 8 við mynd 9 sæst, at í Íslandi er størri partur av sosialu veitingunum fíggjaðar av øðrum enn landskassanum og almennum grunnum.

### 3.2.2 Almannaútreiðslur í mun til tal av íbúgvum

Niðanfyri er gongdin í sosialum útreiðslum pr. íbúgva í Føroyum, Danmark og Íslandi fyri tíðarskeiðið 2003 til 2007 víst.

***Mynd 10: Gongdin í almannaútreiðslunum í leypandi krónum sambært COFOG í mun til fólkatalið fyri árini 2003 til 2007***




*Kelda: Hagstova Føroya, Danmarks Statistik og Statice Iceland. Tølini fyri 2008 í Føroyum eru ikki tøk enn.*

Sum tað sæst hækka sosialu útreiðslurnar í leypandi krónum í Føroyum nakað meiri enn í Danmark, meðan tølini í Íslandi sýna eina nógv hægri øking. Her skal tó havast í huga, at útgangsstøðið í Íslandi er væl lægri enn í Føroyum og Danmark og at ymiskleiki í m.a. inflatiónini í londunum kann vera ein frágreiðing upp á stóra munin.

Av tí at fíggingarmynstrið í Íslandi er heilt øðrvísi enn í Føroyum og Danmark fevnir samanberingin niðanfyri av útreiðslunum pr. íbúgva einans um Føroyar og Danmark.

***Talva 9: Almannaútreiðslurnar sambært COFOG pr. íbúgva fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Føroyar** | 40.206 | 42.982 | 44.775 | 45.468 | 47.526 | -[9] |
| **Danmark** | 62.679 | 64.996 | 66.198 | 67.420 | 68.236 | 70.784 |
| **Munur** | **22.473** | **22.014** | **21.423** | **21.952** | **20.710** | **-** |

*Kelda: Hagstova Føroya, Danmarks Statistik.*

Talvan vísir, at útreiðslurnar pr. íbúgva í Danmark eru væl hægri enn í Føroyum, og at munurin hevur verið rímiliga støðugur í tíðarskeiðinum. Uppgjørda útreiðslan fevnir bæði um veitingar og tænastur til tann einstaka.

Sum víst á omanfyri í petti 3.2 er ongin umrokningarfaktorur uppgjørdur í Føroyum. Sostatt er ikki møguligt at gera upp hvussu nógv keypiorka fæst fyri 47.526 kr. í Føroyum í mun til upphæddina upp á 68.236 kr., sum verður goldin pr. íbúgva í Danmark. M.a. skal havast í huga, at tað er ymiskt hvussu móttakarar av veitingum verða skattaðir í Føroyum og Danmark. Hóast umrokningarfaktorurin ikki er gjørdur upp í Føroyum, er tað tó lítið at ivast í, at útreiðslan í Danmark pr. íbúgva gevur eina størri keypiorku enn útreiðslan pr. íbúgva í Føroyum.

Munurin upp á 20.710 kr. í 2007 kann greinast soleiðis upp á høvuðsbólkar:

***Talva 10: Almannaútreiðslurnar pr. íbúgva í Føroyum og Danmark sambært COFOG í 2007 býtt á øki***

| tkr. | Føroyar | Danmark | Munur |
|---|---|---|---|
| **Sjúka og avlamni** | 10.736 | 16.394 | 5.658 |
| **Ellistænastur og -veitingar** | 19.097 | 21.258 | 2.160 |
| **Familja og børn** | 10.161 | 15.346 | 5.185 |
| **Arbeiðsloysi** | 1.477 | 8.035 | 6.557 |
| **Býlisstuðul** | 2.606 | 2.050 | -556 |
| **Almannamál annars** | 3.447 | 3.377 | 10 |
| **Til samans** | **47.526** | **68.236** | **20.710** |

*Kelda: Hagstova Føroya, Danmarks Statistik.*

[9] Føroysku COFOG-tølini fyri 2008 fyriliggja ikki enn

Av talvuni omanfyri sæst, at danski statskassin á øllum økjum uttan viðvíkjandi býlisstuðli hevur ein hægri kostnað pr. íbúgva enn føroyski landskassin. Sum nevnt omanfyri innihalda COFOG-tølini ikki útreiðslur, sum eru fíggjaðar av øðrum enn landskassanum.

Býlisstuðulin í Føroyum fevnir um rentustuðul. Tølini fyri býlisstuðul eru ikki samanberilig við Danmark. Í Danmark verður ikki givin rentustuðul, men rentuútreiðslur í sambandi við bústaðarlán kunnu dragast frá í skattskyldugu inntøkuni. Hesin frádráttur verður ikki tikin við í COFOG-tølunum í Danmark.

### 3.2.3 Tal av fyritíðarpensjónistum

Niðanfyri eru víst tøl, sum sýna, hvussu nógvir persónar í aldrinum millum 18 og 64 ár fáa fyritíðarpensjón í mun til samlað tal av fólki í sama aldri.

***Mynd 11: Persónar millum 18-64 ár, sum fáa fyritíðarpensjón í % av øllum í sama aldri***




*Kelda: Social tryghed i de nordiske lande 2006/07*

Av talvuni sæst, at talið av fyritíðarpensjónistum í % av fólkum í sama aldri hevur verið støðugt í øllum londunum í tíðarskeiðinum fyri 2003 til 2007. Í Føroyum hevur lutfallið ligið millum 4,2% og 4,6%, í Danmark millum 5,0% og 5,6% og í Íslandi millum 6,5% og 6,9%.

Sostatt kann staðfestast, at talið av fyritíðarpensjónistum í Føroyum er lægri enn í Danmark og í Íslandi. Nevnast kann, at í Noregi og Svøríki var lutfallið í 2007 upp á 10,2%, meðan tað í Finnlandi var 7,8%.

Ein greining av mununum krevur eina nærri kanning. Ein orsøk til munirnar kann vera, at reglurnar viðvíkjandi fyritíðarpensjónistum eru ymiskar frá einum landi til annað.

### 3.2.4 Fólk á heimum

Niðanfyri eru víst tøl, sum sýna talið av fólkum, sum búgva á "institution eller i servicebolig" í lutfalli av samlaða talinum av fólki í sama aldri.

***Mynd 12: Persónar upp á 65 ár og eldri, sum búgva á "institution eller i servicebolig" í % av øllum í sama aldri:***




*Kelda: Social tryghed i de nordiske lande 2006/07, 2005, 2004 og 2003.*

Sum tað sæst eru tølini fyri Føroyar hækkað meiri í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2007 enn í Danmark og Íslandi, og hongur hetta saman við, at vit í Føroyum í hesum tíðarskeiðinum hava fingið fleiri nýggj røktarheimspláss umframt nøkur nýggj pláss á eldrasambýlum.

Sambært frágreiðingini um "Social Tryghed i de nordiske lande" fyri 2006/07 er talið av fólkum í Danmark á "institution eller i servicebolig" í lutfalli av fólkum í sama aldri lægri enn í hinum norðurlendsku londunum.

Verður hugt at frágreiðingunum fyri eldri ár frá Nososco sæst, at lutfallið í Danmark seinastu árini hevur ligið á góðum 8%, meðan talið í frágreiðingini fyri 2006/07 er lækkað til 5,2%. Ein av orsøkunum til lækkingina er at "beskyttede boliger" ikki longur verða tiknar við í hagtølini. Í tølunum í talvuni omanfyri eru hagtølini fyri eldru árini rættað samsvarandi nýggju uppgerðini.

Við samanberingini millum lond skal havast í huga, at í Føroyum eru einastu tilboðini til eldri fólk røktarheim og eldrasambýli, meðan t.d. Danmark hevur onnur bútilboð til hendan aldursbólkin.

### 3.2.5 Fólk, sum fáa heimahjálp

Av myndini niðanfyri sæst hvussu nógv fólk fáa heimahjálp í % av fólkum í sama aldri.

***Mynd 13: Persónar upp á 65 ár og eldri, sum fáa heimahjálp í % av øllum í sama aldri***




*Kelda: Social tryghed i de nordiske lande 2006/07, 2005, 2004 og 2003.*

Sum tað sæst er talið av fólki, sum fáa heimahjálp í Føroyum í % av fólkum í sama aldri væl lægri enn í bæði Danmark og Íslandi.

Tað skal tó viðmerkjast, at meðan uppgerðirnar fyri Føroyar og Danmark eru statusuppgerðir, so inniheldur íslendska uppgerðin eitt yvirlit yvir, hvussu nógv fingu heimahjálp ígjøgnum árið.

### 3.2.6 Tal av fólkum undir 65 ár, sum búgva á heimum

Niðanfyri er víst ein mynd, sum vísir hvussu nógv fólk undir 65 ár búgva á "institution eller servicebolig" í ávikavist Føroyum, Danmark og Íslandi.

***Mynd 14: Persónar undir 65 ár, sum búgva á "institution eller i servicebolig" í % av øllum í sama aldri***




*Kelda: Social tryghed i de nordiske lande 2006/07, 2005, 2004 og 2003.*

Av myndini sæst, at í øllum trimum londum hevur talið av fólki á "institution og servicebolig" ligið millum 0,4% og 0,5% av fólkum í sama aldri í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2007.

### 3.2.7 Samanbering av samlaðum útreiðslum og inntøkum hjá landi og kommunum í Føroyum og Danmark

Í talvuni niðanfyri framganga samlaðu útreiðslurnar og útreiðslurnar pr. íbúgva í Føroyum og Danmark fyri 2007, bólkaðar eftir COFOG. Harafturat framganga samlaðu skatta- og avgjaldsinntøkurnar.

Sum nevnt omanfyri fevna COFOG-útreiðslurnar um samlaðu útreiðslurnar hjá land og kommunum umframt um útreiðslur hjá almennum grunnum.

***Talva 11: Samlaðar útreiðslur og útreiðslur pr. íbúgva í 2007, bólkaðar eftir COFOG, í Føroyum og Danmark umframt samlaðu skatta- og avgjaldsinntøkurnar***

| | Samlaðar útreiðslur (mió.kr.) | | Útreiðslur pr. íbúgva (kr.) | |
|---|---|---|---|---|
| | Føroyar | Danmark | Føroyar | Danmark |
| Aðalfyrisiting | 597 | 116.350 | 12.353 | 21.362 |
| Verja | | 28.036 | - | 5.147 |
| Rættarmál | 144 | 17.172 | 2.980 | 3.153 |
| Vinnumál | 988 | 48.652 | 20.444 | 8.932 |
| Umhvørvisvernd | 112 | 8.881 | 2.318 | 1.631 |
| Íbúð og umhvørvi | 125 | 9.380 | 2.587 | 1.722 |
| Heilsumál | 904 | 125.098 | 18.706 | 22.968 |
| Mentamál | 183 | 26.442 | 3.787 | 4.855 |
| Undirvísingarmál | 1.113 | 111.959 | 23.031 | 20.555 |
| Almannamál | 2.297 | 371.659 | 47.530 | 68.236 |
| Ikki flokkað, rentuútreiðslur | 133 | | 2.752 | - |
| **Útreiðslur til samans** | **6.596** | **863.629** | **136.487** | **158.561** |
| **Skatta- og avgjaldsinntøkur** | **5.784** | **831.121** | **119.685** | **152.593** |

*Kelda: Hagstova Føroya og Danmarks Statistik*

Í tølunum omanfyri er heildarveitingin frá Danmark ikki tikin við. Heildarveitingin var í 2007 upp á 632 mió.kr.

Samlaðu COFOG-útreiðslurnar í 2007 vóru umleið 16% størri í Danmark enn í Føroyum pr. íbúgva, meðan skatta- og avgjaldsinntøkurnar vóru umleið 27% størri pr. íbúgva. Nevnast kann, at í 2007 var bruttotjóðarúrtøkan í Danmark 21% størri enn bruttotjóðarúrtøkan í Føroyum pr. íbúgva.

Tað er serliga á almannaøkinum og í aðalfyrisitingini í breiðum høpi, at nýtslan í Danmark er væl størri enn í Føroyum pr. íbúgva. Á báðum økjum er tó galdandi, at munurin pr. íbúgva er minkaður nakað í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2007.

Hinvegin brúka vit í Føroyum munandi meira til vinnumál pr. íbúgva enn gjørt verður í Danmark, og hevur munurin á hesum øki verður støðugur seinastu árini. Á hesum øki er tað serliga útreiðslan til námsvirki, ídnað og bygging, sum er munandi hægri pr. íbúgva í Føroyum enn í Danmark.

Av øðrum stórum málsøkjum kann nevnast, at Danmark nýtir meira enn Føroyar pr. íbúgva á heilsuøkinum, meðan Føroyar í 2008 brúkar meira enn Danmark á undirvísingarøkinum pr. íbúgva. Her skal viðmerkjast, at til 2006 at rokna brúkti Danmark meiri pr. íbúgva á undirvísingarøkinum enn Føroyar.

Í skjali 4 og 5 er gjørd ein útgreinað samanbering av COFOG-tølunum í Føroyum og Danmark.

Í mynd 15 niðanfyri er lutfalsliga býtið av útreiðslunum hjá landi, kommunum og almennum grunnum í 2007 í Føroyum og Danmark víst.

***Mynd 15: Lutfalsliga býtið av útreiðslunum hjá landi og kommunum í 2007 í Føroyum og Danmark***




*Kelda: Hagstova Føroya og Danmarks Statistik*

Sum sæst nýta land og kommunur í Føroyum og Danmark ávikavist 35% og 43% av samlaðu útreiðslunum til almannamál og er hetta sostatt nógv størsta einstaka økið í báðum londum.

Næststørsta økið í Føroyum er undirvísingarmál, har Føroyar í 2007 nýttu 17% av útreiðslunum, meðan Danmark nýtti 13%.

Størsti munurin millum londini viðvíkir vinnumálum, har Føroyar nýttu 15% av útreiðslunum, meðan Danmark nýtti knapt 6%.

### 3.2.8 Samandráttur

Samanumtikið kann sigast, at almannaútreiðslurnar eru størsti einstaki útreiðslubólkur í mun til samlaðu útreiðslurnar hjá landi og kommunum, bæði í Føroyum og Danmark.

Harafturat kann sigast, at føroyski landskassin brúkar minni enn danski statskassin upp á almannaútreiðslur, bæði í mun til tøka bruttotjóðarinntøku og pr. íbúgva.

Minni-nýtslan á almannaøkinum fevnir um stórt sæð allar útreiðslubólkar. Av samlaðu útreiðslunum til almannamál, bólkaðar eftir COFOG-leistinum, upp á 2.297 mió.kr. í 2007 fevnir játtanargreiningin um 841 mió.kr. Hóast játtanargreiningin sostatt einans fevnir um áleið 37% av samlaðu útreiðslunum, so stuðla fyriliggjandi hagtøl upp undir niðurstøðuna um, at vit í Føroyum brúka minni til almannaútreiðslur enn í Danmark.

Fyriliggjandi hagtøl vísa, at talið av fyritíðarpensjónistum í Føroyum er lægri enn bæði í Danmark og í Íslandi eins og munandi færri fáa heimahjálp í Føroyum enn í nevndu londum. Hinvegin er talið av fólki á røktarheimum og eldrasambýlum hægri í Føroyum enn í Danmark og í Íslandi, men her skal havast í huga, at í øllum førum í Danmark eru langt fleiri bútilboð til eldri fólk enn í Føroyum.

Tølini fyri Ísland eru torfør at samanbera við tølini fyri Føroyar og Danmark, tí fíggingarmynstrið av almannaútreiðslunum í Íslandi er heilt øðrvísi, tí har verður stórur partur av útreiðslunum fíggjaður av øðrum enn landskassanum. Hinvegin eru greiðar ábendingar um, at í Íslandi verður í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 brúkt lutfalsliga minni til sosiala trygd enn í Føroyum og í Danmark.

# 4 Nýtsla av játtanum

Endamálið við greiningini í hesum parti er at lýsa, hvussu játtanin á útvaldum høvuðskontum fyri árini 2003 til 2008 hevur verið nýtt (hagtøl), og hvør orsøkin til útreiðsluvøksturin hesi árini hevur verið.

Niðanfyri er víst eitt yvirlit yvir hvør varðar av ymsu høvuðskontunum, sum eru fevndar av játtanargreiningini.

***Mynd 16: Yvirlit yvir hvør varðar av ymsu kannaðu høvuðskontunum við tilskilan av rakstrarupphædd fyri 2008***

| Almannamálaráðið | | | |
|---|---|---|---|
| **Almannastovan** | | **Nærverkið** | |
| ***Rakstrarjáttan Almannastovan*** | 40.237 | ***Rakstrarjáttan Meginskrivstovan*** | 6.849 |
| ***Børn og ung (petti 4.1)*** | | ***Serforsorg (petti 4.2)*** | |
| **Føroya Barnaheim** | 8.663 | Trivnaðartænastan | 92.218 |
| **Rókin** | 3.209 | Stovnsuppihald o.a. í Danmark | 20.036 |
| **Slóðin** | 4.605 | Endurgj. av pens. til føroyingar í Danmark | 1.200 |
| **Reiðrið** | 2.431 | Ferðaútreiðslur v.m. | 49 |
| **Familjuhúsið** | 2.405 | Deildin fyri sinnisveik | 20.207 |
| **Stuðlar til børn** | 21.794 | Heim fyri heilaskadd | 3.787 |
| **Til samans** | **43.107** | **Til samans** | **137.497** |
| ***Ansingarsamsýning (petti 4.4)*** | | ***Eldrarøkt (petti 4.3)*** | |
| **Ansingarsamsýning** | **13.943** | Røktarheim | 186.818 |
| | | Eldrarøkt í Sandoynni | 12.128 |
| ***Vanlig forsorg (petti 4.6)*** | | Heimatænastan | 114.884 |
| **Meirútreiðslur brekað barn § 17** | 28.333 | Økisterapi | 1.475 |
| **Endurbúgving § 18** | 40.462 | **Til samans** | **315.305** |
| **Hjálparamboð v.m. § 18** | 51.453 | | |
| **Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16** | 3.306 | | |
| **Til samans** | **123.554** | ***Stuðulstænastan (petti 4.5)*** | |
| | | Stuðulstænasta fyri vaksin | 21.753 |
| ***Fyritíðarpensjón (petti 4.7)*** | | | |
| **Hægsta fyritíðarpensjón** | 97.913 | | |
| **Miðal fyritíðarpensjón** | 95.322 | | |
| **Lægsta fyritíðarpensjón** | 41.091 | | |
| **Avlamisveiting** | 2.620 | | |
| **Læknaváttanir** | 874 | | |
| **Til samans** | **237.820** | | |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri 2008 og Almannamálaráðið*

Tað skal viðmerkjast, at høvuðskontan Børn og ung frá 1. september 2009 at rokna er løgd undir Nærverkið at umsita. Sostatt umsitur Almannastovan í dag tær lógarbundnu almannaútreiðslurnar, meðan Nærverkið umsitur rakstrarjáttanirnar.

Gongdin fyri árini 2003 til 2008 í nevndu høvuðskontunum framganga av myndini niðanfyri[10]:

***Mynd 17: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í teimum høvuðskontum, sum eru fevndar av játtanargreiningini***




*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Rakstrarútreiðslurnar, sum eru fevndar av játtanargreiningini, eru øktar úr 673 mió.kr. í 2003 til 940 mió.kr. í 2008 svarandi til ein øking upp á 40% í tíðarskeiðinum.

Sæð í mun til netto landskassaútreiðslurnar er talan um eina øking frá 21,1% í 2003 til 22,1% í 2008.

[10] Á høvuðskontuni "Vanlig forsorg" eru bert undirkonto 04, 05, 06 og 08 tiknar við í rakstrarkostnaðin

Niðanfyri er hvør høvuðskonta greinað fyri seg á tann hátt, at fyri árini 2003 til 2008 verður fyrst gjørd ein lýsing av gongdini í útreiðslunum á øllum undirkontum, sum eru knýttar at høvuðskontuni, umframt at gongdin í tilhoyrandi "framleiðslutølum" er víst í teimum førum, har framleiðslutøl fyriliggja.

Í tann mun tað letur seg gera verður síðani greitt frá, hvussu stórur partur av útreiðsluvøkstrinum skyldast almennu lønar- og prísgongdini í samfelagnum, og hvussu nógv skyldast broyting í virkseminum.

Útroknaða lønarhækkingin tekur støði í sáttmálasettu lønarhækkingunum. Tað skal viðmerkjast, at talan er um miðal lønarhækkingina fyri almennu lønirnar, sum ikki neyðturviliga svarar til veruligu hækkingarnar á einstøku stovnunum, ið verða gjøgnumgingin, m.a. grundað á ymisleika í samansetingini av starvsfólkum.

Útroknaði prísvøksturin tekur støði í almenna prístalinum.

## 4.1 Børn og ung

Undir høvuðskontuni Børn og ung eru dag- og samdøgursstovnarnir á barna- og ungdómsøkinum savnaðir umframt tann parturin av rakstrinum av stuðulsskipanini til børn, sum landskassin fíggjar. Kommunurnar hava síðani 2006 borið kostnaðin av stuðlunum, sum arbeiða á dagstovnum og innan dagrøktina.

Dag- og samdøgursstovnarnir, sum hava verið virknir í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 eru:

- Føroya Barnaheim, ein samdøgursstovnur fyri børn og ung umframt ein familjudeild
- Rókin, ein samdøgursstovnur fyri børn í aldrinum 7 til 13 ár
- Slóðin, ein samdøgursstovnur fyri børn í aldrinum 13 til 18 ár
- Reiðrið, ein dagstovnur fyri fjølbrekað børn umframt umlætting
- Familjuhúsið, ein dagviðgerðarstovnur við møguleika fyri vikuskiftisumlætting og ein ráðgevingar- og viðgerðarstovnur

Niðanfyri er raksturin fyri ymsu dag- og samdøgursstovnarnar umframt stuðulsskipanina fyri børn vístur.

***Talva 12: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í høvuðskontuni Børn og ung***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroya Barnaheim | 7.447 | 8.349 | 8.191 | 7.222 | 7.943 | 8.663 |
| Rókin | 3.705 | 3.495 | 3.527 | 2.943 | 3.159 | 3.209 |
| Slóðin | 1.760 | 2.554 | 3.503 | 3.241 | 4.015 | 4.605 |
| Reiðrið | 329 | 0 | 1.386 | 2.050 | 2.342 | 2.431 |
| Familjuhúsið | 0 | 0 | 610 | 2.258 | 1.986 | 2.405 |
| Stuðlar til børn | 21.739 | 25.861 | 29.137 | 19.181 | 19.935 | 21.794 |
| **Til samans** | **34.980** | **40.259** | **46.354** | **36.895** | **39.380** | **43.107** |
| **Til samans uttan stuðlar til børn** | **13.241** | **14.398** | **17.217** | **17.714** | **19.445** | **21.313** |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Raksturin á høvuðskontuni Børn og ung er til samans hækkaður úr 35 mió.kr. í 2003 til 43 mió.kr. í 2008. Sum nevnt omanfyri skal tó havast í huga, at í 2006 varð ein partur av kostnaðinum av at reka stuðulsskipanina fyri børn lagdur út á kommunurnar, og tískil er veruliga økingin í tíðarskeiðinum væl hægri.

Upplýst er, at hagtalsgrundarlagið á høvuðskontuni Børn og ung er avmarkað, og tískil er torført at gera eina lýsing av gongdini í virkseminum á økinum.

Fyri at kunna samanbera gongdina í tølunum á høvuðskontuni Børn og ung fyri tíðarskeiðið er gjørd ein samanteljing av útreiðslunum, har útreiðslan til Stuðlar til børn er hildin uttanfyri, sí niðast í talvu 12 omanfyri. Verður hugt at hesum tølum sæst, at kostnaðarøkingin í tíðarskeiðinum frá dag- og bútilboðum hevur verið upp á 8,1 mió.kr. Av hesum stava:

- áleið 2 mió.kr. frá lønar- og prísvøkstri og
- áleið 5 mió.kr. frá øktum virksemi frá 2 nýggjum stovnum

Við tað at ongi skipað hagtøl eru yvir tal av børnum á ymsu stovnunum ber ikki til at siga nakað um gongdina í eindarprísinum.

Viðvíkjandi Stuðlum til børn er at siga, at útreiðslan hækkaði munandi frá 2003 til 2005, meðan árligi vøksturin, síðani ein partur av stuðulsskipanini varð lagdur til kommunurnar at umsita, hevur verið væl lægri.

Økið Børn og ung er í løtuni undir umskipan og varð pr. 1. september 2009 flutt frá Almannastovuni til Nærverkið at umsita og samskipa. Játtanin til samdøgursstovnarnar Rókin og Slóðin er samlað undir eini nýggjari játtan Stovnstilboð til børn og ung, umframt at ein partur av virkseminum hjá Føroya Barnaheimi er umskipað.

### 4.1.1 Dag- og samdøgursstovnar

Sum nevnt finnast ongi skipað hagtøl yvir tal av børnum á ymsu stovnunum, men sambært einum skjali, sum Almannamálaráðið hevur lagt fyri fíggjarnevndina upp á fyrispurning um talið av børnum á ymsu stovnunum, sæst, at í 2008 hevur talið av børnum á fleiri av bústovnunum verið væl undir talinum av búplássum.

Ein samskipan av ymsu tilboðunum á dag- og samdøgursstovnunum tykist tískil væl grundað fíggjarliga. Í hvønn mun ein samskipan er fakliga ráðilig ella væl grundað hevur ikki verið ein partur av greiningini.

### 4.1.2 Stuðlar til børn

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn hevur til uppgávu at veita stuðulsfólk til børn undir 18 ár, sum tørva stuðulsfólk vegna virkistarn, umlættingartørv hjá foreldrum, v.m. orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndari sjúku.

Skipanin virkar í eindum, sum halda til í hølum, ið skipanin hevur kring alt landið, umframt í heiminum hjá tí einstaka barninum við serligum tørvi.

Sum nevnt omanfyri varð stuðulsfólkaskipanini í 2006 broytt, soleiðis at tann parturin av stuðulsfólkaskipanini, ið fevnir um børn, sum ganga í skúla og í kommunalum ansingarstovnum, varð lagdur út til kommunurnar at reka. Veruligi vøksturin á hesum øki er tí hægri enn tølini í talvu 12 omanfyri sýna.

Fyri økið Stuðlar til børn er eins og fyri dag- og samdøgursstovnar galdandi, at ongar skipaðar skrásetingar finnast, ið neyvt lýsa virksemið á økinum. Millum annað finnast ongar skipaðar skrásetingar yvir tal av børnum, sum móttaka stuðul ella hvussu nógvar tímar hvørt einstakt barn fær stuðul, t.d. pr. viku. Tað skal tó viðmerkjast, at tað finnast manuelt upptaldar skrásetingar á Almannastovuni um økið.

### 4.1.3 Samandráttur

Økið Børn og ung kann býtast upp í tvinnanda øki: dag- og samdøgursstovnar og stuðlar til børn.

Raksturin av dag- og samdøgursstovnunum er øktur við áleið 8 mió.kr., harav áleið 2 mió.kr. skyldast lønar- og prísvøkstri og 5 mió.kr. skyldast upprættan av 2 nýggjum stovnum. Vegna vantandi skráseting av hagtølum er ikki møguligt at siga nakað um gongdina í talinum av brúkarum og eindarprísum.

Rakstrarútreiðslurnar hjá landskassanum til Stuðlar til børn eru nærum óbroyttar frá 2003 til 2008, men her skal havast í huga, at ein partur av stuðulsskipanini varð lagdur út til kommunurnar í 2006, og tí eru samlaðu rakstrarútreiðslurnar á økinum hækkaðar.

Við støði í eini tørvslýsing verður mælt til, at stig verða tikin til at fáa eina skipaða skráseting av hagtølum á dag- og samdøgursstovnunum umframt av virkseminum víkjandi stuðlum.

## 4.2 Serforsorg

Serforsorgin fevnir um dagstovnar, sambýli, bústovnar, umlættingarstovnar, verk- og virknishús.

Gongdin í rakstrarútreiðslunum í tíðarskeiðinum hevur verið hendan:

***Talva 13: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstrarútreiðslunum til serforsorg***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Trivnaðartænastan | 71.556 | 73.598 | 77.891 | 79.571 | 84.678 | 92.218 |
| Stovnsuppihald o.a. í Danmark | 20.096 | 17.315 | 18.831 | 19.812 | 20.102 | 20.036 |
| Endurgj. av pens. til føroyingar í Danmark | 1.237 | 982 | 1.012 | 610 | 1.094 | 1.200 |
| Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi | 44 | 79 | 48 | 81 | 48 | 29 |
| Viðbót til uttanhýsis viðskiftafólk | 198 | 148 | 102 | 64 | 48 | 20 |
| Deildin fyri sinnisveik | 7.834 | 10.546 | 13.450 | 15.941 | 19.206 | 20.207 |
| Heim fyri heilaskadd | | 2.776 | 3.528 | 3.885 | 3.648 | 3.787 |
| **Til samans** | **100.965** | **105.444** | **114.862** | **119.964** | **128.824** | **137.497** |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Samlaða útreiðsluøkingin fyri økið sum heild er slakar 37 mió.kr. fyri tíðarskeiðið, harav áleið 20 mió.kr. stava frá lønar- og prísvøkstri.

Verandi skráseting av virkseminum undir Serforsorgini, tað verði seg tal av brúkarum á verkstøðum, dagtilhaldum v.m. ella tal av búfólkum á sambýlum/bústovnum, er ikki fullfíggjað. Tað er serliga fyri árini 2003 og 2004, at upplýsingar mangla, og tískil er trupult at greina neyvt, hvussu nógv av restini av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum stavar frá øktum virksemi.

Við verandi skrásetingum fæst tó ein ábending um, at áleið 12 mió.kr. stava frá øktum virksemi á hesum økjum:

- 4 nýggj pláss á heiminum fyri heilaskadd,
- 15-16 nýggj pláss á deildini fyri sinnisveik og
- ein ávís øking av virkseminum undir Trivnaðartænastuni

Restupphæddin, áleið 5 mió.kr., kann skyldast, at eindarprísurin í føstum prísum er broyttur og/ella at virksemið er økt meiri enn mett omanfyri.

Sum nærri er greitt frá niðanfyri eru umleið 120 búpláss á bústovnum og sambýlum undir Trivnaðartænastuni. Tørvurin á plássum er væl hægri enn hetta, tí sambært dagførdum yvirliti pr. 20. juli 2009 standa umleið 30 fólk á bíðilista til bústovn.

Niðanfyri er greitt nærri frá einstøku økjunum.

### 4.2.1 Trivnaðartænastan

Trivnaðartænastan rekur og hevur eftirlit við stovnum, sum hava tilboð til persónar við serligum tørvi. Talan er bæði um landsstovnar og um sjálvsognarstovnar. Tilboðini hjá Trivnaðartænastuni umfata:

- sambýli og bústovnar
- verkstøð og virkishús
- umlættingarstovnar

***Bústaðartilboð***

Búfólkini á sambýlunum og stovnunum undir Trivnaðartænastuni eru í høvuðsheitum fólk, sum eru menningartarnað. Ein minni bólkur eru fólk við autismu ella asperger-syndromi og øðrum atferðartrupulleikum. Afturat nevndu brekum eru fleiri búfólk, sum eisini hava likamlig brek.

*Sambýli*

Búfólk í sambýlum eru persónar, ið hava ein serligan tørv í so stóran mun, at teir hava brúk fyri starvsfólki til at stuðla og hjálpa sær í dagligu tilveruni. Tey ymisku sambýlini eru skipað í eindir, ið natúrliga hoyra saman ella eru samskipað við aðrar stovnar á økinum.

*Bústovnar*

Búfólk á bústovnum eru persónar, ið hava víttfevnandi sálarlig ella likamlig brek.

***Virknistilboð***

Verkstaðir og virknishús bjóða vard størv og mennandi tiltøk til persónar, sum hava ein serligan tørv. Verkstaðir leggja seg eftir at hava framleiðslurættað tilboð, meðan virknishús hava stimbrandi ítriv, sum eru málrættað til fólk, sum hava menningartarn.

***Umlættingartilboð***

*Døgnumlætting*

Umlættingarheim eru samdøgursstovnar, har fólk við menningartarni kunnu koma til umlætting. Talan er um bæði børn, ung, vaksin og eldri. Tað er ymiskt, hvussu leingi fólk eru til umlætting í senn. Umlættingin er ætlað heimabúgvandi.

*Umlætting til fólk við autismu*

Umlættingin til fólk við autismu er ein samdøgursstovnur fyri heimabúgvandi børn og ung við autismu. Talan er um umlætting í vikuskiftinum.

Samlaði kostnaðurin av at reka Trivnaðartænastuna er hækkaður úr 71,6 mió.kr. í 2003 til 92,2 mió.kr. í 2008. Býtt sundur á virkisøkini hjá Trivnaðartænastuni hevur gongdin í útreiðslunum verið hendan:

***Talva 14: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstarútreiðslunum til Trivnaðartænastuna***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Verkstøð og dagtilhald** | 13.025 | 14.159 | 15.150 | 15.735 | 16.316 | 17.749 |
| **Bústovnar** | 26.924 | 27.745 | 29.141 | 29.499 | 31.008 | 33.062 |
| **Sambýli** | 21.888 | 22.454 | 24.025 | 23.918 | 25.942 | 27.582 |
| **Umlætting** | 7.306 | 8.273 | 8.987 | 9.336 | 9.473 | 10.306 |
| **Felags útreiðslur** | 2.413 | 968 | 587 | 1.085 | 1.940 | 3.519 |
| **Til samans** | **71.556** | **73.599** | **77.890** | **79.573** | **84.679** | **92.218** |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Virksemið hjá Trivnaðartænastuni í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 hevur verið rættiliga støðugt, tó so at nøkur nýggj dagtilboð eru komin, Sambýlið á Eirargarði er opnað umframt at smærri broytingar eru hendar á ávísum stovnum í tíðarskeiðinum.

Í løtuni er tal av stovnum og brúkarum hesi (sambært framløgu hjá Nærverkinum í mars 2009):

- 9 verkstøð/verkhús 141 pláss
- 19 bústovnar/sambýlir 120 pláss
- 3 umlættingarstovnar 13 pláss
- 2 bráðfeingis skipanir 3 pláss

Av samlaða útreiðsluvøkstrinum upp á 20,6 mió.kr. í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 skyldast áleið 13,1 mió.kr. lønar- og prísvøkstri, meðan restin í stóran mun stavar frá eini øking í eindarkostnaðinum og bert í minni mun frá eini øking í virkseminum.

Eindarprísurin er serliga hækkaður í 2008, tá ið Nærverkið eftir at hava søkt í fleiri ár, fekk eina størri játtan til økið. Grundgevingin fyri at økja játtanina var, at fleiri brúkarar í tíðarskeiðinum eru vorðnir meiri røktarkrevjandi, og í 2008 vóru 1,7 mió.kr. játtaðar í hesum sambandi. Í fíggjarlógini fyri 2009 er játtanin til økið hinvegin minkað aftur við 2,3 mió.kr.

Brúkararnir á stovnunum undir Trivnaðartænastuni eru sera ymiskir í røktartyngd og sæst hetta aftur í, at dagsprísurin[11] á ymsu heimunum spennir frá áleið 900 kr. til 3.300 kr.

[11] Dagsprísur: prísurin pr. dag pr. brúkara

Upplýst er, at játtanirnar til einstøku stovnarnar í stóran mun eru framskrivingar av játtanunum frá árunum frammanundan. Upprunaliga er gjørd ein meting av normeringini av stovnunum, og hevur hendan síðani í langt flestu førum verið varðveitt óbroytt gjøgnum árini, hetta uttan mun til um brúkararnir eru vorðnir tyngri ella lættari.

Umframt at búfólkini eru ymisk í røktartyngd og harvið hava ymiskan dagsprís er samlaði kostnaðurin fyri landskassan ávirkaður av um tey búgva á einum sambýli ella á einum bústovni. M.a. varðveita búfólk á sambýlum rættin til pensjón, meðan búfólk á bústovnum missa henda rætt, men fáa ístaðin lummapening útgoldnan hvønn mánað.

### 4.2.2 Stovnsuppihald o.a. í Danmark

Av hesi konto verður goldið fyri útreiðslur fyri føroyingar á stovni í Danmark.

***Talva 15: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstarútreiðslunum til Stovnsuppihald o.a. í Danmark***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Stovnsuppihald o.a. í Danmark | 20.096 | 17.315 | 18.831 | 19.812 | 20.102 | 20.036 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Talan er um stovnspláss, sum stava frá tíðini, tá ið menningartarnað vórðu send av landinum á stovn í Danmark.

Talið av føroyingum á stovni í Danmark er lækkað frá 29 fólkum í 2003 til 25 fólk í 2008, sí talvu niðanfyri.

***Talva 16: Tal av føroyingum á stovni í Danmark***

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av føroyingum á stovni í Danmark | 29 | 28 | 27 | 25 | 25 | 25 |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Ongir nýggir brúkarar eru komnir inn í skipanina seinastu árini.

### 4.2.3 Deildin fyri sinnisveik

Endamálið við deildini fyri sinnisveik er at fyrireika, uppbyggja, samskipa og reka bústaðar- og virknistilboð til sinnisveik. Í løtuni eru 2 bústovnar og 5 sambýli til sinnisveik.

Rakstrarútreiðslan til deildina fyri sinnisveik er økt úr 7,8 mió.kr. í 2003 til 20,2 mió.kr. í 2008, sí niðanfyri.

***Talva 17: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstrarútreiðslunum til Deildina fyri sinnisveik***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Deildin fyri sinnisveik | 7.834 | 10.546 | 13.450 | 15.941 | 19.206 | 20.207 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Í sama tíðarskeiði er talið av búplássum økt úr 23 til 38, m.a. tí at 3 nýggir stovnar eru komnir til í tíðarskeiðinum.

***Talva 18: Tal av búplássum***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Sambýlið Eysturstræti 4 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 |
| Bústovnurin Sólteigur 11 | 6 | 6 | 6 | 6 | 6 | 6 |
| Sambýlið undir Fobbakletti, Sandavági | - | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 |
| Sambýlið á Traðarvegi, Sandavág | - | - | 4 | 4 | 4 | 4 |
| Sambýlið við Heyggari | - | - | - | - | 3 | 6 |
| Tórshavnar Privata Vistarheim | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 |
| Sambýli á Fugloyarvegi | 7 | 7 | 7 | 7 | 7 | 7 |
| **Bupláss til samans** | **23** | **28** | **32** | **32** | **35** | **38** |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Tølini í talvuni omanfyri er tal av búplássum. Mett verður, at talið av búplássum samsvarar væl við tal av búfólki í tíðarskeiðinum. Tað skal viðmerkjast, at fyrsta rakstrarárið hjá nýggjum heimum hevur talið av búfólki verið lægri enn tal av búplássum.

Av samlaða vøkstrinum upp á 12,4 mió.kr. í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 stava áleið 7,4 mió.kr. frá øktum tali av plássum, meðan áleið 3 mió.kr. stava frá vanligum løn- og príshækkingum.

Frá 2003 til 2004 hendi ein ávís hækking í eindarprísinum pr. búfólk, meðan eindarprísurin í føstum krónum í 2008 er nærum á sama støði sum í 2004, tó við eini lítlari øking. Eindarprísurin í árunum 2006 og 2007 hevur ligið nakað hægri, men her skal havast í huga, at lága talið av brúkarum í skipanini ger, at eindarprísurin ávirkast nógv av størri eingangs-útreiðslum.

### 4.2.4 Heimið fyri heilaskadd

Heimið fyri heilaskadd lat upp í 2004, men fult virksemi var ikki á heiminum fyri enn í 2005. Í tíðarskeiðinum frá 2004 til 2008 er rakstrarútreiðslan hækkað úr 2,8 mió.kr. til 3,8 mió.kr.

***Talva 19: Gongdin í tíðarskeiðinum 2004 til 2008 í rakstrarútreiðslunum til Heimið fyri heilaskadd***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Heim fyri heilaskadd | | 2.776 | 3.528 | 3.885 | 3.648 | 3.787 |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Á heiminum fyri heilaskadd búgva 4 fólk.

Eindarprísurin í leypandi krónum er farin úr 882 tkr. í 2005 til 947 tkr. í 2008.

Generelli lønar- og prísvøksturin í tíðarskeiðinum frá 2005 til 2008 var áleið 8,5%, meðan vøksturin á heiminum fyri heilaskadd var 7,3%.

### 4.2.5 Samandráttur

Samlaða økingin í rakstrarútreiðslunum til serforsorgina er slakar 37 mió.kr. frá 2003 til 2008 svarandi til ein vøkstur upp á 37%. Av samlaðu økingini upp á 37 mió.kr. stava 20,6 mió.kr. frá Trivnaðartænastuni og 12,4 mió.kr. frá Deildini fyri sinnisveik.

Av teimum 37 mió.kr. stava áleið 20 mió.kr. frá lønar- og prísvøkstri. Mett verður, at áleið 12 mio.kr. stava frá øktum virksemi.

Mælt verður til, at arbeitt verður fram ímóti at fáa eina tyngdarmetingarskipan setta á stovn fyri økið sum heild, soleiðis at dagprísirnir verða betur grundaðir. Hetta inniber m.a., at brúkararnir av stovnunum verða bólkaðir eftir røktartyngd, og at normeringar síðani verða settar á hvønn bólk, soleiðis at tyngri brúkarar fáa eina hægri starvsfólkanormering og sostatt hægri dagsprís.

Mælt verður til, at gjørd verður ein meting av um ójavna fíggjarliga viðgerðin av búfólkunum viðvíkjandi pensjón/lummapeningi á ávikavist sambýlum og bústovnum er ynskilig.

## 4.3 Eldrarøkt

Niðanfyri er víst hvørji øki eldrarøktin fevnir um og hvussu gongdin í nettoútreiðsluni á ymsu undirkontunum hevur verið frá 2003 til 2008.

Tænasturnar, sum verða veittar eftir niðanfyristandandi játtanum, verða av Nærverkinum kallaðar Heimatænastan, meðan í fíggjarlógarhøpi er "heimatænastan" ein partur av samlaðu játtanini til eldrarøkt og fevnir um heimahjálp, eldrasambýli og heimasjúkrarøktar-frøðitænastuna.

***Talva 20: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstarútreiðslunum til Eldrarøkt***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Røktarheim** | 107.606 | 115.965 | 126.178 | 150.564 | 165.786 | 186.818 |
| **Eldrarøkt í Sandoynni** | 9.756 | 10.783 | 10.815 | 11.100 | 11.535 | 12.128 |
| **Heimatænastan** | 96.288 | 100.559 | 106.635 | 102.654 | 108.446 | 114.884 |
| **Økisterapi** | 0 | 459 | 723 | 1.067 | 1.296 | 1.475 |
| **Til samans[12]** | **213.620** | **227.766** | **244.351** | **265.385** | **287.063** | **315.305** |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Sum tað sæst omanfyri er nettoútreiðslan til eldrarøkt 101 mió.kr. hægri í 2008 enn í 2003 svarandi til eina hækking upp á 48%. Av samlaðu hækkingini stava 79 mió.kr. frá undirkontuni "Røktarheim" og 19 mió.kr. frá undirkontuni "Heimatænastan".

Tað er lítið at ivast í, at útreiðslurnar til eldrarøktina fara at økjast munandi komandi árini, bæði tí at verandi tørvur ikki er nøktaður og tí at talið av eldri væntandi fer at vaksa komandi árini.

Sambært eini tørvskanning pr. 1. januar 2009 vóru 334 fólk kring landið, sum høvdu tikið av einum tilboði um búpláss, um tað stóð teimum í boði. Av teimum 334 fólkunum vóru 144 fólk, sum høvdu bráðfeingis tørv á búplássi.

Umsitingin er av teirri fatan, at tá tær byggingar av røktarheimum, sum eru í umbúnað, eru framdar, er tørvurin á hesum slagi av búplássum nøktaður. Hinvegin verður mett, at stórur tørvur er á øðrum bústaðarmøguleikum fyri eldri.

Í álitinum um "Kommunur, eindir og uppgávur" frá oktober 2009 verður víst á, at lógarverkið á eldraøkinum sum heild ikki er nøktandi, hvørki í mun til ábyrgdarbýti, rættartrygdina hjá borgaranum ella í mun til raksturin av eldrarøktini. Víst verður m.a. á, at eitt nú er tænastustøðið ikki regulerað í lógarverkinum, og at borgarin tískil ikki hevur trygd fyri at fáa tær tænastur hann hevur tørv á. Víðari verður sagt, at vantandi lógarkarmurin hevur við sær, at eldrarøktarøkið í stóran mun verður regulerað eftir siðvenju.

Tosað hevur verið í fleiri ár um at leggja eldrarøktarøkið út til kommunurnar at umsita. Verður hetta gjørt, hendir ein umfordeiling av inntøkum og útreiðslum millum land og kommunur. Hendan umfordeiling má gjølliga umhugsast, m.a. tí at rakstrarútreiðslurnar í dag í einstøku økjunum eru ymiskar, m.a. orsakað av, at økini eru ymiskt útbygd, tá ið talan er um røktar- og sambýlispláss.

Tikið verður undir við tilmælinum frá kommunubólkinum um, at ein rammulóg verður gjørd fyri alt eldraøkið ella teir partar av eldraøkinum, sum verða lagdir út til kommunurnar at umsita.

Niðanfyri er orsøkin til útreiðsluøkingina á teimum ymsu undirkontunum nærri greinað.

---

[12] Undirkontan "Heilsusystrar" varð í 2004 flutt til sjálvstøðuga høvuðskonto, og er tí tikin út úr tølunum fyri 2003

### 4.3.1 Røktarheim

Undirkontan "Røktarheim" fevnir um rakstur av ellis- og røktarheimum kring landið. Játtanin til hesi heim verður givin sum ein føst upphædd pr. dag pr. búfólk. Játtanin er tann sama hóast ójavni kann vera í røktartyngdini. Hinvegin er játtanin pr. dag hægri í teimum førum, at talan er um demenspláss.

Nøkur ellis- og røktarheim hava tilboð um dagtilhald, sí niðanfyri. Ein føst, árlig játtan verður latin til rakstur av dagtilhaldum.

Gongdin í samlaðu útreiðslunum til Røktarheim hevur verið henda:

***Talva 21: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstarútreiðslunum til Røktarheim***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Røktarheim | 107.606 | 115.965 | 126.178 | 150.564 | 165.786 | 186.818 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 er útreiðslan til røktarheim økt við 79 mió.kr., meðan talið av búplássum í sama tíðarskeiði er økt úr 257 upp í 370, sí niðanfyri.

Av útreiðsluhækkingini skyldast áleið 19 mió.kr. almennum lønar- og prísvøkstri, meðan umleið 55 mió.kr. skyldast øktum virksemi, herundir økt tal av búplássum og nýggjum dagtilhaldum. Hinvegin er tað onki, sum týður upp á, at eindarprísurin í føstum krónum broytist stórvegis.

Gongdin í talinum av búplássum hevur verið hendan:

***Talva 22: Tal av búplássum á røktarheimum***

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Røktar- og umlættingarheimið Lágargarður | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 | 48 |
| Ellis- og umlættingarheimið í Tórshavn | 33 | 33 | 33 | 33 | 33 | 33 |
| Ellis- og umlættingarheimið í Vágum | 35 | 34 | 34 | 36 | 36 | 36 |
| Eysturoyar røktar- og ellisheim | 54 | 54 | 54 | 62 | 78 | 78 |
| Suðuroyar røktar- og ellisheim | 30 | 30 | 30 | 30 | 30 | 30 |
| Norðoya røktarheim | 36 | 36 | 36 | 36 | 36 | 36 |
| Norðoya Ellis- og vistarheim | 11 | 11 | 11 | 11 | 11 | 11 |
| Landssjúkrahúsið røktarsjúklingar | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 8 |
| Heimið á Mýrunum Runavík | - | 3 | 8 | 8 | 8 | 8 |
| Tjarnargarður | - | 3 | 10 | 10 | 15 | 34 |
| Heim fyri minnisveik Vallalíð | - | - | 2 | 16 | 16 | 16 |
| Røktarheimið í Norðstreymoy | - | - | - | 15 | 32 | 32 |
| Nýtt dagtilhald, Tjarnagarður | | | x | x | x | x |
| Nýtt dagtilhald, Norðoya Røktarheim | | | | | | x |
| **Tal av búplássum** | **257** | **262** | **276** | **315** | **353** | **370** |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Sum tað sæst er talið av røktarheimsplássum hækkað lutfalsliga nógv seinastu árini, úr 257 búplássum í 2003 til 370 búpláss í 2008. Hækkingin skal helst síggjast saman við tí veruleika, at kommunurnar í 2002 yvirtóku ein størri part av fíggingini í sambandi við bygging av ellis- og røktarheimum. Áðrenn 2002 var siðvenja (ikki ásett við lóg), at landið rindaði 90% av íløguni, meðan kommunan rindaði 10% í sambandi við bygging av ellis- og røktarheimum. Í 2002 varð ásett við lóg, at landið skuldi rinda í mesta lagi 500 tkr. fyri hvørt búpláss í sambandi við bygging av ellis- og røktarheimum, tó í mesta lagi helvtina av byggikostnaðinum. Upphæddin pr. búpláss er hækkað til 700 tkr. frá 1. januar 2009.

Tey heim, sum eisini hava dagtilhald, eru: Lágargarður, Eysturoyar Røktarheim, Norðoya Røktarheim og Tjarnagarður. Lágargarður og Eysturoyar Røktarheim hava havt dagtilhald øll árini frá 2003, meðan dagtilhaldið á Tjarnagarði lat upp í 2005 og dagtilhaldið á Norðoyar Røktarheimi lat upp í 2008.

### *4.3.1.1 Samanbering av játtanini/kostnaðinum á einstøku røktarheimunum*

Játtanin til einstøku røktarheimini verður útroknað sum ein føst upphædd pr. dag pr. búfólk. Játtanin tekur sum útgangsstøði ikki atlit til, hvussu einstøku búfólkini eru fyri, tó undantikið at játtanin til demenspláss er hægri enn játtanin til røktarheim annars.

Ein samanbering av røktarheiminum vísir, at tað er ymiskt hvussu væl tey einstøku heimini hava hildið játtanina árini 2003 til 2008. Nøkur røktarheim halda játtanina flestu árini, meðan onnur í fleiri av árunum hava havt eina meirnýtslu í mun til játtanina.

Í flestu førum, tá ið talan er um meirnýtslu, er henda minni enn 5% av samlaðu játtanini. Í einstøkum førum er meirnýtslan tó størri enn 5%. Generelt er meirnýtslan hækkað í 2007 og 2008.

Nærverkið býtir í fyrsta umfari ikki alla játtanina til røktarheimini út til tey einstøku heimini, men hevur ein buffara at dekka møguliga meirnýtslu hjá einstøku heimunum. Burtursæð frá 2008 hevur ikki verið talan um týðandi meirnýtslu fyri røktarheimskontuna.

Við verandi skrásetingum er ikki gjørligt at siga nakað neyvt um orsøkina til, at summi røktarheim hava meirnýtslu og onnur ikki. Meirnýtslan kann bæði skyldast viðurskifti, sum røktarheimini hava ávirkan á og viðurskifti, sum tey ikki hava ávirkan á.

Viðurskifti, sum røktarheimini hava ávirkan á kunnu vera, at:

- ymiskt er hvussu rationelt røktarheimini verða rikin, harundir hvussu væl arbeiðstíðirnar hjá starvsfólkunum verða lagdar til rættis við atliti til vaktir,
- munur er á dygdini á røktini,
- munur er á hvørjar tænastur tey einstøku heimini geva.

Viðurskifti, sum røktarheimini ikki hava ávirkan á, kunnu vera:

- at munur er á, hvussu búfólkini eru fyri og hvørja røkt tey krevja, og
- at einstøku heimini kunnu verða rakt av serligum útreiðslum, so sum at starvsfólk verða sjúk í longri tíð.

Fyri at kunna samanbera einstøku røktarheimini mugu skrásetingar til, sum gera tað møguligt at meta um tær einstøku orsøkirnar til meirnýtslu.

### 4.3.2 Eldrarøkt á Sandoynni

Eldrarøktin á Sandoynni er skipað við løgtingslóg nr. 111 frá 20. desember í 2002. Endamálið við lógini er, at eldrarøktin skal rekast sum ein integrerað skipan undir leiðslu av heimarøktini á Sandoynni.

Hetta merkir, at á Sandoynni er eldrarøktin, sum eins og aðra staðni í Føroyum fevnir um heimarøkt, eldrasambýli (í Skopun og Skálavík) og røktarheim (á Sandi), skipað undir einum og sama myndugleika, og skipanin fær sostatt eina samlaða játtan.

Skipanin á Sandoynni varð upprunaliga sett í verk sum ein royndarskipan í 1996. Í sambandi við at royndartíðin var liðug í 2002, gjørdi Heimarøktin eftir áheitan frá Almanna- og Heilsumálastýrinum eina eftirmeting av royndarskipanini á Sandoynni. Eftirmetingin innihelt millum annað frágreiðing um, hvussu skipanin hevði virkað í mun til skipanina annars í Føroyum umframt eina meting av, hvussu skipanin skuldi virka eftir 2003.

Arbeiðsbólkurin kom til, at m.a. hesir fyrimunir vóru við skipanini á Sandoynni:

- at røktartyngdin í samlaða økinum verður týðilig,
- at leiðsla, tillutingin av røktartilboðum og búplássum í økinum eru á einum staði, sum ger, at størri fleksibilitetur fæst í tænastuna og tilboðini til brúkaran,
- at brúkarin bert skal venda sær til eitt stað, tá ið hann hevur tørv á hjálp/tænastu,
- at starvsfólkaorkan og fakligi førleikin hjá starvsfólkunum kann brúkast fleksibult og tí rationellari, av tí at setanin av starvsfólkunum umfatar alt økið og ikki bert setan á røktarheimi ella í heimarøktini,
- at starvsfólkini arbeiða í einum toymi, við starvsfeløgum við ymiskum fakligum førleika, har høvi býðst til fakliga og persónliga menning.

Vísandi til fyrimunirnar mælti arbeiðsbólkurin til, at royndarskipanin helt fram.

Gongdin í nettoútreiðslunum av skipanini á Sandoynni hava verið hesar seinastu árini:

***Talva 23: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstarútreiðslunum til Eldrarøkt í Sandoynni***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Eldrarøkt í Sandoynni | 9.756 | 10.783 | 10.815 | 11.100 | 11.535 | 12.128 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 eru útreiðslurnar hækkaðar við 24%. Við verandi skráseting av útreiðslum er ikki gjørligt at síggja, hvat tey einstøku heimini/sambýlini kosta at reka hvørt sær og hvat heimahjálpin kostar. Tí er heldur ikki møguligt at útgreina, hvat restin av hækkingini skyldast.

Røktar- og sambýlini á Sandoynni eru normerað til 23 røktarpláss, men í 2008 hava stovnarnir av serligum ávum havt 24 búfólk. Harafturat hevur til tíðir verið ein ávís yvirbooking á sambýlinum í Skopun í 2008. Talið av veittum tímum í heimarøkt hevur verið rættuliga javnt øll árini, millum 70-80 tímar um vikuna.

Niðanfyri eru høvuðsmunirnir millum skipanina á Sandoynni og skipanina í restina av landinum lýst.

***Talva 24: Samanbering millum røktarheim og sambýli í ávikavist Sandoynni og restina av landinum***

| | Restina av landinum | | Sandoyggin | |
|---|---|---|---|---|
| | Røktar-heim | Eldra-sambýli | Røktar-heim | Eldra-sambýli |
| **Búfólk:** | | | | |
| **Fáa lummapengar** | ja | nei | nei | nei |
| **Varðveita pensjónina** | nei | ja | ja | ja |
| **Gjalda fyri leigu og uppihald** | nei | ja | ja | ja |
| **Gjalda fyri heimahjálp (inntøka > 50 tkr.)** | nei | ja | nei | ja |
| **Gjalda 10% av skattskyldugari inntøku í vistarhaldi** | ja | nei | nei | nei |
| | | | | |
| **Onnur viðurskifti:** | | | | |
| **Kommunan rindar ein part av rakstrarútreiðslunum** | nei | ja | nei | nei |

*Kelda: egin framleiða*

Sum tað sæst omanfyri:

- eru røktarheimini á Sandoynni samskipað við eldrasambýlini og heimarøktina, meðan tey aðrastaðni í stóran mun verða rikin hvør sær,
- varðveita fólk á røktarheimum á Sandoynni pensjónina, men skulu rinda fyri leigu og uppihald, meðan tey aðrastaðni missa pensjónina, fáa lummapening og búgva frítt,
- rindar landið allan rakstur av sambýlunum á Sandoynni, meðan aðrastaðni rinda kommunurnar ein part av rakstrarútreiðslunum

### 4.3.2.1 *Samanbering av kostnaðinum av skipanini á Sandoynni og skipanini aðrastaðni*

Í kanningini, sum heimarøktin gjørdi í 2002 av royndarskipanini á Sandoynni, varð eisini komið inn á spurningin, hvørt skipanin á Sandoynni er bíligari at reka enn skipanin aðrastaðni. Spurningurin varð tó ikki neyvt viðgjørdur, og kanningin gav sostatt ikki nakað greitt svar, hvør skipan er betur fíggjarliga.

Við teimum skrásetingum, sum finnast í dag, bæði viðvíkjandi skipanini á Sandoynni og viðvíkjandi skipanini aðrastaðni, er ikki gjørligt at gera eina neyva greining av, hvør skipan er bíligari.

Niðanfyri er tó gjørd eina roynd at gera eina samanbering av skipanunum. Hetta er gjørt við at samanbera samlaðu rakstrarútreiðslurnar av at reka skipanina á Sandoynni í 2008 við hvussu stór játtanin til Sandoynna hevði verið, um hon varð roknað út á sama hátt sum játtanin aðrastaðni. Sum komið verður inn á niðanfyri skulu tølini takast við ávísum fyrivarni.

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar av at reka skipanina á Sandoynni í 2008 vóru upp á 13.062 tkr.:

***Talva 25: Samlaðu rakstrarútreiðslurnar til skipanina á Sandoynni í 2008***

| tkr. | |
|---|---|
| Nettoútreiðsla | 12.128 |
| Inntøka frá búfólkum fyri leigu og uppihald | 934 |
| **Rakstrarútreiðslur til samans** | **13.062** |

*Kelda: Búskaparskipan Landsins.*

Játtanin til onnur røktarheim og sambýli í Føroyum er grundað á ein dagsprís. Játtanin til røktarheimsplássini var í 2008 upp á 1.260 kr. fyri hvørt vanligt búpláss og upp á 1.470 kr. fyri demenspláss. Játtanin til pláss á sambýlum var í 2008 upp á 900 kr. fyri hvørt búfólk, men hendan kann ikki samanberast við Sandoynna, tí aðrastaðni í landinum rinda kommunurnar ein part av rakstrarútreiðslunum av sambýlunum.

Upplýst er, at útreiðslurnar til eldrsambýlisplássini helst eru nakað lægri enn útreiðslurnar til røktarheimsplássini, men hetta er ikki gjørligt at skjalprógva í dag við tað at útreiðslurnar til sambýlini verða bókaðar saman við útreiðslunum til heimarøktina og heimasjúkrarøktina.

Upplýst er, at í 2008 vóru 24 búpláss á Sandoynni, harav 7 demenspláss. Harafturat var sambýlið í Skopun yvirbookað ein part av árinum.

Umframt røktarheim- og sambýlispláss verður eisini veitt heimahjálp á Sandoynni. Sambært móttiknum upplýsingum var talið av heimahjálpstímum í 2008 umleið 3.900. Við verandi skrásetingum er ikki møguligt hvørki á Sandoynni ella aðrastaðni at gera upp, hvat hvør tími í heimahjálp kostar. Í útrokningunum niðanfyri er ein tímaprísur upp á 275 kr. nýttur.

Um røktar- og sambýlisplássini á Sandoynni høvdu fingið somu játtan sum røktarheimspláss aðrastaðni, og heimahjálpin hevði fingið játtað 275 kr. pr. nýttan tíma hevði játtanin verið:

***Talva 26: Mett játtan til skipanina á Sandoynni í 2008 um skipanin varð skipað á sama hátt sum í restini av landinum***

| tkr. | |
|---|---|
| 17 vanlig røktar- og sambýlispláss á 1.260 kr./dag | 7.818 |
| 7 demenspláss á 1.470 kr./dag | 3.756 |
| Heimarøkt, 3.900 tímar á 275 kr./tíma | 1.073 |
| **Samlað játtan** | **12.647** |

*Kelda: Egnar útrokningar*

Við gjørdum fyritreytum hevði játtanin til Sandoynna verið nakað lægri enn samlaðu rakstrarútreiðslurnar av skipanini á Sandoynni fyri 2008.

Tað kann tó ikki greitt sigast hvør skipan er bíligari at reka, tann á Sandoynni ella tann í restini av landinum. Fyri tað fyrsta skal havast í huga, at stovnarnir á Sandoynni eru smáir, og útreiðslurnar pr. búfólk tí helst yvir miðal. Tað er tí ikki heilt vist, at stovnarnir høvdu klárað at hildið útroknaðu játtanina. Fyri tað næsta hevur virksemið á Sandoynni helst verið eitt vet størri í 2008 enn tey 24 røktar- og sambýlisbúplássini, sum útrokningin byggir á. Harafturat eru ongar upplýsingar um røktartyngdina av búfólkunum á Sandoynni í mun til búfólkini aðrastaðni.

Hinvegin kann greitt sigast, at skipanin á Sandoynni er dýrari fyri landskassan tí at:

- landið rindar allan raksturin á sambýlunum á Sandoynni, meðan kommunurnar rinda fyri ein part av rakstrinum av sambýlunum aðrastaðni í landinum,

- á Sandoynni varðveita búfólkini á røktarheiminum fólkapensjónina móti at gjalda eina fasta upphædd hvønn mánað fyri vistarhald, meðan búfólk á øðrum røktarheimum missa rættin til fólkapensjón, hava frítt vistarhald og fáa lummapening.

### 4.3.3 Heimatænastan

Játtanin á fíggjarlógini til heimatænastuna fevnir um heimahjálp, eldrasambýli og heimasjúkrarøktafrøðitænastuna.

Heimatænastan er skipað í 6 øki, sum hvørt hevur sín leiðara, harav Sandoy hevur sína heilt egnu skipan. Ábyrgdarøkið hjá einstaka økisleiðaranum er at samskipa heimahjálpina, heimasjúkrafrøðina og virksemið á eldrasambýlunum í økinum.

Tað er ymiskt hvussu einstøku økini eru skipað. Í onkrum føri líkist skipanin bygnaðarliga meiri tí í Sandoynni (tó undantikið ellisheimini), har starvsfólkið arbeiðir bæði úti í privatum heimum og inni á eldrasambýlum. Í øðrum økjum er skilnaður ímillum hvørji fólk arbeiða á eldrasambýlunum og hvørji arbeiða úti á heimunum.

Við verandi roknskaparskrásetingum er ikki møguligt at greina, hvat ávikavist heimahjálpin, eldrasambýlini og heimasjúkrarøktafrøðitænastan hava kostað seinastu árini, hvørki fyri einstøku økini ella fyri landið sum heild.

Í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 eru samlaðu útreiðslurnar til heimatænastuna øktar við 18 mió.kr. svarandi til 19%, sí uppgerð niðanfyri.

***Talva 27: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í rakstrarútreiðslunum til Heimatænastuna***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Heimatænastan til samans | 96.288 | 100.659 | 106.636 | 102.655 | 108.446 | 114.883 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Virksemið innan heimatænastuna er broytt munandi í tíðarskeiðinum. Talið av búplássum er økt úr 106 upp í 158, talið av fólkum, sum fáa heimahjálp, er lækkað úr 784 í 2005 til 690 í 2008 og tal av veittum tímum í heimahjálp er lækkað út 4.934 tímum um vikuna í 2005 til 3.370 tímar um vikuna í 2008, sí niðanfyri.

Útreiðslan í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 er hækkað við 18,6 mió.kr., sum er nakað meira enn generella lønar- og príshækkingin í tíðarskeiðinum.

Sum nevnt omanfyri er ikki møguligt við verandi skrásetingum at greina hvat ymsu virkisøkini hjá heimatænastuni hava kostað.

Niðanfyri er greitt nærri frá ymisku skipanunum undir heimatænastuni.

### *4.3.3.1 Heimahjálp*

Heimahjálp kann verða veitt:

1 í stutt tíðarbil, tá ið húsmóðirin ella húsfaðirin berst frá fyri sjúku, barnsburði ella eftirbata (bráðfeingis)

2 í óavmarkaða tíð til avlamis- og fólkapensjónistar, ið tørva hjálp heima (varandi)

3 av og á fyri at lætta um hjá fólki, ið heima taka sær av brekaðum barni ella vaksnum

Heimahjálp veitt eftir 1 og 3 er ókeypis, meðan heimahjálp, sum verður veitt eftir 2 verður goldin í mun til inntøku, sum pensjónisturin og hjúnafelagin hava afturat fólkapensjónini.

Niðanfyri er víst ein uppgerð yvir tal av fólki, sum hava fingið heimahjálp í árunum 2005 til 2008 umframt hvussu nógvir tímar eru veittir um vikuna. Við støði í hesum upplýsingum er roknað út, hvussu nógvar tímar hvør móttakari í meðal hevur fingið um vikuna.

***Talva 28: Tal av fólki, sum hava fingið heimahjálp í árunum 2005 til 2008 og tal av tímum um vikuna***

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fólk sum fáa heimahjálp** | | | 784 | 759 | 731 | 690 |
| **Tímar um vikuna** | | | 4.934 | 4.047 | 3.765 | 3.370 |
| **Tímar til hvønn móttakara í meðal um vikuna** | | | 6,29 | 5,33 | 5,15 | 4,88 |

*Kelda: Almannamálaráðið*

Sum nevnt er tað ikki gjørligt við verandi skrásetingum at gera upp, hvat heimahjálpin í sær sjálvum hevur kostað, tí tølini eru skrásett saman við tølunum fyri sambýlini.

Av talvuni omanfyri sæst, at talið av veittum tímum er lækkað stigvíst frá 2005 til 2008. Í sama tíðarskeiði er talið av búplássum á røktarheimum og eldrasambýlum økt við 103. Í hesum sambandi er upplýst, at fyri hvørt nýtt røktarheims- og sambýlispláss er játtanin til heimahjálp skorin við 5 til 10 tímum um vikuna. Upphæddin til heimahjálpina er sostatt minkað so hvørt nýggj pláss eru komin. Verður lagt til grund, at tað eru tyngstu brúkararnir,

sum í tíðarskeiðinum eru komnir á røktarheim, kann tað vera ein orsøk til, at hvør móttakari av heimahjálp í meðal fær færri tímar (lættari brúkarar) í 2008 enn í 2005.

Ein annar partur av frágreiðingini er tann, at játtanin til eldri í stóran mun er tengd at røktarheimunum og eldrasambýlunum, har tað er munandi verri at gera tillagingar, enn í heimahjálparskipanini. Tað er upplýst, at sparingar tískil oftari raka hesa tænastuna enn aðrar tænastur undir somu høvuðskontu.

### *4.3.3.2 Eldrasambýli*

Eldrasambýli eru bústovnar, sum hýsa fólkapensjónistum við ellisbrekum, ið hava tørv á starvsfólki at hjálpa teimum í dagligu tilveruni. Í serligum førum hýsa eldrasambýlini eisini røktarkrevjandi fyritíðarpensjónistum við likamligum breki.

Heimatænastan hjá Nærverkinum rekur í løtuni 16 eldrasambýli runt um í landinum, harav 2 liggja á Sandoynni. Niðanfyri sæst hvørji eldrasambýli talan er um, og hvussu nógvum búfólkum hvørt heim kann hýsa. Heimini á Sandoynni eru ikki tikin við her, tí tey verða fíggjað av aðrari konto.

***Talva 29: Tal av búplássum á eldrasambýlum***

| Búpláss | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Eldrasambýlið í Vestmanna** | 7 | 7 | 7 | 7 | 7 | 7 |
| **Eldrasambýlið í Kollafirði** | 7 | 7 | 7 | 7 | 7 | 7 |
| **Eldrasambýlið á Eiði** | 10 | 15 | 15 | 15 | 15 | 15 |
| **Eldrasambýlið á Skála** | 9 | 9 | 9 | 9 | 9 | 9 |
| **Eldrasambýlið í Fuglafirði** | 15 | 15 | 15 | 15 | 15 | 15 |
| **Eldrasambýlið í Tórshavn (oman Hoydalar)** | 9 | 9 | 9 | 9 | 9 | 9 |
| **Eldrasambýlið oman Mattalág** | - | - | - | - | - | 9 |
| **Eldrasambýlið í Vági** | 12 | 12 | 12 | 12 | 12 | 12 |
| **Eldrasambýlið á Tvøroyri** | 3 | 3 | 5 | 5 | 5 | 5 |
| **Eldrasambýlið á Heygum (Kráarbrekka)** | 16 | 16 | 16 | 16 | 16 | 16 |
| **Eldrasambýlið í Klaksvík (Bøgøta)** | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 |
| **Eldrasambýlið í Hvalba** | 8 | 8 | 8 | 8 | 8 | 8 |
| **Eldrasambýlið í Gøtu** | - | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 |
| **Eldrasambýlið á Toftum** | - | 16 | 16 | 16 | 16 | 16 |
| **Eldrasambýlið í Leirvík** | - | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 |
| **Til samans** | **106** | **147** | **149** | **149** | **149** | **158** |

*Kelda: Almannamálaráðið*

Av talvuni omanfyri sæst, at fleiri nýggj eldrasambýli komu í 2004, men síðani er nærum onki hent fyrr enn í 2008, tá ið Eldrasambýlið Oman Mattalág varð opnað við 9 nýggjum plássum.

Sum nevnt fyriliggja ongi roknskapartøl fyri kostnaðin av at reka eldrasambýlini, men bara fyri Heimatænastuna sum heild.

Verður sammett við røktarheimini hevur tann einstaki brúkarin meiri fíggjarligt sjálvræði á eldrasambýlunum, og tí ynskja fleiri eldri heldur hendan búformin sambært móttiknum upplýsingum.

#### *4.3.3.3 Heimasjúkrarøktarfrøðingar*

Endamálið við heimasjúkrarøktini er at ganga tørvinum á heilsu- og sjúkrarøkt í heiminum á møti í sambandi við sjúkraviðgerð og uppvenjing, so at sjúklingurin kann vera heima, um tað er læknaliga og samfelagsliga ráðiligt.

Ongi skipað hagtøl eru skrásett í sambandi við heimasjúkrarøktarfrøðingarskipanina, so sum tal av vitjanum, og tískil ber ikki til at siga nakað um gongdina í virkseminum á økinum.

### 4.3.4 Økisterapi

Økisterapiin hevur stigvíst verið sett í verk í teimum 6 heimarøktarøkjunum kring landið. Talan er um ergo- ella fysioterapeutar, sum fáa til uppgávu at skipa fyri uppvenjing og framhaldandi at røkja vunnan førleika hjá teimum, sum tørva viðgerð, eftirviðgerð ella fyribyrgjandi tiltøk.

Økisterapi er nú sett á stovn í øllum økjum.

### 4.3.5 Áseting av dagsprísi (tyngdarmetingarskipan)

Ásetingin av dagsprísi tekur støði í dagsprísinum árið fyri, javnað fyri kendum broytingum sum t.d. lønarvøkstur.

Tað verður sostatt ikki tikið atlit til hvussu einstøku búfólkini eru fyri, tó undantikið at játtanin til demenspláss er hægri enn játtanin til ellisheim annars. Avleiðingin av hesum kann vera, at fíggjarliga ráðarúmið verður ymiskt á heimunum, alt eftir støðuni hjá búfólkunum, tí tyngri búfólk krevja meiri røkt, t.v.s. fleiri starvsfólk, og tískil verður minni eftir til annan rakstur.

Verandi mannagongd við at egingjaldið frá búfólkunum fellur til avvarðandi heim, er eisini við til at gera fíggjarliga ráðarúmið hjá einstøku heimunum ymiskt. Arbeitt verður við at broyta hetta, soleiðis at egingjaldið í framtíðini fellur beinleiðis til landskassan.

Hóast gjaldið til heimini er eins pr. búfólk, finnast ongar leiðreglur fyri, hvørja tænastur búfólkini hava rætt til.

### 4.3.6 Samandráttur

Samlaða hækkingin upp á 101 mió.kr. til eldrarøktina fyri árini 2003 til 2008 kann greinast soleiðis:

- áleið 37 mió.kr. stava frá lønar- og prísvøkstri
- áleið 55 mió.kr. frá, at talið av búplássum á røktarheimum er økt við 113 og
- 1 mió.kr. stava frá økisterapiini, har øll økini uttan Eysturoyggin nú hava sín ergo- ella fysioterapeut

Restupphæddin, áleið 8 mió.kr., kann skyldast, at eindarprísurin í føstum prísum er broyttur og/ella at virksemið er økt meiri enn nevnt omanfyri.

Mælt verður til:

- at ein rammulóg verður gjørd fyri alt eldraøkið, har greitt verður ásett hvør hevur ábyrgdina av eldrarøktini og har rættindini borgaranna verða tryggjað.
- at arbeitt verður fram ímóti at fáa eina tyngdarmetingarskipan[13] setta á stovn fyri eldra økið sum heild, soleiðis at dagprísirnir verða betur grundaðir. Hetta inniber m.a., at brúkararnir av stovnunum verða bólkaðir eftir røktartyngd, og at normeringar síðani verða settar á hvønn bólk, soleiðis at tyngri brúkarar fáa eina hægri starvsfólkanormering og sostatt hægri dagsprís.
- at bygnaðurin í skipanini á eldraøkinum verður gjøgnumgingin fyri at meta um
  - hvørt ójavna fíggjarliga viðgerðin av búfólkunum á ávikavist ellisheimum-/eldrasambýlum og á Sandoynni/aðrastaðnis í landinum er ynskilig
  - hvørt tað er ynskiligt, at fíggjarliga býtið millum land og kommunur av rakstrinum av eldrasambýlum er øðrvísi á Sandoynni enn í restini av landinum.
- at betri skrásetingar fáast til vega um einstøku skipanirnar og einstøku brúkararnar, m.a. fyri at fáa til vega vitan um eindarprísir og fyri betur kunna meta um avleiðingarnar, tá ið skipanir verða broyttar ella nýggjar tiknar í nýtslu, t.d. hvussu nógv nýggju búplássini á eldraøkinum hava spart í útreiðslum í øðrum skipanum, m.a. heimahjálp. Eitt annað dømi eru vardu størvini, har ongin uppgerð fyriliggur um, hvørji skipan hesi koma frá, og hvat broytingin í skipanini merkir fyri landskassan.

Viðvíkjandi heimatænastuni verður mælt til, at roknskaparliga skrásetingin av útreiðslunum í framtíðini verður løgd soleiðis til rættis, at tað letur seg gera at gera upp samlaða rakstrarkostnaðin fyri ávikavist einstøku eldrasambýlini og heimarøktina annars.

Mælt verður til, at virksemið hjá heimafrøðisskipanini í framtíðini verður skrásett, soleiðis at meiri vitan fæst um virksemið í skipanini.

---

[13] Í Danmark verður ein tyngdarmetingarskipan nýtt á eldraøkinum, sum verður kallað "Fælles sprog". Í Íslandi verður ein skipan nýtt, sum verður kallað RAI. Hendan skipan verur eisini partvíst nýtt í Noregi.

## 4.4 Ansingarsamsýning

Endamálið við skipanini um ansingarsamsýning er at tryggja, at persónur, sum hevur fylt 67 ár, og sum hevur tørv á støðugari røkt ella hjáveru, fær neyðuga hjálp, soleiðis at hann kann verða búgvandi heima. Talan er um eina skipan, sum stórtsæð hevur verið óbroytt síðani 1984.

Almannastovan ger í hvørjum einstøkum føri eina meting av umstøðunum við støði í eini lýsing av støðuni frá lækna, heimasjúkrarøktini og tí ansaða. Persónur, sum fær ansingarsamsýning, hevur skyldu at fráboða Almannastovuni broytingar, sum ávirka rættin til at fáa ansingarsamsýning. Almannastovan hevur sum so ikki nakra skipaða uppfylging av málunum um útgjald av ansingarsamsýning.

Samsýningin, sum verður latin ansarum, svarar til miðal fyritíðarpensjón (í 2009 er samsýningin í mesta lagi 10.111 kr. pr. mánað). Upphæddin er vanlig skattskyldug inntøka.

Miðal fyritíðarpensjónin er hækkað við 4% árliga tey seinastu árini.

Gongdin í útreiðslunum til ansingarsamsýning hevur verið henda:

***Talva 30: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í ansingarsamsýning***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ansingarsamsýning** | 10.082 | 10.558 | 10.444 | 11.016 | 10.800 | 13.943 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Av samlaðu hækkingini í tíðarskeiðinum upp á 3,9 mió.kr. stava 2,5 mió.kr. frá lógarbundnu hækkingini av samsýningarupphæddini. Tað finnast ikki skipaðar skrásetingar yvir talið av fólkum, sum verða ansað undir hesi skipan, og tí ber ikki til at siga nakað ítøkiligt um aðrar broytingar í tíðarskeiðinum, herundir broytingar frá ár til ár.

Hinvegin finst ein skipað skráseting yvir talið av ansarum, sí niðanfyri.

***Talva 31: Tal av ansarum***

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tal av ansarum** | 165 | 148 | 133 | 129 | 127 | 146 |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Omanfyristandandi talva vísir, hvussu nógvir ansarar hava verið í skipanini ígjøgnum árið. Í tølunum verður sostatt ikki skilt millum ein ansara, sum hevur verið undir skipanini í eitt heilt ár og ein, sum bert hevur verið í skipanini í eitt styttri tíðarskeið.

Sum sæst er útgoldna upphæddin og tal av ansarum hækkað lutfalsliga nógv frá 2007 til 2008.

Upplýst er, at tað finst eingin einstøk orsøk til stóru hækkingina, men at hækkingin helst skyldast, at generella trýstið á eldraøkinum økist. Hetta sæst eisini aftur í játtanum fyri 2009 og 2010, sum eru hækkaðar við ávikavist 9% og 12%.

### 4.4.1 Samandráttur

Ansingarskipanin hevur stórtsæð verið óbroytt síðani 1984 og tí verður mælt til, at skipanin sum heild verður eftirmett. Nevnast kann, at skipanin í Føroyum víkur munandi frá líknandi skipanum í hinum norðanlondunum, har veitingin er kompensatión fyri mista arbeiðsinntøku, t.v.s. at tað er ein treyt, at ein skal fara av arbeiðsmarknaðinum fyri at fáa veitingina.

Av samlaðu hækkingini í tíðarskeiðinum upp á 3,9 mió.kr. stava 2,5 mio.kr. frá lógarbundnu hækkingini av samsýningarupphæddini.

Fyri at betra um møguleikan fyri at fylgja við gongdini í ansingarsamsýningini verður mælt til, at tað í framtíðini verður gjørd ein *skipað skráseting* yvir teir persónar, sum verða ansaðir og yvir tey, sum fáa ansingarsamsýning. Skrásetingin skal skipast við støði í eini tørvs-lýsing.

Somuleiðis verður mælt til, at ein mannagongd verður skipað sum tryggjar eina nøktandi uppfylging leypandi av einstøku málunum.

## 4.5 Stuðulstænastan

Stuðulstænastan hevur til endamáls at stuðla vaksnum heimabúgvandi við serligum tørvi, sum eru rørslutarnað ella hava avmarkaðan sálarligan førleika, so at tey hava møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív.

Málbólkurin er fólk frá 18 til og við 66 ár, ið búgva í egnum heimi.

Stuðulstænastan kann játta stuðul til hesar høvuðsbólkar:

- Menningartarnað
- Fólk við avmarkaðum sálarligum førleika
- Seinheilaskadd
- Rørslutarnað
- Fólk við sansibreki (blind, deyv o.t.)

Gongdin í árligu útreiðslunum til Stuðulstænastuna hevur verið, sum víst í talvuni niðanfyri:

***Talva 32: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðslum til Stuðulstænastuna***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 8.587 | 14.591 | 13.632 | 14.849 | 15.836 | 21.753 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Áðrenn 2003 var stuðulsskipanin ein lógarbundin játtan, sum lá undir Almannastovuni. Í 2003 bleiv skipanin broytt til rakstrarjáttan og flutt undir Nærverkið. 2003 var sostatt ein skiftitíð, har partar av stuðlunum vóru settir undir gomlu skipanina, og lønir teirra vóru harvið eisini bókaðar undir fyritíðarpensjón. Ein onnur orsøk til vøksturin frá 2003 til 2004 var, at skipanin í 2003 ikki kom í gongd beinanvegin, og t.v.s. at roknskapurin fyri 2003 ikki er fyri heilt ár.

Sum tað sæst av talvuni er útreiðslan til Stuðulstænastuna økt við 49% í tíðarskeiðinum frá 2004 til 2008.

Samlaða hækkingin frá 2004 til 2008 kann í høvuðsheitum greinast soleiðis:

- áleið 1,5 mió.kr. skyldast lønar- og prísvøkstri
- av stóru hækkingin frá 2007 til 2008 skyldast áleið 5 mió.kr., at tríggir sera tungir brúkarar eru komnir inn í skipanina í 2008
- talið av brúkarum í skipanini er munandi økt í tíðarskeiðinum

Hóast tað ikki er møguligt at fáa neyv hagtøl yvir virksemið undir Stuðulsskipanini seinastu árini, so vísir ein uppgerð, at í 2004 vóru 83 brúkarar í skipanini, meðan talið í 2008 var 142. Í sama tíðarskeiði er talið av fulltíðarstørvum økt úr 47,6 til 61,5.

Gongdin í tal av brúkarum frá 2004 til 2008.

***Talva 33: Tal av brúkarum***

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Brúkarar** | - | 83 | 94 | 100 | 120 | 142 |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Tað skal viðmerkjast, at talið av brúkarum einans vísir, hvussu nógvir brúkarar eru í skipanini, men sigur einki um hvussu nógvir tímar eru veittir.

Nærverkið hevur síðani fyrst í 2009 fingið yvirlit yvir veittar tímar pr. viku frá samskiparum í Stuðulstænastuni og verður hetta at betra hagtalsgrundarlagið munandi í framtíðini.

### 4.5.1 Samandráttur

Skipanin byrjaði í 2003 og fyrsta ár við fullum virksemi hjá Stuðulstænastuni var í 2004. Í hesum tíðarskeiði er útreiðslan økt við 49% og talið av brúkarum er munandi økt. Útreiðslan kann ávirkast nógv, um tungir brúkarar koma inn í skipanina, t.d. soleiðis sum tað hendi í 2008.

Skrásetinging av brúkarum hevur í tíðarskeiðinum frá 2004 til 2008 ikki verið nóg væl skipað og tí kann ikki sigast nakað um gongdina í eindarprísinum. Skrásetingarnar eru betraðar í 2009, t.d. verða nú gjørd yvirlit yvir veittar tímar pr. viku.

## 4.6 Vanlig forsorg

Vanlig forsorg fevnir um veitingar eftir grein 9 (fyribilshjálp), grein 13 (varandi hjálp), grein 15 (stakútreiðslur), grein 16 (hjálp til viðgerð á serligum stovnum), grein 17 (meirútreiðslur brekað barn) og grein 18 (hjálparamboð, endurútbúgving v.m.) í forsorgarlógini.

Samlaðu útreiðslurnar til vanliga forsorg eru í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 øktar við 17%. Í sama tíðarskeiði eru útreiðslurnar, sum eru fevndar av hesi játtanargreining, tað er Meirútreiðslur brekað barn, Endurútbúgving, Hjálparamboð v.m. og Hjálp til viðgerð á serligum stovnum øktar við 50%

***Talva 34: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útvaldum høvuðskontum til vanliga forsorg***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Meirútreiðslur brekað barn § 17** | 15.631 | 16.895 | 20.560 | 22.066 | 23.546 | 28.333 |
| **Endurbúgving § 18** | 15.471 | 20.716 | 22.251 | 24.637 | 26.369 | 40.462 |
| **Hjálparamboð v.m. § 18** | 48.389 | 40.300 | 41.990 | 43.764 | 51.452 | 51.453 |
| **Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16** | 0 | 263 | 542 | 388 | 3.765 | 3.306 |
| **Til samans** | **79.491** | **78.174** | **85.343** | **90.855** | **105.132** | **123.554** |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Av samlaða vøkstrinum upp á 39,6 mió.kr. stava umleið 14 mió.kr. frá generellum lønar- og prísvøkstri. Vegna vantandi hagtøl er torført at gera eina neyva uppgerð av hvat restin av hækkingini skyldast. Tó kann sigast, at ein stórur partur av øktu útreiðsluni skyldast økt virksemi á endurbúgvingarøkinum, m.a. vart starv og gjald fyri stovnar í Danmark.

Verandi forsorgarlóg er gomul, men fleiri broytingar eru gjørdar í lógartekstinum seinnu árini. Hóast lógarteksturin í fleiri førum heimilar landsstýrismanninum at gera nærri reglur á økinum, hava bert fáar kunngerðir higartil verðið gjørdar.

Landsgrannskoðarin hevur seinnu árini fleiri ferðir víst á, at manglandi kunngerðir á økinum gera umsitingina av lógini trupla. Sambært árligu frágreiðingunum frá landsgrannskoðaranum hevur landsstýrismaðurin í almannamálum í fleiri ár víst á, at arbeitt verður við at gera kunngerðir, men at arbeiðið hevur drigið út, m.a. grundað á manglandi arbeiðsorku.

Í hvønn mun manglandi kunngerðir hava ávirkað útreiðsluna á forsorgarøkinum er torført at meta um, men tað er ein sannroynd, at á forsorgarøkinum skulu í nógvum førum gerast ítøkiligar metingar í sambandi við útgjaldsmál. Tí kann tað tykjast løgið, at arbeiðið við at gera kunngerðir ikki hevur verið hægri raðfest.

Í 2009 eru fleiri av umrøddu kunngerðum lýstar.

Peningur er í fleiri umførum settur av til at gera nýggja forsorgarlóg, men neyðuga arbeiðsorkan hevur ikki verið tøk til arbeiðið. Tað er eitt politiskt ynski, at ein nýggj forsorgarlóg er klár at leggja fyri tingið í 2011, men enn er hetta arbeiðið ikki veruliga farið í gongd.

Í løtuni verður arbeitt við einstøkum pørtum av lógini, har ábøtur eru mest tiltrongdar, m.a. ásetingin um hjálparráð. Fleiri ivamál hava verið í sambandi við hesa áseting, og arbeitt verður í løtuni við at nágreina sjálvan lógartekstin umframt at arbeitt verður við at gera tilhoyrandi kunngerðir. Endamálið við lógarbroytingini er ikki at gera nøkur stór inntriv, men heldur at gera reglurnar greiðari.

Eitt av endamálunum við lógarbroytingunum, sum arbeitt verður við í løtuni, er at fáa samanhang í, at tey, sum ávísa eina útreiðslu, eisini hava ábyrgd av játtanini. Hetta hevur í fleiri førum ikki verið galdandi, t.d. hevur tað verið soleiðis, at Landssjúkrahúsið hevur ávíst ávís hjálparráð, meðan tað er Almannastovan, sum hevur ábyrgd av játtanini.

Generelt skal viðmerkjast, at tað er ein fyrimunur, at tey, sum ávísa eina vøru/tænastu eisini hava ábyrgd at halda játtanina á økinum.

Við verandi skrásetingarskipan á Almannastovuni er tað ikki møguligt at fáa til vega neyv hagtøl viðvíkjandi virkseminum á einstøku økjunum. Fyri forsorgarøkini, sum verða gjøgnumgingin niðanfyri er galdandi, at skrásetingarnar bert fevna um talið av fólkum í skipanunum og onki siga um, hvussu leingi fólkini eru í skipanini.

### 4.6.1 Meirútreiðslur brekað barn

Talan er um eina skipan, har foreldur at børnum, sum bera álvarsligt likamligt ella sálarligt brek ella hava álvarsliga varandi sjúku, kunnu søkja um at fáa endurgoldið tær meirútreiðslur, sum beinleiðis stava frá brekinum ella sjúkuni hjá barninum. Treytin er, at barnið býr heima.

Endurgjald verður latið til neyðugar meirútreiðslur av uppihaldinum og í sambandi við viðgerðir. Stuðulin er ikki treytaður av inntøkuviðurskiftum hjá foreldrunum.

Harumframt verður endurgjald veitt fyri mista arbeiðsinntøku, um avleiðingarnar av sjúkuni ella brekinum hjá barninum eru, at tað er alneyðugt, at annað av foreldrunum ansar barninum heima og tí ikki kann verða verandi í arbeiði í styttri ella longri tíð, ella einans kann arbeiða niðursetta tíð.

Gongdin í útreiðslunum hevur verið hendan:

***Talva 35: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðslunum til meirútreiðslur brekað barn***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Veitingin "endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku": | 6.207 | 6.502 | 9.132 | 9.241 | 10.021 | 11.239 |
| Meirútreiðslur til heilivág | 3.958 | 4.150 | 5.464 | 4.922 | 5.143 | 6.881 |
| Annað | 5.466 | 6.243 | 5.964 | 6.323 | 8.382 | 10.213 |
| **Meirútreiðslur brekað barn § 17** | **15.631** | **16.895** | **20.560** | **20.486** | **23.546** | **28.333** |

*Kelda: Búskaparskipan Landsins.*

Sum tað sæst stavar hækkingin frá eini øking í øllum trimum undirkontum.

***Talva 36: Tal av brúkarum***

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Meirútreiðslur brekað barn § 17 | 490 | 531 | 565 | 581 | 571 | 568 |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Av talvuni omanfyri sæst hvussu nógvir brúkarar havar verið í skipanini í einum ári.

Eins og fyri onnur øki undir høvuðskontuni Vanlig forsorg er skrásetingin av upplýsingum um hvør fær veiting sambært grein 17 í forsorgarlógini ófullfíggjað, m.a. finnast ongi nágreinilig hagtøl yvir hvussu nógv fólk *í miðal* hava verið í skipanini í tíðarskeiðinum.

Niðanfyri eru einstøku undirkonturnar gjøgnumgingnar.

### *4.6.1.1 Veitingin "endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku"*

***Talva 37: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðslunum til "endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku"***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Veitingin "endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku": | 6.207 | 6.502 | 9.132 | 9.241 | 10.021 | 11.239 |

*Kelda: Búskaparskipan Landsins.*

Sum nevnt omanfyri er hend ein lutfalsliga stór øking í útgjalding av endurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku.

Talið av móttakarum er eisini økt nakað í tíðarskeiðinum, men sum nevnt finnast ikki skipaðar skrásetingar um hvussu leingi hvør hevur verið í skipanini:

***Talva 38: Tal av móttakarum í sambandi við mista arbeiðsinntøku***

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tal av móttakarum** | 164 | 166 | 195 | 186 | 196 | 181 |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Við eini lógarbroyting frá 2003 varð landsstýrismaðurin heimilaður í kunngerð at áseta neyvari reglur um útreiðslur til endurgjald fyri inntøkumiss. Landsgrannskoðarin hevur í fleiri ár havt viðmerkingar hesum viðvíkjandi. Fyrsta kunngerð av hesum slag varð sett í gildi frá 1. juli 2009. Í kunngerðini er ásett, at endurgjald ikki verður veitt fyri tann partin av inntøkuni, sum er omanfyri 25.000 kr. um mánaðin, og heldur ikki fyri mistum eftirlønargjaldi.

Áðrenn kunngerðin kom í gildi varð fult endurgjald veitt fyri inntøkumissin – t.v.s. at bæði løn og eftirløn varð goldið av Almannastovuni.

### *4.6.1.2 Meirútreiðslur til heilivág*

***Talva 39: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í meirútreiðslunum til heilivág***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Meirútreiðslur til heilivág** | 3.958 | 4.150 | 5.464 | 4.922 | 5.143 | 6.881 |

*Kelda: Búskaparskipan Landsins.*

Sum tað sæst av tølunum omanfyri er hend ein hækking upp á 74% í útreiðslunum til heilivág til brekað børn í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008.

Útreiðslurnar til heilivág hava verið generelt hækkandi á øllum almannaøkinum seinastu árini, t.d. til fólka- og fyritíðarpensjónistar. Í so máta er økingini í meirútreiðslum til heilivág til brekað børn onki undantak. Tað er onki ítøkiligt, ið forklárar økingina.

### *4.6.1.3 Annað*

***Talva 40: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðslunum til "annað"***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Annað** | 5.466 | 6.243 | 5.964 | 6.323 | 8.382 | 10.213 |

*Kelda: Búskaparskipan Landsins.*

Annar kostnaður fevnir um eina breiða viftu av meirútreiðslum til brekað børn so sum ríðing, fysioterapi, blæur, kostískoyti og optik.

Annar kostnaður er í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 hækkaður við 87%. Sum tað sæst av talvuni hendi hækkingin serliga frá 2006 til 2008. Ein útreiðsla, sum hækkar lutfalsliga nógv frá 2007 til 2008, er stuðul til ergoterapi. Annars er ein generell hækking á flestu av nevndu veitingum.

Við gildi frá mai 2009 er ein kunngerð lýst á økinum, har ásett er, hvørjar viðgerðir kunnu stuðlast.

### 4.6.2 Endurbúgving

Útreiðslurnar til endurútbúgving kunnu greinast soleiðis:

***Talva 41: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 til endurbúgving***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vanlig endurútbúgving | 12.890 | 14.226 | 12.673 | 13.173 | 11.833 | 13.661 |
| Vart arbeiði | 1.937 | 4.805 | 7.091 | 8.116 | 10.236 | 15.209 |
| Gjald fyri stovnar í Danmark | 550 | 1.685 | 2.487 | 3.348 | 4.300 | 11.592 |
| **Til samans** | **15.377** | **20.716** | **22.251** | **24.637** | **26.369** | **40.462** |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Útreiðslurnar til endurútbúgving eru hækkaðar úr 15 mió.kr. í 2003 til 40 mió.kr. í 2008, ella um 163%. Hækkingin stavar frá vardum størvum og stovnsplássum í Danmark.

Av viðmerkingunum frá landsgrannskoðaranum fyri 2007 sæst, at landsgrannskoðarin í fleiri ár hevur heitt á Landsstýrið um at áseta gjøllari reglur um stuðul til endurútbúgving o.a. Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar hevur landsgrannskoðarin í oktober 2007 víst á fleiri ivamál viðvíkjandi umsitingini av endurútbúgvingarútreiðslunum. Í frágreiðing frá juli 2008 um "kanning av 15 endurútbúgvingarmálum hjá Almannastovuni" heitir Løgtingsins Umboðsmaður á landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum um " at umhugsa at áseta meiri útgreinaðar reglur á endurútbúgvingarøkinum."

Í september 2008 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at vegna vantandi arbeiðsorku hevur ikki verið møguligt at fáa gongd á arbeiðið at áseta reglur fyri endurútbúgving í kunngerð, men at ætlanir eru um at fara undir arbeiðið seinni í ár.

Tað tykist sostatt greitt, at tað hevur verið tørvur á at áseta gjølligari reglur fyri umsiting av endurbúgvingarøkinum. Tað ber tó ikki til at siga nakað um, hvørja ávirkan manglandi reglur hava havt á útreiðslustøðið.

### *4.6.2.1 Vanlig endurútbúgving*

Fólk við skerdum arbeiðsførleika kunnu fáa endurbúgvingarstuðul, um tað er ein neyðug fortreyt fyri, at tey kunnu gerast fíggjarliga sjálvbjargin.

Gongdin í útreiðslunum seinastu árini hevur verið hendan:

***Talva 42: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðslum til vanligari endurbúgving***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vanlig endurútbúgving | 12.890 | 14.226 | 12.673 | 13.173 | 11.833 | 13.661 |

*Kelda: Búskaparskipan Landsins.*

Frá 2003 til 2008 eru útreiðslurnar øktar við 771 tkr. til endurútbúgving.

Útreiðslan til endurútbúgving hevur verið rímiliga støðug í tíðarskeiðinum eins og talið av brúkarum, sí talvu niðanfyri. Verður hædd tikin fyri lønarvøkstrinum í sama tíðarskeiði er talan reelt um ein lítla lækking.

***Talva 43: Tal av persónum í vanligari endurútbúgving***

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ymiskir persónar í árinum | 193 | 194 | 205 | 208 | 176 | 203 |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Skrásetingin av upplýsingum viðvíkjandi endurútbúgving er ófullfíggjað, m.a. finnast ongi nágreinilig hagtøl yvir hvussu nógv fólk *í miðal* hava verið í skipanini í tíðarskeiðinum.

### *4.6.2.2 Vart arbeiði*

Skipanin við vardum arbeiði er ein gomul skipan. Aðalsjónarmiðið við skipanini er, at fólk við skerdum arbeiðsføri, í staðin fyri óvirkin at taka ímóti almannaveiting, skulu hava møguleika fyri at vera virkin í arbeiðslívinum og nýta teirra restarbeiðsevni.

Tá ið vard størv verða sett á stovn, verða lønar- og onnur setanarviðurskifti avtalað. Útgangsstøðið er sáttmálalønin á arbeiðsmarknaðinum. Arbeiðsgevarin rindar fulla løn og fær endurgoldið eitt lønarískoyti frá Almannastovuni upp á ein triðing, helmingin ella tveir triðingar av lønini treytað av arbeiðsførleikanum hjá arbeiðstakaranum.

***Talva 44: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðsluni til vart arbeiði***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vart arbeiði | 1.937 | 4.805 | 7.091 | 8.116 | 10.236 | 15.209 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 er útreiðslan til vart arbeiði økt frá 2 mió.kr. til 15 mió.kr. Í sama tíðarskeiði er talið av fólki, sum hava verið í skipanini í styttri ella longri tíð, økt frá 28 til 140:

### *Talva 45: Tal av fólkum í vardum stavi*

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Persónar í skipanini** | 28 | 44 | 58 | 79 | 111 | 140 |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Skrásetingin av upplýsingum viðvíkjandi vardum arbeiði er ófullfíggjað, m.a. finnast ongi nágreinilig hagtøl yvir hvussu nógv fólk *í miðal* hava verið í skipanini í tíðarskeiðinum.

Hækkingin í útreiðsluni til vard størv skyldast, at ein nýggj vegleiðing um vard størv frá 2002 setti meira fokus á økið, og var hetta byrjanin til eina øking í talinum av vardum størvum.

Stóri vøksturin í 2007 og 2008 skyldast, at arbeiðsmarknaðardeildin á Almannastovuni varð uppraðfest í fíggjarlógini fyri 2007 (økt játtan til 3 starvsfólk). Sostatt eru munandi fleiri mál avgreidd síðan tá. Tað skal viðmerkjast, at Almannastovan í fíggjarlógini fyri 2009 fekk eina skerda játtan, og sambært Almannastovuni er ein av avleiðingunum, at viðgerðin av endurbúgvingarmálum verður niðurraðfest. Talið av óavgreiddum málum er økt nógv seinastu tíðina í 2009.

Ein viðkomandi spurningur í sambandi við stóru økingina í talinum av vardum størvum er, um talið av fólkum í øðrum skipanum er minkað tilsvarandi. Spurningurin er ikki kannaður í Føroyum, men tað kann staðfestast, at tilgongdin til fyritíðarpensjón ikki er minkað, hóast fleiri fólk eru komin í vart starv.

Við betur skipaðum skrásetingum av brúkarum av ymsu skipanunum vildi verið møguligt betur at mett um týdningin av teimum átøkum, sum verða sett í verk, herundir ávirkanin á ymsu veitingarsløgini.

Sum útgangsstøði er skipanin við vardum starvi ein bíligari loysn fyri landskassan enn aðrar almennar skipanir, so sum fyritíðarpensjón, tí undir hesi skipan rindar arbeiðsgevarin ein part av útreiðslunum umframt at skattur verður goldin til landskassan av samsýningini. Aðrir fyrimunir við skipanini eru, at brúkarin er virkin og harvið mennist sosialt og mentalt, sum so aftur sparir heilsuverkinum og almannaverkinum fyri pengar.

Almannastovan ger við ávísum millumbilum eina statusuppgerð, sum vísir, hvussu nógv fólk eru í skipanini, og hvussu býtið er millum ymsu endurgjaldsbólkarnar.

***Talva 46: Tal av fólkum í vardum stavi og býti millum endurgjaldsbólkar***

| | jul-06 | % | okt-08 | % |
|---|---|---|---|---|
| 1/3 frá Almannastovuni | 24 | 32% | 47 | 37% |
| 1/2 frá Almannastovuni | 31 | 41% | 50 | 39% |
| 2/3 frá Almannastovuni | 13 | 17% | 24 | 19% |
| Onnur gomul lønarbýti, 40-60 og eitt 90-10 | 7 | 9% | 6 | 5% |
| **Til samans í vardum starvi** | **75** | **100%** | **127** | **100%** |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Av tølunum omanfyri sæst, at av samlaðu útreiðslunum av skipanini rindar arbeiðsgevarin í umleið 80% av førunum meiri enn helmingin av útreiðslunum.

### *4.6.2.3 Gjald fyri stovnar í Danmark*

Fólk við skerdum arbeiðsførleika, sum hava rætt til endurbúgvingarstuðul, hava møguleika fyri at sleppa á skúla v.m. í Danmark, um hetta er ein fyritreyt fyri at tey aftur kunnu gerast fíggjarliga sjálvbjargin.

***Talva 47: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðsluni til gjald fyri stovnar í Danmark***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Gjald fyri stovnar í Danmark | 550 | 1.685 | 2.487 | 3.348 | 4.300 | 11.592 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Talan hevur verið um ein lutfalsliga stóran útreiðsluvøkstur á hesi konto frá 2003 til 2008, serliga frá 2007 til 2008.

***Talva 48: Tal av persónum***

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ymiskir persónar í árinum | 10 | 11 | 20 | 32 | 28 | 32 |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 er talið av persónum í skipanini hækkað úr 10 upp í 32. Hóast stóra útreiðsluvøksturin frá 2007 til 2008 er talið av persónum í skipanini einans økt við 4 frá 2007 til 2008 og eindarprísurin er tískil hækkaður frá 154 tkr. í 2007 til 362 tkr. í 2008.

Sambært Almannastovuni skyldast útreiðsluvøksturin, at nýggju fyriskipanirnar, sum eru settar ígongd, eru ógvuliga kostnaðarmiklar umframt at tað eru borgarar, ið hava havt tørv á at flyta frá lutfalsliga bíligum til munandi dýrari fyriskipanir.

Harumframt eru nøkur nýggj fólk komin inn í skipanina, sum ikki áður hava figurerað í endurbúgvingarhøpi. Talan er um ung fólk við sverum ADHD, DAMP o.l. symptomum, sum áður vildu verið undir vanligari og longdari barnaforsorg. Talan er um útreiðslur, sum kommunur áður hava avhildið sambært barnaforsorgarlógini.

Almannastovan upplýsir harafturat, at onkur útreiðsla fyri 2007 er bókað í 2008. Øll málini eru ikki gjøgnumgingin, so til ber ikki at siga nágreiniliga, hvussu nógv talan er um.

### 4.6.3 Hjálparráð

Niðanfyri er útreiðslan til hjálparráð einstøku árini nærri sundurgreinað:

***Talva 49: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðsluni til hjálparráð***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Kostískoyti o.a. | 1.469 | 1.647 | 1.838 | 2.319 | 2.788 | 3.286 |
| Heilivágur | 6.244 | 6.068 | 6.470 | 6.732 | 6.035 | 7.030 |
| Tannviðgerð | 686 | 872 | 868 | 992 | 1.152 | 1.408 |
| Protesur | 1.109 | 1.255 | 1.573 | 1.394 | 1.546 | 985 |
| Ortopediskur fótbúnaður | 1.320 | 1.583 | 2.036 | 2.498 | 2.500 | 2.819 |
| Hoyritól | 9.443 | 5.926 | 6.218 | 6.950 | 7.101 | 3.573 |
| Bústaðarbroytingar | 2.592 | 2.772 | 2.825 | 1.525 | 4.039 | 2.983 |
| Avlamisbilar | 5.089 | 2.086 | 2.086 | 2.887 | 5.048 | 7.014 |
| Koyristólar | 3.870 | 2.439 | 3.078 | 2.697 | 3.848 | 1.965 |
| MVG | 3.757 | 2.773 | 2.571 | 2.237 | 3.114 | 3.319 |
| Annar stuðul | 12.811 | 12.879 | 12.426 | 13.533 | 14.281 | 17.071 |
| **Til samans** | **48.390** | **40.300** | **41.989** | **43.764** | **51.452** | **51.453** |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Sum tað sæst av tølunum omanfyri er útreiðslan til hjálparráð sett saman av nógvum, ymsum útreiðslum, har eindarprísurin varierar nógv. Fyri onkur øki er talan um ein javnan vøkstur, meðan tað eru lutfalsliga stórar broytingar einstøku árini á øðrum økjum, t.d. avlamisbilar. Rakstrarkostnaðurin fyri hoyritól er t.d. lækkaður úr 9 mió.kr. í 2003 til 3,5 mió.kr. í 2008.

2003 var eitt óvanligt ár, har tað 2 ferðir var neyðugt at biðja um eykajáttan til økið. Grundgevingin í seinnu umbønini um eykajáttan var, at umsitingin hevur lagt eyka orku í at avgreiða fleiri umsóknir. Sammett við 2002 hækkaði útreiðslan í 2003 við 11,2 mió.kr.

Størstu hækkingarnar í 2003 sammett við 2002 vóru útreiðslurnar til hoyritól, sum øktust við 5,1 mió.kr., koyristólar, sum øktust við 1,6 mió.kr. og mvg-útreiðslan, sum øktist við 1,3 mió.kr.

Eftir óvanliga árið 2003 lækkaði útreiðslan í 2004 nærum niður á støðið í 2002.

Gongdin í árunum 2004 til 2006 var nøkulunda jøvn, meðan útreiðslan í 2007 økist við 7,7 mió.kr. Størsta einstaka broytingin er "bústaðarbroytingar", sum hækkaði við 2,5 mió.kr., sí viðmerking niðanfyri, umframt at kostnaðurin av avlamisbilum hækkar við 1,2 mió.kr. og kostnaðurin av koyristólum hækkar við 1,1 mió.kr.

Lækkingin í "bústaðarbroytingar" frá 2005 til 2006 skyldast, at ein kærunevndaravgerð hevði við sær, at hjálpitólamiðstøðin var avmarkað í at gera bústaðarbroytingar í 2006, og sostatt var 2006 óvanliga lágt. Tað merkir so aftur, at nógvar umsóknir bíðaðu til 2007 umframt vanliga virksemið.

Lækkingini í kostnaðinum til hoyritól frá 2007 til 2008 skyldast, at ein partur av játtanini til hetta økið er flutt frá Hjálparráð til Landssjúkrahúsið.

Einasta skipaða skráseting av hagtølum, sum gevur nakra ábending um virksemið á økinum er tal av umsóknum.

***Talva 50: Tal av umsóknum***

| Tal av umsóknum | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Kropsborin** | 3.038 | 2.827 | 2.826 | 2.678 | 2.661 | 2.300 |
| **Ikki kropsborin** | 1.754 | 1.982 | 1.898 | 1.835 | 1.961 | 1.935 |
| **Hjálparamboð v.m. § 18 Umsóknir** | **4.792** | **4.809** | **4.724** | **4.513** | **4.622** | **4.235** |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Sambært móttiknum upplýsingum er tað bert ein heilt lítil partur av umsóknunum, sum ikki verður gingin á møti.

Sum nevnt omanfyri verður í løtuni arbeitt við at nágreina økið nærri.

### 4.6.4 Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16

Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum eftir § 16 er ætlað fólki, ið hava eina psykiatriska diagnosu (Asberger/ADHD) ella eru sálarsjúk, eru seinment ella menningartarnað ella eru atferðartrupul v.m. Talan kann bæði verða um uppihald á serligum stovnum undir Nærverkinum ella uttanlands. Uppihaldið fevnir um viðgerð kombinerað við skúla, búvenjing og/ella avkláring av arbeiðsevni.

Útreiðslurnar seinastu árini hava verið hesar:

***Talva 51: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðsluni til viðgerð á serligum stovnum***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 | 0 | 263 | 542 | 388 | 3.765 | 3.306 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Sum tað sæst av útreiðslutølunum er tað ikki fyrr enn í 2007, at tænastur til fólk við víðfevndum sálarligum ella kropsligum breki verða veittar eftir grein 16 í forsorgarlógni. Frammanundan hevur kostnaðurin av uppihaldi á serligum stovnum verið fíggjaður eftir grein 18 viðvíkjandi endurbúgving.

Orsøkin til broyttu mannagongdina skyldast eina kæruavgerð, har kærunevndin gjørdi vart við, at umsóknin var viðgjørd eftir skeivari grein.

***Talva 52: Tal av persónum***

| | | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ymiskir persónar í árinum | | - | - | - | 1 | 6 | 13 |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

Broytta mannagongdin hevur viðført, at samlaða játtanin fyri 2009 er upp á 12 mió.kr. harav 5,5 mió.kr. eru fluttar frá grein18, endurbúgving.

Í mun til stovnsuppihald smb. grein 18 um endurbúgving, so skal landsstýrismaðurin í hvørjum einstøkum føri góðkenna stovnsuppihald sambært grein 16.

### 4.6.5 Samandráttur

Av samlaða vøkstrinum upp á 39,6 mió.kr. stava umleið 14 mió.kr. frá generellum lønar- og prísvøkstri. Vegna vantandi hagtøl er torført at gera eina neyva uppgerð av, hvat restin av hækkingini skyldast. Tó kann sigast, at virksemið er økt á hesum økjum:

- Endurútbúgving: útreiðslan til vart arbeiði er hækkað úr 1,9 mió.kr. í 2003 til 15,2 mió.kr. í 2008. Orsøkin til hetta er, at arbeitt hevur verið miðvíst at sett vard størv á stovn. Talið av vardum størvum er hækkað javnt øll árini úr 28 í 2003 til 140 í 2008. Tað mangla skipað hagtøl fyri, hvussu leingi hvør einstakur hevur verið í skipanini.
- Endurútbúgving: útreiðslan til gjald fyri stovnar í Danmark er hækkað úr 0,5 mió.kr. í 2003 til 11,6 mió.kr. í 2008. Talið av fólki sum eru farin í endurútbúgving á stovni í Danmark er hækkað úr 10 í 2003 til 32 í 2008. Tað mangla skipað hagtøl fyri, hvussu leingi hvør einstakur hevur verið í skipanini.

- Meirútreiðslur brekað barn: Talið av brúkarum er økt úr 490 í 2003 til 568 í 2008. Viðmerkjast skal, at tað ikki er vist, at talið av brúkarum sigur nakað um virksemi. Harafturat skal sigast, at tað ikki eru børnini, sum verða skrásett, men foreldrini.

Á forsorgarøkinum kann generelt staðfestast, at tað ígjøgnum fleiri ár hevur verið tørvur á at seta kunngerðir í gildi, sum nærri áseta treytir fyri veitingum eftir forsorgarlógini.

Í hvønn mun manglandi kunngerðir hava ávirkað útreiðsluna á forsorgarøkinum er torført at meta um, men tað er ein sannroynd, at á forsorgarøkinum skulu í nógvum førum gerast ítøkiligar metingar í sambandi við útgjaldsmál. Tí kann tað tykjast løgið, at arbeiðið við at gera kunngerðir ikki hevur verið hægri raðfest.

Í 2009 eru fleiri av umrøddu kunngerðum lýstar.

Generelt kann staðfestast, at tað mangla neyv hagtøl viðvíkjandi virkseminum á forsorgarøkinum. Mælt verður til, at neyvari virksemistøl verða skrásett á m.a. hesum økjum:

- vardum størvum
- endurbúgving
- endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku
- hjálparráðum

Meting má gerast í hvørjum einstøkum føri um, hvørji virksemistøl eru viðkomandi.

## 4.7 Fyritíðarpensjón

Persónar millum 18-67 ár kunnu fáa fyritíðarpensjón, um arbeiðsførið varandi er niðursett orsakað av sjúku, avlamni ella øðrum serligum grundum.

Tað eru trý ymisk fyritíðarpensjónsstig: hægsta, miðal, og lægsta fyritíðarpensjón. Fyritíðarpensjónin verður veitt vegna niðursett arbeiðsføri ella einkjustøðu. Hægsta og miðal fyritíðarpensjón eru samansettar av grundupphædd, viðbót og avlamisviðbót, meðan lægsta fyritíðarpensjón er samansett av grundupphædd, viðbót og eini eykaviðbót. Støddin av viðbótini er treytað av pensjónsstiginum. Avlamisviðbót er óheft av aðrari inntøku. Grundupphædd, viðbót og eykaviðbót lækka við 60% fyri hvørja vunna krónu omanfyri inntøkuloftið, sum árliga verður javnað. Mótrokningarprosentið varð lækkað til 30% í 2008.

Um hægsta, miðal ella lægsta fyritíðarpensjón verður veitt er treytað av aldri, hvussu nógv arbeiðsførið er niðursett og orsøkina til niðursetta arbeiðsførið.

Fyritíðarpensjónistar hava harumframt rætt til aðrar viðbøtur, sum eru barnaviðbót, hjálparviðbót, røktarviðbót og persónliga viðbót.

Grundupphæddin, viðbótin og avlamisviðbótin hjá fyritíðarpensjónistunum eru seinastu árini generelt hækkaðar við 4% árliga, soleiðis sum ásett í lóg um javning av almannaveitingum[14]. Umframt generellu hækkingina upp á 4% verður í 2008 latin ein eyka viðbót á 15.360 kr. til lægstu fyritíðarpensjónistar; eyka viðbótin hækkar til 31.644 kr. í 2009. Samlaða økingin hjá lægstu fyritíðarpensjónistunum er sostatt áleið 23% frá 2007 til 2008.

Harumframt er brennistudningurin, sum verður veittur eftir serligari lóg, hækkaður við 25% frá 2007 til 2008 svarandi til eina hækking á 1.368 kr. Brennistudningur verður tó bert veittur til teir pensjónistar, sum lúka ávísar inntøkutreytir.

Høvuðskontan "Fyritíðarpensjón" fevnir um undirkontur fyri fyritíðarpensjón, avlamisveiting umframt læknaváttanir, sí niðanfyri:

***Talva 53: Gongdin í tíðarskeiðinum 2003 til 2008 í útreiðslunum til fyritíðarpensjón***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hægsta fyritíðarpensjón** | 81.480 | 80.001 | 81.045 | 88.685 | 89.886 | 97.913 |
| **Miðal fyritíðarpensjón** | 78.003 | 80.697 | 80.999 | 89.237 | 86.202 | 95.322 |
| **Lægsta fyritíðarpensjón** | 28.719 | 30.254 | 31.461 | 33.138 | 32.423 | 41.091 |
| **Avlamisveiting** | 2.318 | 2.504 | 2.388 | 2.488 | 2.573 | 2.620 |
| **Læknaváttanir** | 0 | 0 | 0 | 391 | 318 | 874 |
| **Til samans** | **190.520** | **193.456** | **195.893** | **213.939** | **211.402** | **237.820** |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Sum tað sæst omanfyri er nettoútreiðslan á høvuðskontuni "Fyritíðarpensjón" hækkað við 25% í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008. Sæð yvir alt tíðarskeiðið er talið av fyritíðarpensjónistum nærum óbroytt, sí talvu niðanfyri.

***Talva 54: Tal av fyritíðarpensjónistum***

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hægsta** | 546 | 535 | 534 | 544 | 554 | 567 |
| **Miðal** | 801 | 810 | 790 | 810 | 801 | 796 |
| **Lægsta** | 424 | 414 | 413 | 406 | 398 | 409 |
| **Avlamisveiting** | 85 | 89 | 86 | 85 | 81 | 82 |
| **Tal av fyritíðarpensionistum** | **1.857** | **1.848** | **1.823** | **1.845** | **1.833** | **1.852** |

*Kelda: Almannamálaráðið.*

[14] Lógin um javning av almannaveitingum er í 2008 broytt, soleiðis at grundupphæddin, viðbótin og avlamisviðbótin frá 2009 at rokna verða hækkaðar við 3% og ikki við 4% sum undanfarin ár.

Talið av fyritíðarpensjónistum er á sama støði í 2008 sum í 2003, tó soleiðis, at tað hava verið smærri broytingar frá einum ári til annað. Talið av hægstu fyritíðarpensjónistum er hækkað við 21 persónum, meðan talið av lægstu fyritíðarpensjónistum er lækkað við 15 persónum.

Ein framskriving av staðfestu útreiðslunum í 2003 til 2008 við teimum lógarásettu hækkingunum, sum hava verið árliga, samsvarar væl við tær útreiðslur, sum eru staðfestar fyri 2008, t.v.s. at útreiðsluøkingin í tíðarskeiðinum í høvuðsheitum stavar frá, at satsirnir til fyritíðarpensjónistar verða hækkaðir árliga, soleiðis sum ásett í lógini.

Hóast satsirnir fyri allar fyritíðarpensjónistar hækkaðu við 4% fyri árini 2003 til 2005 er talan um ein útreiðsvøkstur í hesum tíðarskeiðinum, sum liggur væl niðanfyri hetta. Orsøkin er, at talið av fyritíðarpensjónistum í hesum tíðarskeiði lækkaði við 36 persónum.

Útreiðsluvøksturin frá 2006 til 2008 er hinvegin væl omanfyri nevndu 4%, og er ein av orsøkunum, at talið av pensjónistum í hesum tíðarskeiði hækkar við 34 persónum.

Stóri útreiðsluvøksturin frá 2005 til 2006 skyldast, at Almannastovan í 2006 yvirtók avgerðarmyndugleikan á fyritíðarpensjónsøkinum frá Vanlukkutryggingarráðnum og í tí sambandinum avgreiddi yvir 100 gamlar umsóknir. Avgreiðslan av umsóknunum merkti lutvíst, at fleiri fyritíðarpensjónistar komu inn í skipanina umframt at eftirgjøldini[15] hetta árið vóru størri enn vanligt orsakað av avgreiðslu av fleiri málum.

Sambært Almannastovuni skyldast hækkingin frá 2007 til 2008 lutvíst, at eftirgjøldini eru hægri í 2008 enn undanfarin ár, at fleiri fólk, sum fáa hægstu og miðal fyritíðarpensjón forvinna minni enn árið fyri, umframt at tey hava staðfest eina minking í tali av fólki, sum hava inntøku omanfyri mótrokningarfríu upphæddina. Sum nevnt omanfyri lækkaði mótrokningarprosentið frá 60% í 2007 til 30% í 2008, og varð upprunaliga væntað, at inntøkurnar hjá fyritíðarpensjónistum fóru at hækka og harvið minka um útgjaldið av fyritíðarpensjón.

Hægsta og miðal fyritíðarpensjónin eru hækkaðar við 22,5% í tíðarskeiðinum, meðan lægsta fyritíðarpensjónin er hækkað við 43,5%. Til samanberingar kann nevnast, at generella lønarhækkingin í sama tíðarskeiði var áleið 17,5% íroknað arbeiðsmarknaðargjøld.

### 4.7.1 Samandráttur

Útreiðsluvøksturin upp á 47 mió.kr. í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2008 samsvarar væl við lógarásettu hækkingina í fyritíðarpensjónum.

Talið av fyritíðarpensjónistum er nærum óbroytt í tíðarskeiðinum.

[15] Eftirgjald: ein viðgerð av einum fyritíðarpensjónsmáli kann taka upp í 2 ár. Verður umsóknin gingin á møti, hevur móttakarin rætt til fyritíðarpensjón frá tí at umsóknin varð innlatin og verður hetta goldið afturút.

# 5 Játtanartilgongd

Niðanfyri er í stuttum lýst hvussu játtanartilgongdin (fíggjarlógartilgongdin) er skipað. Lýsingin er skipað soleiðis, at fyrst verður greitt frá lógarverkinum og teimum mannagongdum, sum eru galdandi í sambandi við gerð av fíggjarlóg og eykajáttanu og síðani verða einstøku høvuðskonturnar gjøgnumgingnar.

Greiningin tekur støði í samrøðum við ábyrgdarhavandi starvsfólk á ymsu økjunum, tað verði seg starvsfólk á ymsu stovnunum, embætisfólk við ábyrgd av fíggarlógararbeiðinum umframt áliti um játtanarskipan landsins frá 24. februar 2006, ið varð gjørt í sambandi við gerð av uppskoti til løgtingslóg um landsins játtanarskipan (játtanarlógin).

## 5.1 Stýrisskipanarlógin

Í stýrisskipanarlógini frá 1994 verða yvirskipaðu reglurnar um játtanartilgongdina ásettar í grein 41 til 44. Stýrisskipanarlógin fyriskrivar, at landsstýrið leggur fyri Løgtingið fýra sløg av játtanarlógum:

- fíggjarlóg
- eykajáttan við løgtingslóg
- eykajáttan við fíggjarnevndarskjali
- bráðfeingis játtanarlóg (um fíggjarlógarviðgerðin ikki er liðug áðrenn fíggjarárið byrjar)

Av stýrisskipanarlógini sæst, at uppskot til fíggjarlóg skal verða lagt fyri tingið í seinasta lagi 1. oktober árið fyri.

Burtursæð frá ásetingunum í stýrisskipanarlógini hava ongar formligar reglur verið galdandi fyri fíggjarlógararbeiðið til uppskotið verður lagt fyri tingið.

Í rundskrivi nr. 2/2000 frá løgmansskrivstovuni um lógarsmíð eru ásetingar um krøv til innihaldið í viðmerkingum til løgtingslógaruppskot, sum verða løgd fyri tingið. Sambært ásetingunum í rundskrivinum skal í hvørjum einstøkum føri metast um fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar, umsitingarligar avleiðingar, umhvørvisligar avleiðingar, avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur og sosialar avleiðingar. Nevnda rundskriv er ikki galdandi fyri fíggjarlógaruppskot.

Arbeiðið við at gera eina fíggjarlóg hevur tískil verið skipað eftir eini siðvenju, sum hevur verið nærum óbroytt nógv tey seinastu árini.

Við støði í løgtingssamtykt frá 1. mars 2005 samtykti formansskapur løgtingsins hin 16. mars 2005 at seta ein arbeiðsbólk við serkønum fólki at fyrireika uppskot til eina játtanarlóg, sum skal seta treytir og skipa mannagongdir fyri játtanum. Álitið varð lagt fram í februar 2006, og við løgtingslóg nr. 42. frá 4. mai 2009 er nýggj játtanarlóg samtykt at koma í gildi við neyðugum tillagingum fyri fíggjarlógaruppskotið 2010.

Sambært nýggju lógini skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyri 1. apríl leggja fram uppskot til løgtingssamtykt, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár, býtt á greinar.

Saman við uppskotinum um játtanarkarm verður lagt við ein búskaparfrágreiðing, sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, herímillum tann almenna geiran.

Samstundis sum fíggjarlógaruppskotið verður lagt fram, leggur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fram eina frágreiðing, sum gjølligari lýsir og metir um innihaldið í fíggjarlógaruppskotinum og greiðir frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum.

## 5.2 Ábyrgdarbýti í sambandi við fíggjarlógina

Av grein 43 í stýrisskipanarlógini sæst, at tað er landsstýrið, sum leggur fíggjarlógaruppskot fyri tingið. Av stýrisskipanarlógini sæst harumframt, at tað er løgmaður sum býtir málsøkini millum landsstýrisfólkini, at hesi sita fyri málsøkjunum hvør sær og hava rættarliga ábyrgd av teimum málsøkjum, sum eru løgd til teirra at umsita.

### 5.2.1 Landsstýrismaðurin í almannamálum

Landsstýrismaðurin í almannamálum situr fyri teimum høvuðskontum, sum eru fevndar av hesi greining.

Landsstýrismaðurin í almannamálum skal m.a. tryggja, at ongin útreiðsla verður avhildin á almannaøkinum uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, sum er í gildi, tá ið ávíst verður. Landsstýrismaðurin í almannamálum má sostatt skipa so fyri, at uppskot til fíggjarlóg er hóskandi til at dekka útreiðslurnar til ásetta og ætlaða virksemið.

Sum ein liður í at tryggja omanfyrinevnda verður uppskotið til fíggjarlóg gjørt við støði í upplýsingum og tilmælum, sum verða latin landsstýrismanninum frá ávikavist Almannastovnuni og Nærverkinum, Meginskrivstovuni, sum hava dagligu umsitingina av teimum høvuðskontum, sum eru fevndar av hesi greining.

### 5.2.2 Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur eina tvørgangandi og samskipandi uppgávu í sambandi við játtanartilgongdina. Mannagongdin er tann, at tað er landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sum tekur avgerð um innihaldið í fíggjarlógaruppskotinum, eykajáttanar-lógum og fíggjarnevndarskjølum, og sum høvuðsregla ger viðmerkingar til slík uppskot.

Tilfar til uppskot og viðmerkingar á grein 8 hevur hann tó fingið frá landsstýrismanninum í almannamálum.

### 5.2.3 Løgtingið

Tað er Løgtingið, sum tekur endaliga støðu til eitt fíggjarlógaruppskot íroknað møguligar broytingar. Løgtingið má kunna líta á, at upplýsingarnar í fíggjarlógaruppskotinum eru

rættar og nøktandi, og at upphæddirnar eru hóskandi, tað vil siga ikki ov stórar ella ov smáar, men grundaðar á bæði framrokningar, grundgivnar ætlanir og broytingar annars, sum eru í væntu.

Umframt sjálva játtanarupphæddina innihalda fíggjarlógaruppskot viðmerkingar til upphæddirnar, herundir í nøkrum førum virksemistøl, t.d. tal av búfólkum og tal av starvsfólkum v.m. Komið er eftir, at hesi virksemistøl í fleiri førum ikki eru heilt neyv. Mælt verður til, at umsitingin er neyvari, tá ið virksemistøl verða ásett í fíggjarlógar-uppskotum.

## 5.3 Tíðarætlan í sambandi við fíggjarlógararbeiði

### 5.3.1 Fíggjarlógin

Onki hevur verið ásett í higartil galdandi játtanarskipan viðvíkjandi tíðarætlan uttan tað, at fíggjarlógaruppskotið skal vera lagt fyri tingið í seinasta lagi 1. oktober.

Vanligt er, at fíggjarlógararbeiðið byrjar í februar mánað og skal sum útgangsstøði fylgja eini tíðarætlan, sum Fíggjarmálaráðið leggur fyri ymsu ráðini í byrjanini av árinum.

Sambært hesi ætlan

- verður frá februar til mai mett um lógarbundnu útreiðslurnar, fundir verða hildnir um búskaparligu útlitini, framrokningar verða gjørdar av inntøkum og útreiðslum og fundir verða hildnir við ymsu ráðini um fyribils karm fyri greinina.
- skal Fíggjarmálaráðið í mai koma við uppskoti til samlaðan karm fyri hvørja grein sær býtt á játtanarsløg.
- byrja politisku samráðingarnar hereftir í landsstýrinum og í samgonguni, og endamálið er at fáa eina semju um samlaða karmin á ymsu greinunum um miðjan juni, soleiðis at seinasta hond kann verða løgd á fíggjarlógaruppskotið.
- verður endaliga fíggjarlógaruppskotið lagt fyri tingið seint í september.
- verða møgulig broytingaruppskot sent fíggjarnevndini í november.

Hóast málið er at fáa politiska semju um fíggjarlógaruppskotið um miðjan juni, hevur í royndum ikki eydnast at fáa semju fyrr enn um hálvan september stutt áðrenn fíggjarlógaruppskotið skal vera lagt fyri Løgtingið.

Sum víst á síðu 76 í álitinum um nýggja játtanarlóg frá februar 2006 hava politisku samráðingarnar um fíggjarlógina lyndi til at gerast eitt stríð um, hvussu stóran part hvør landsstýrismaður skal fáa til sín av heildarkarminum og í minni mun snúð seg um, hvussu tey ymsu økini skulu raðfestast, eitt nú almanna-, skúla- og vinnumál.

Víðari verður sagt í álitinum, at avleiðingarnar av hesum eru:

- at í mongum førum er ov seint at gera avtalur um raðfestingar og fullnýtslu, ið skulu galda fyri komandi fíggjarár, og tær avtalur, sum verða gjørdar, eru mangan treytaðar av,

at eitt lógaruppskot verður gjørt. Hesar avtalur um lógarbroytingar verða ofta ikki settar í verk, annaðhvørt tí stundir ikki eru til tess ella tí at meiriluti kortini ikki er fyri hesum,

- at tað koma nógv broytingaruppskot til fíggjarnevndina, meðan fíggjarnevndararbeiðið fer fram, bæði um heildaruppskotið frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum og broytingaruppskot frá ymsu landsstýrismonnunum,
- ov lítil tíð til góðskutrygging og
- ikki stundir til at gera líkinda virksemisyvirlit.

Sostatt kann stutt sigast, at manglandi støðutakan til endaliga játtanarkarmin og býtið av sama millum ymsu greinarnar hevur verið viðvirkandi til, at endaliga játtanin ikki svarar til ítøkiliga tørvin, og at skotbráið til at gera eftirfylgjandi tillagingar av nýtsluni hevur verið stutt.

Sum víst á omanfyri er nýggj játtanarlóg sett í gildi við virknað frá 1. januar 2010. Í nýggju játtanarlógini er ásett, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyri 1. apríl leggur fram uppskot til løgtingssamtykt, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár, býtt á greinar. Sostatt skuldi verði betur stundir at gjørt neyðugar tillagingar innan hvørja grein.

### 5.3.2 Eykajáttan

Einastu ásetingarnar í stýrisskipanarlógini um tíðarætlan í sambandi við eykajáttanir snúgva seg um eykajáttanir við fíggjarnevndarskjali. Eykajáttan við fíggjarnevndarskjali verður nýtt, tá ið eitt mál hevur skund. Tá kann løgtingsins fíggjarnevnd eftir uppskoti frá landsstýrinum veita eykajáttan uttan so, at tveir fimtingar av nevndarlimunum krevja málið avgjørt við løgtingslóg. Eykajáttanir givnar við fíggjarnevndarskjali skulu leggjast fyri Løgtingið innan 1. desember.

Tá ið tíðarætlanin í sambandi við fíggjarlógararbeiðið verður send út frá Fíggjarmálaráðnum tíðliga á vári verður vanliga fráboðað, nær umbønir um eykajáttanir skulu verða Fíggjarmálaráðnum í hendi. Vanligt hevur verið, at tað í tíðarætlanini er tikið hædd fyri tveimum eykajáttanum, eini um várið og eini um heystið.

Hóast evstamark fyri seinnu umbønina vanliga hevur verið um miðjan august, so hevur arbeiðið við at avgreiða eykajáttanirnar í fleiri førum drigið út til november/desember seinastu árini.

Orsøkin til drúgvu tilgongdina í ávísum førum seinastu árini skyldast lutvíst, at tað hevur tikið langa tíð hjá Fíggjarmálaráðnum at fáa lagt uppskotið um eykajáttan fyri tingið og/ella at fíggjarnevndin hevur havt langa tíð um at avgreiða umbønirnar.

Eitt dømi um eina drúgva tilgongd í sambandi við eykajáttanarlóg er eykajáttanarlógin fyri november 2008.

Landsgrannskoðarin hevur skrivað notat um gongdina í hesum máli. Um gongdina í málinum kann stutt sigast, at:

- fyrrapartin í august gjørdist greitt í Almannaráðnum, at neyðugt var við eykajáttan.

- Almannamálaráðið spyr tann 19. august 2008 Fíggjarmálaráðið, nær umbøn um eykajáttan skal verða inni og fær munnliga at vita, at støða enn ikki er tikin til spurningin, men at tað væntandi verður um 2-3 vikur.
- 15. september verða nøkur landsstýrisfólk loyst úr embæti, og 26. september er nýggj samgonga skipað, sum byrjaði at arbeiða við eykajáttanarlóg samstundis sum arbeitt var við fíggjarlóg fyri 2009.
- 25. november 2008 varð uppskotið til eykajáttanarlóg lagt fyri tingið.
- fíggjarnevndin tók ikki undir við flestu eykajáttanunum, men vísti m.a. á, at fleiri umbønir ikki luku treytirnar í Stýrisskipanarlógini, har staðfest verður, at eingin útreiðsla kann verða hildin uttan játtan í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.
- broytingaruppskot frá fíggjarnevndini um at strika flestu eykajáttanirnar varð samtykt í tinginum.

Strikingin av eykajáttanum hevði við sær, at Almannamálaráðið í 2008 hevði eina lutfalsliga stóra meirnýtslu á lógarbundnu játtanunum.

Eykajáttanirnar, sum ikki vóru gingnar á møti, snúðu seg í stóran mun um lógarbundnar játtanir, og tá krevst lógarbroyting ella broyting í kunngerð fyri at minka um útreiðslurnar. Almannamálaráðið hevur upplýst, at orsakað av at noktandi svarið til eykajáttan kom so seint út á árið, var ikki møguligt at koma við broytingum í lógum og/ella kunngerðum, sum kundu fáa ávirkan á viðkomandi fíggjarár.

Landsgrannskoðarin endar sína frágreiðing við at siga, at hevði ein eykajáttanarlóg verið løgd fram og samtykt í august ella september 2008, høvdu meirnýtslurnar í 2008 verið væl minni.

Eitt dømi um langa avgreiðslutíð í tinginum er uppskot til eykajáttanarlóg fyri september 2009:

- landsstýrismaðurin í fíggjarmálum legði málið fyri tingið 9. september 2009,
- eftir 1. viðgerð tann 15. september 2009 varð málið beint í fíggjarnevndina,
- eftir at hava viðgjørt málið á fundum 16., 17., 22. og 23. september, 20. og 21. oktober skrivaði fíggjarnevndin álit tann 22. oktober,
- 2. viðgerð av málinum var tann 3. november 2009 og 3. og endaliga viðgerðin var tann 7. november 2009.

Tað hevur sostatt tikið umleið 2 mánaðir at avgreiða eykajáttanarlógina, harav fíggjarnevndin nýtti góðar 5 vikur til viðgerðina. Sambært ásetingunum í grein 32, stk. 2 í lóg um tingskipan landsins sæst, at "nevnd, sum mál er beint í, skal lata Løgtinginum álit í seinasta lagi 1 mánað eftir, at hon fekk málið beint frá formanninum".

Eitt tilsvarandi dømi er eykajáttanin fyri september 2006. Uppskotið varð lagt fyri tingið 28. september 2006, 1. viðgerð var 6. oktober 2006, fíggjarnevndin skrivaði álit 8. november 2006 og Løgtingið samtykti uppskotið 17. november 2006.

Seinnu árini eru eykajáttanaruppskotini í fleiri førum ikki endaliga avgreidd í tinginum fyrr enn í seinnu helvt av november, og tá er árið so langt liðið, at tað er torført at gera neyðugar tillagingar í virkseminum fyri restina av árinum.

Mælt verður til, at mannagongdir verða skipaðar, sum tryggja, at eykajáttanir verða avgreiddar fyrr, soleiðis at umsitingin hevur møguleika at gera tær tillagingar, sum eru neyðugar um umbønin ikki verður gingin á møti. Hetta kann antin gerast við, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggur uppskotið fyrr fyri tingið og/ella at avgreiðslutíðin í tinginum íroknað fíggjarnevndini verður stytt.

*Meirnýtsla viðvíkjandi lógarbundnum játtanum*

Seinnu árini hevur spurningurin fleiri ferðir verið frammi, hvørt tað er neyðugt við eykajáttan, tá ið talan er um meirnýtslu viðvíkandi lógarbundnum játtanum. Á aðrari síðuni hevur verið sagt, at hetta ikki er neyðugt, vísandi til at útreiðslan er játtað í aðrari lóg, meðan tað á hinari síðuni hevur verið sagt, at eykajáttan er neyðug, vísandi til Stýrisskipanarlógina, har tað verður staðfest, at ongin útreiðsla kann verða hildin uttan játtan í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

Løgfrøðingar, sum hava úttalað seg alment í fjølmiðlunum, hava verið ymiskir á máli um spurningin.

Sjónarmiðið um at eykajáttan ikki er neyðug, tá ið talan er um lógarbundnar útreiðslur, er ført fram av umsitingini og hetta er eisini tað, sum er galdandi í Danmark. Í "Budgetvejledning 2006" frá Finansministeriet sæst í petti 2.9.2:

*"For lovbundne udgifter gælder, at der kan afholdes merudgifter, der er en følge af, at det samlede tilskudsydelser i medfør af loven bliver større end skønnet ved budgetteringen"*

Sjónarmiðið um at eykajáttan er neyðug, hevur verið ásett í viðmerkingunum til fíggjarlógina nógv tey seinastu árini til og við 2009, men varð strikað í 2010 í sambandi við at nýggja játtanarlógin er komin í gildi. Í viðmerkingunum hevur staðið:

*"Tað er tí av alstórum týdningi, at landsstýrismaðurin ætlar tær roknaðu lógarbundnu útreiðslurnar so neyvt sum gjørligt. Um so er, at tað í fíggjarárinum vísir seg, at samlaðu veitingarnar sambært lógini verða størri enn hildið, tá ið ætlanin varð løgd, skal landsstýrismaðurin leggja fram uppskot til eykajáttanarlóg, ella í øðrum lagi uppskot um at broyta viðkomandi stuðulslóg."*

Sami tekstur sæst á síðu 23 í álitinum um játtanarskipan landsins frá 2006.

Í álitinum til eykafíggjarlógina fyri november 2008, framførir fíggjarnevndin sama sjónarmið:

*"Nevndin er samd við landsstýrismanninum í fíggjarmálum, sum undir 1. viðgerð staðfesti, at fleiri av umbønunum um eykajáttan ikki lúka treytirnar í stýrisskipanarlógini, har staðfest verður, at ongin útreiðsla kann haldast uttan játtan í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. Landsstýrismaðurin hevur somuleiðis undir nevndarviðgerðini undirstrikað, at neyðugt er at koma hesum trupulleikum til lívs".*

M.a. við hesi grundgeving vóru lógarbundnu eykajáttanirnar strikaðar av fíggjarnevndini.

Mælt verður til, at greiða verður fingin á spurninginum um tað er neyðugt ella ikki við eykajáttan, tá ið talan er um meirnýtslu á lógarbundnu játtanum.

## 5.4 Gongdin í játtanar- og roknskapartølum í árunum 2003 til 2008

Niðanfyri er gjørd ein lýsing av gongdini í fíggjarlógartølunum og staðfestu tølunum fyri høvuðskonturnar, sum eru fevndar av játtanargreiningini. Staðfestu tølini eru samanborin við upprunaligu fíggjarlógina, tí mett verður, at hetta kann geva eina ábending um neyvleikan í upprunaligu metingini av útreiðslustøðinum.

Harumframt er gjørd ein meting av meir/minninýtslu í mun til samlaðu játtanina (íroknað eykajáttanir) fyri at fáa eina mynd av mannagongdum í sambandi við roknskaparuppfylging og harav fylgjandi broytingum í játtanunum.

Í samanberingini niðanfyri er útgangsstøði tikið í játtanini einstaka árið samanborið við seinni staðfestu tølini.

## 5.5 Børn og ung

*Talva 55: Játtanar- og roknskapartøl fyri børn og ung árini 2003 til 2008*

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 12.371 | 14.495 | 19.185 | 34.589 | 39.747 | 42.399 |
| Eykajáttan | 500 | - | -1.000 | 4.611 | - | - |
| **Játtan til samans** | **12.871** | **14.495** | **18.185** | **39.200** | **39.747** | **42.399** |
| Staðfest tøl | 13.241 | 14.398 | 17.217 | 36.895 | 39.380 | 43.107 |
| **Meir/minninýtsla** | **370** | **-97** | **-968** | **-2.305** | **-367** | **708** |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | 7,0 | -0,7 | -10,3 | 6,7 | -0,9 | 1,7 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | 2,9 | -0,7 | -5,3 | -5,9 | -0,9 | 1,7 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Í talvuni omanfyri eru tølini fyri stuðlar til børn ikki tikin við fyri árini 2003 til 2005 orsakað av at raksturin hesi ár lá undir grein 17 í forsorgarlógini.

Tølini fyri 2003 til 2005 eru tískil ikki samanberilig við árini 2006 til 2008.

Minninýtslan í 2006 skyldast, at Barnaheimið, Rókin, Slóðin og Stuðlar til børn vóru noydd at skerja virksemið í árinum, tí fyrilit skuldu takast fyri, at ein møgulig eykajáttan ikki varð veitt. Eykajáttanin varð givin so seint, at stovnarnir ikki kundu brúka alla játtanina. Hjá "Reiðrinum" var eitt ósett starv í 2006.

Seinastu 2 árini hevur verið rímiligt samsvar ímillum játtan og staðfesta nýtslu.

# 5.6 Serforsorg

***Talva 56: Játtanar- og roknskapartøl til serforsorg fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 104.335 | 112.350 | 117.296 | 123.586 | 128.946 | 140.484 |
| Eykajáttan | -3.419 | -2.138 | -1.000 | 365 | - | - |
| Játtan til samans | 100.916 | 110.212 | 116.296 | 123.951 | 128.946 | 140.484 |
| Staðfest tøl | 100.965 | 105.444 | 114.862 | 119.964 | 128.824 | 139.515 |
| Meir/minninýtsla | 49 | -4.768 | -1.434 | -3.987 | -122 | -969 |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | -3,2 | -6,1 | -2,1 | -2,9 | -0,1 | -0,7 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | 0,0 | -4,3 | -1,2 | -3,2 | -0,1 | -0,7 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Niðanfyri eru viðmerkingar gjørdar til tær størstu av undirkontunum.

### *5.6.1.1 Trivnaðartænastan*

***Talva 57: Játtanar- og roknskapartøl hjá trivnaðartænastuni fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 69.039 | 76.017 | 79.273 | 82.548 | 85.536 | 94.929 |
| Eykajáttan | 2.032 | - | -1.000 | 295 | - | - |
| Til samans | 71.071 | 76.017 | 78.273 | 82.843 | 85.536 | 94.929 |
| Staðfest tøl | 71.556 | 73.598 | 77.891 | 79.571 | 84.678 | 92.218 |
| Meir/minninýtsla | 485 | -2.419 | -382 | -3.272 | -858 | -2.711 |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | 3,6 | -3,2 | -1,7 | -3,6 | -1,0 | -2,9 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | 0,7 | -3,2 | -0,5 | -3,9 | -1,0 | -2,9 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Frávikið í 2006 var upp á 3,2 mió.kr. harav 2,5 mió.kr. stava frá játtan til eitt nýtt autistaheim í Klaksvík, sum ikki varð sett í verk.

Fyri 2008 varð søkt um eina lækking upp á 2 mió.kr. til Trivnaðartænastuna, tí 2,7 mió.kr. vóru avsettar til eitt skúlatilboð, sum var seinkað; umbønin um eykajáttan varð ikki gingin á møti.

Samanumtikið kann sigast, at tað er rímiliga gott samsvar millum játtanina og seinni staðfestar útreiðslur, tá ið hædd verður tikið fyri, at planlagt virksemi ikki er komið í gongd í árinum, soleiðis sum upprunaliga ætlað. Fyri øll árini við undantaki av 2003 vóru staðfestu útreiðslurnar lægri enn upprunaliga mett.

### 5.6.1.2 *Stovnsuppihald o.a. í Danmark*

***Talva 58: Játtanar- og roknskapartøl fyri stovnsuppihald o.a. í Danmark fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 19.200 | 21.046 | 18.596 | 19.646 | 19.951 | 20.350 |
| Eykajáttan | 600 | -2.046 | | - | | |
| **Játtan til samans** | **19.800** | **19.000** | **18.596** | **19.646** | **19.951** | **20.350** |
| | 20.096 | 17.315 | 18.831 | 19.812 | 20.102 | 20.036 |
| **Meir/minninýtsla** | **296** | **-1.685** | **235** | **166** | **151** | **-314** |
| **Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í %** | 4,7 | -17,7 | 1,3 | 0,8 | 0,8 | -1,5 |
| **Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í %** | 1,5 | -8,9 | 1,3 | 0,8 | 0,8 | -1,5 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Við undantaki av 2004 er gott samsvar ímillum rakstrarjáttanina og staðfestu tølini.

Í 2004 verður játtanin lækkað við 2 mió.kr. Lækkingin skyldast lutvíst eitt endurgjald fyri 2002, og lutvíst at færri brúkarar eru í skipanini.

Í løtuni eru 25 fólk í skipanini, og sum er koma ikki fleiri fólk inn í hesa skipan. Talið lækkar, so hvørt fólk doyggja.

Sostatt er tað lutfalsliga einkult at meta um útreiðslurnar einstøku árini.

### *5.6.1.3 Deildin fyri sinnisveik*

***Talva 59: Játtanar- og roknskapartøl fyri deildina fyri sinnisveik fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 14.058 | 10.750 | 13.971 | 15.881 | 18.408 | 19.995 |
| Eykajáttan | -5.500 | - | - | 54 | - | - |
| Játtan til samans | **8.558** | **10.750** | **13.971** | **15.935** | **18.408** | **19.995** |
| Staðfest tøl | 7.834 | 10.546 | 13.450 | 15.941 | 19.206 | 20.207 |
| Meir/minninýtsla | **-724** | **-204** | **-521** | **6** | **798** | **212** |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | -44,3 | -1,9 | -3,7 | 0,4 | 4,3 | 1,1 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | -8,5 | -1,9 | -3,7 | 0,0 | 4,3 | 1,1 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Burtursæð frá 2003 er rímiliga gott samsvar ímillum upprunaligu fíggjarlógina og seinni staðfest rakstrartøl. Orsøkin til eykajáttanina upp á -5,5 mió.kr. í 2003 var, at tað nýggja virksemið, sum ætlanin var at seta í verk í árinum, ikki kom í gongd sum ætlað.

## 5.7 Eldrarøkt

***Talva 60: Játtanar- og roknskapartøl til eldrarøkt fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 221.043 | 230.671 | 246.780 | 271.539 | 286.366 | 309.111 |
| Eykajáttan | 2.882 | - | -833 | 883 | - | 5.399 |
| Játtan til samans | **223.925** | **230.671** | **245.947** | **272.422** | **286.366** | **314.510** |
| Staðfest tøl | 222.286 | 227.766 | 244.351 | 265.385 | 287.063 | 315.305 |
| Meir/minninýtsla | **-1.639** | **-2.905** | **-1.596** | **-7.037** | **697** | **795** |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | 0,6 | -1,3 | -1,0 | -2,3 | 0,2 | 2,0 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | -0,7 | -1,3 | -0,6 | -2,6 | 0,2 | 0,3 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Niðanfyri eru viðmerkingar gjørdar til tær størstu av undirkontunum.

### *5.7.1.1 Røktarheim*

***Talva 61: Játtanar- og roknskapartøl til røktarheim fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 106.417 | 117.356 | 128.878 | 154.689 | 165.260 | 183.195 |
| Eykajáttan | 1.449 | - | -3.291 | 442 | - | 2.000 |
| **Játtan til samans** | **107.866** | **117.356** | **125.587** | **155.131** | **165.260** | **185.195** |
| Staðfest tøl | 107.606 | 115.965 | 126.178 | 150.564 | 165.786 | 186.818 |
| **Meir/minninýtsla** | **-260** | **-1.391** | **591** | **-4.567** | **526** | **1.623** |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | 1,1 | -1,2 | -2,1 | -2,7 | 0,3 | 2,0 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | -0,2 | -1,2 | 0,5 | -2,9 | 0,3 | 0,9 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Við undantak av 2006 og 2008 er gott samsvar ímillum rakstrarjáttanina og staðfestu tølini.

Minninýtslan í 2006 skyldast, at heimið á Mørkini í Streymnesi kom seinni í gongd enn upprunaliga ætlað.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanina fyri 2008 varð biðið um 2 mió.kr. orsakað av at útreiðslurnar hjá Ellis- og Røktarheiminum í Runavík gjørdust hægri enn tillutaða játtanin. Eftirfylgjandi varð staðfest, at feilir vóru í fráboðanunum frá heiminum, og tískil tók umbønin um eykajáttan ikki hædd fyri samlaðu útreiðslunum.

### *5.7.1.2 Eldrarøkt í Sandoynni*

***Talva 62: Játtanar- og roknskapartøl til røktarheim fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 10.531 | 10.224 | 10.807 | 11.474 | 11.675 | 12.124 |
| Eykajáttan | -506 | - | - | 44 | | |
| **Játtan til samans** | **10.025** | **10.224** | **10.807** | **11.518** | **11.675** | **12.124** |
| Staðfest tøl | 9.756 | 10.783 | 10.815 | 11.100 | 11.535 | 12.128 |
| **Meir/minninýtsla** | **-269** | **559** | **8** | **-418** | **-140** | **4** |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | -7,4 | 5,5 | 0,1 | -3,3 | -1,2 | 0,0 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | -2,7 | 5,5 | 0,1 | -3,6 | -1,2 | 0,0 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Av talvuni omanfyri sæst, at staðfestu tølini samsvara rímiliga væl við játtanartølini. Frávikið í % er lutfalsliga stórt fyri árini 2004 og 2006, men talan er um smáar upphæddir.

### *5.7.1.3 Heimatænastan*

***Talva 63: Játtanar- og roknskapartøl til heimatænastuna fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarlóg** | 95.273 | 102.402 | 105.986 | 104.151 | 107.373 | 111.661 |
| **Eykajáttan** | 2.369 | - | 2.458 | 392 | - | 3.899 |
| **Játtan til samans** | **97.642** | **102.402** | **108.444** | **104.543** | **107.373** | **115.560** |
| **Staðfest tøl** | 96.288 | 100.559 | 106.635 | 102.654 | 108.446 | 114.884 |
| **Meir/minninýtsla** | **-1.354** | **-1.843** | **-1.809** | **-1.889** | **1.073** | **-676** |
| **Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í %** | 1,1 | -1,8 | 0,6 | -1,4 | 1,0 | 2,9 |
| **Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í %** | -1,4 | -1,8 | -1,7 | -1,8 | 1,0 | -0,6 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Av talvuni omanfyri sæst, at staðfestu tølini samsvara rímiliga væl við játtanartølini. Øll árini uttan í 2007 er talan um eina minninýtslu í mun til endaligu játtanina.

Av samlaðu eykajáttanini í 2003 eru 1,3 mió.kr. grundaðar á sáttmálabundnar lønarhækkingar og hækkað ALS-gjald, sum ikki vóru við í upprunaligu játtanini.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlóg fyri 2008 var tørvur á eykajáttan til heimarøktina, lutvíst tí at trýstið á skipanina er sera stórt, serliga í Suðurstreymoy, Suðuroy og eisini í Norðuroyggjum, og lutvíst tí útrokningar vístu, at Heimatænastan ikki hevur fingið fulla afturbering vegna nýggju lønarsáttmálarnar.

## 5.8 Ansingarsamsýning

***Talva 64: Játtanar- og roknskapartøl til ansingarsamsýning fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 8.216 | 10.760 | 11.600 | 11.766 | 11.210 | 10.900 |
| Eykajáttan | 2.036 | -348 | - | - | - | - |
| **Játtan til samans** | **10.252** | **10.412** | **11.600** | **11.766** | **11.210** | **10.900** |
| Staðfest tøl | 10.082 | 10.558 | 10.444 | 11.016 | 10.800 | 13.943 |
| **Meir/minninýtsla** | **-170** | **146** | **-1.156** | **-750** | **-410** | **3.043** |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | 22,7 | -1,9 | -10,0 | -6,4 | -3,7 | 27,9 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | -1,7 | 1,4 | -10,0 | -6,4 | -3,7 | 27,9 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Sum tað sæst omanfyri er talan um lutfalsliga stór frávik millum játtaðu upphæddina á fíggjarlógini og endaliga staðfestu tølini. Burtursæð frá 2008 er talan tó um lutfalsliga smáar upphæddir.

Arbeiðið við at meta um fíggjarliga tørvin á økinum er darvað av ófullfíggjaðum upplýsingum um tal av brúkarum í ansingarskipanini og tørvin hjá ansaðu fólkunum. Hinvegin finnast skrásetingar yvir, hvussu nógv fólk fáa samsýning fyri at ansa øðrum.

Í 2004 kom ein kunngerð, sum ásetti at ansingarsamsýning einans kann veitast røktarkrevjandi yvir 67 ár og at samsýning kann veitast tveimum ansarum til sama røktarkrevjandi persón.

Neyðugar skrásetingar um tal og tørv av brúkarum av skipanini vildi bøtt um møguleikan at gjørt neyvari metingar av kostnaðinum av at reka skipanina.

## 5.9 Stuðulstænastan

***Talva 65: Játtanar- og roknskapartøl til heimatænastuna fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 10.695 | 14.576 | 14.998 | 14.998 | 15.532 | 21.430 |
| Eykajáttan | -1.439 | - | - | - | - | - |
| **Játtan til samans** | **9.256** | **14.576** | **14.998** | **14.998** | **15.532** | **21.430** |
| Staðfest tøl | 8.587 | 14.591 | 13.632 | 14.849 | 15.836 | 21.753 |
| **Meir/minninýtsla** | **-669** | **15** | **-1.366** | **-149** | **304** | **323** |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | -19,7 | 0,1 | -9,1 | -1,0 | 2,0 | 1,5 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | -7,8 | 0,1 | -10,0 | -1,0 | 1,9 | 1,5 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Árið 2003 var eitt skiftisár, har stuðulsskipanin fór frá at vera lógarbundin játtan undir fyritíðarpensjón umsitin av Almannastovuni til at vera ein rakstrarjáttan undir Nærverkinum. Skipanin varð flutt miðskeiðis í árinum.

Sum tað sæst omanfyri er talan um ein stóran útreiðsluvøkstur frá 2007 til 2008; orsøkin til hækkanina skyldast, at nýggir brúkarar eru komnir inn í skipanina í árinum. Av ætlanartølunum sæst, at hædd er tikið fyri meirkostnaðinum av hesum brúkarum.

Samanumtikið verður mett, at upprunaliga fíggjarlógin rímiliga væl endurspeglar virksemið á økinum.

## 5.10 Vanlig forsorg

***Talva 66: Játtanar- og roknskapartøl til vanliga forsorg fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 75.403 | 106.396 | 107.072 | 86.480 | 87.580 | 111.150 |
| Eykajáttan | 32.419 | -6.279 | 7.231 | 2.366 | - | - |
| **Játtan til samans** | **107.822** | **100.117** | **114.303** | **88.846** | **87.580** | **111.150** |
| Staðfest tøl | 100.310 | 103.323 | 114.480 | 90.855 | 105.132 | 123.554 |
| **Meir/minninýtsla** | **-7.512** | **3.206** | **177** | **2.009** | **17.552** | **12.404** |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Til og við 2005 vóru stuðlar til børn við undir grein 17 í forsorgarlógini, men frá 2006 var hetta broytt, soleiðis at ein partur av útreiðslunum varð lagdur til kommunurnar og ein partur á høvuðskontuna Børn og ung.

Niðanfyri eru viðmerkingar gjørdar til einstøku undirkonturnar.

#### *5.10.1.1 Meirútreiðslur brekað barn*

***Talva 67: Játtanar- og roknskapartøl til meirútreiðslur brekað barn fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarlóg** | 30.500 | 41.028 | 47.397 | 18.592 | 19.000 | 26.100 |
| **Eykajáttan** | 6.612 | 482 | 1.000 | 1.576 | - | - |
| **Játtan til samans** | **37.112** | **41.510** | **48.397** | **20.168** | **19.000** | **26.100** |
| **Staðfest tøl** | 36.450 | 42.044 | 49.697 | 22.066 | 23.546 | 28.333 |
| **Meir/minninýtsla** | **-662** | **534** | **1.300** | **1.898** | **4.546** | **2.233** |
| **Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í %** | 19,5 | 2,5 | 4,9 | 18,7 | 23,9 | 8,6 |
| **Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í %** | -1,8 | 1,3 | 2,7 | 9,4 | 23,9 | 8,6 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Viðmerkjast skal, at lækkingin í játtanartølunum og staðfestu tølunum frá 2005 til 2006 skyldast, at játtanin til stuðlar til børn við breki frá 2006 at rokna lutvíst varð flutt til kommunurnar og lutvíst varð flutt undir høvuðskonto Børn og ung.

Í 2003 varð biðið um eina eykajáttan upp á 6,6 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina í september 2003 skyldast tørvurin á meirjáttan, at útreiðslan til Stuðlar til brekað børn í Tórshavnar kommunu er flutt frá Barnaforsorgini til hesa konto.

Sambært viðmerking frá landsgrannskoðaranum viðvíkjandi 2006 skyldast meirnýtslan í 2006 fyri tað mesta umlegging av stuðlunum frá grein 17 í forsorgarlógini til nýggju stuðulsskipanina. Talan er í høvuðsheitum um uppsagnartíð, feriu og úrtíð hjá gomlum stuðlum. Spurningurin er, um tað ikki átti at verið møguligt at tikið hædd fyri hesum eykaútreiðslum, tá ið fíggjarlógin og/ella eykajáttanin vórðu gjørdar.

Í 2007 verður staðfest ein meirútreiðsla, sum sambært frágreiðing frá landsgrannskoðaranum í høvuðsheitum skyldast, at fleiri børn komu undir grein 17 (meirútreiðslur brekað barn), tá ið nýggja barnarverndarlógin kom í gildi 1. januar 2006.

Av viðmerkingunum frá landsgrannskoðaranum seinnu árini sæst, at tørvur er á at gera kunngerðir á økinum, fyri á tann hátt at fáa nágreinað í hvørjum føri ein brúkari hevur rætt til stuðul. Manglandi nágreiningar á økinum kunnu verða viðvirkandi til, at tað er torført at meta um tørvin á játtan á økinum.

Samanumtikið kann sigast, at flestu árini eru týðandi frávik millum upprunaligu játtanina og staðfestu tølini. Í ávísum førum fyriliggja frágreiðingar um ítøkiligar orsøkir til staðfestu meirnýtsluna.

Ein betran av skrásetingunum av brúkarunum umframt nágreiningar av veitingunum í kunngerðum vildi bøtt um møguleikan at gera neyvari fíggjarætlan fyri økið.

### 5.10.1.2 *Endurútbúgving § 18*

***Talva 68: Játtanar- og roknskapartøl til endurútbúgving fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarlóg** | 16.403 | 16.000 | 19.194 | 23.900 | 24.850 | 28.800 |
| **Eykajáttan** | -189 | 2.310 | 1.817 | - | | |
| **Játtan til samans** | **16.214** | **18.310** | **21.011** | **23.900** | **24.850** | **28.800** |
| **Staðfest tøl** | 15.471 | 20.716 | 22.251 | 24.637 | 26.369 | 40.462 |
| **Meir/minninýtsla** | **-743** | **2.406** | **1.240** | **737** | **1.519** | **11.662** |
| **Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í %** | -5,7 | 29,5 | 15,9 | 3,1 | 6,1 | 40,5 |
| **Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í %** | -4,6 | 13,1 | 5,9 | 3,1 | 6,1 | 40,5 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Flestu árini er talan um eina lutfalsliga stóra meirnýtslu í mun til upprunaligu játtanartølini og í mun til samlaðu játtanina fyri árið.

Generella viðmerkingin smb. frágreiðing frá landsgrannskoðaranum til meirnýtsluna er, at fleiri vard størv eru komin í tíðarskeiðinum.

Politiskt hevur tað verið eitt ynski at uppraðfesta arbeiðsmarknaðarøkið fyri at fáa fleiri fólk út í vinnu aftur. Í 2002 varð ein vegleiðing gjørd, sum setti fokus á økið "vard størv" og við fíggjarlóg fyri 2006 og 2007 varð arbeiðsmarknaðardeildin uppraðfest við til samans 3 starvsfólkum.

Søkt varð um eykajáttan upp á 9,1 mió.kr. í 2008, men umbønin varð ikki gingin á møti. Var umbønin um eykajáttan gingin á møti, var staðfesta meirútreiðslan fyri økið 2,5 mió.kr. í mun til 11,7 mió.kr.

Stóra hækkingin í útreiðslunum frá 2007 til 2008 skyldast lutvíst økta talið av fólki á stovni í Danmark og lutvíst økta talið av vardum størvum.

Upplýst er, at mannagongdin viðvíkjandi vardum størvum er tann, at arbeiðsgevarin rindar lønina og eftirfylgjandi sendir rokning til Almannastovuna, sum so endurrindar ein part av lønarútreiðsluni. Flestu arbeiðsgevarar senda rokning til Almannastovuna fyri fleiri mánaðir í senn. Skráseting av útreiðsluni verður gjørd í sambandi við útgjald. Staðfesta útreiðslan í einum ári kann tískil viðvíkja rakstri fyri árið frammanundan.

Manglandi tíðargreining av útreiðslum til vard størv og fólk á stovnum í Danmark kann gera tað trupult at meta um tørvin á játtan í tí einstaka árinum. Mælt verður tí til, at ein mannagongd verður gjørd, sum kann tryggja, at hædd verður tikin fyri skyldugum útreiðslum á økinum (tíðargreining av útreiðslunum).

Samanumtikið kann sigast, at í játtanartølunum fyri tíðarskeiðið frá 2004 til 2008 er ikki í neyðugan mun tikin hædd fyri økingini í talinum av vardum størvum og í talinum av fólki á stovnum í Danmark.

### *5.10.1.3 Hjálparamboð v.m. § 18*

***Talva 69: Játtanar- og roknskapartøl til hjálparamboð fyri árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 28.500 | 49.368 | 40.208 | 43.488 | 41.200 | 50.400 |
| Eykajáttan | 25.996 | -9.435 | 4.414 | - | | |
| **Játtan til samans** | **54.496** | **39.933** | **44.622** | **43.488** | **41.200** | **50.400** |
| Staðfest tøl | 48.389 | 40.300 | 41.990 | 43.764 | 51.452 | 51.453 |
| **Meir/minninýtsla** | **-6.107** | **367** | **-2.632** | **276** | **10.252** | **1.053** |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | 69,8 | -18,4 | 4,4 | 0,6 | 24,9 | 2,1 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | -11,2 | 0,9 | -5,9 | 0,6 | 24,9 | 2,1 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Av tølunum omanfyri sæst, at í árunum 2003 til 2005 hevur talan verið um stórar eykajáttanir, serliga í 2003 og 2004 umframt at talan var um eina munandi meirnýtslu í 2007 í mun til játtan.

Sambært landsstýrismanninum var upprunaliga játtanin fyri 2003 gjørd við grundarlagi í roknskapartølunum fyri 2001 við eini framskriving upp á 3,5%. Tá ið útreiðslurnar hækkaðu seinastu mánaðirnar í 2002, heitti landsstýrismaðurin á Fíggjarnevndina um at hækka uppskotið til løgtingsfíggjarlóg fyri 2003 við 4,6 mió.kr., men áheitanin varð ikki gingin á møti.

Í september 2003 vóru 13,5 mió.kr. játtaðar eyka til hjálparamboð og í desember sama ár varð játtanin økt við 13,4 mió.kr. afturat. Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina sæst, at umsitingin hevur lagt eyka orku í at avgreiða fleiri umsóknir. Samstundis verður víst á, at arbeitt verður við at seta reglugerðir og kunngerðir í gildi fyri økið fyri at tálma útreiðsluvøkstrinum.

Mett verður, at uppraðfestingin í 2003 í størri mun átti at verið endurspeglað í upprunaligu játtanini fyri 2003 og/ella í fyrru eykajáttanarlógini fyri 2003.

Samanumtikið er talan um eini minninýtslu í 2003 upp á 6,1 mió.kr., helst grundað á, at seinna eykajáttanarlógin ikki varð játtað fyrr enn í desember.

Í 2004 verður upprunaliga játtanin lækkað við 9,4 mió.kr. Av viðmerkingunum til eykajáttanarlóg verður lækkingin m.a. grundað á, at Hjálpartólamiðstøðin framdi eitt stórt átak í 2003 fyri at minka um bíðilistarnar, og tí er stóri vøksturin í 2003 hæsaður av í 2004.

Mett verður, at hædd átti at verið tikið fyri lækkingini í fíggjarlógararbeiðinum fyri 2004, tí økta virksemið í 2003 átti natúrliga at havt við sær, at útreiðslurnar minkaðu aftur í 2004.

Í 2007 varð biðið um 4,9 mió.kr. í eykajáttan til hjálpartól, men umbønin fall burtur vegna nývál. Staðfesta meirnýtslan fyri árið var upp á 10,3 mió.kr. t.v.s. 5,4 mió.kr. meiri enn biðið varð í eykajáttanarlógini í september. Meirútreiðslan skyldast serliga, at útreiðslan til avlamisbilar og sethúsabroytingar er økt meiri enn mett var frammanundan.

Í 2008 varð biðið um 1,9 mió.kr. í eykajáttan til hjálpartól, men umbønin varð ikki gingin á møti.

Samanfatandi kann sigast, at talan er um stór frávik millum staðfestu útreiðslurnar í árunum 2003, 2004 og 2007 í mun til upprunaligu játtanina. Hóast umbøn um eykajáttan er í fleiri førum staðfest týðandi frávik millum játtan og endalig tøl.

Upplýst er, at tað ikki finnast neyv tøl viðvíkjandi virkseminum á hjálpitólaøkinum, herundir hvørjir brúkarar eru í skipanini. Einasta skipaða skrásetingin er tal av umsóknum. Manglandi/óhóskandi skrásetingar av tørvi og brúkarum av skipanini kunnu verða ein orsøk til stóru frávikini millum játtan og nýtslu, umframt at manglandi dagføring av kunngerð og reglum annars hava gjørt umsitingina av lógini heldur meiri trupla.

Arbeitt verður í løtuni við at dagføra lógartekstin og tilhoyrandi kunngerðir.

## 5.11 Fyritíðarpensjón

***Talva 70: Játtanar- og roknskapartøl til fyritíðarpensjón árini 2003 til 2008***

| tkr. | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarlóg** | 192.900 | 194.470 | 199.131 | 201.338 | 216.817 | 228.350 |
| **Eykajáttan** | -4.900 | -4.082 | -5.184 | 8.980 | - | - |
| **Játtan til samans** | **188.000** | **190.388** | **193.947** | **210.318** | **216.817** | **228.350** |
| **Staðfest tøl** | 190.520 | 193.456 | 195.893 | 213.939 | 211.402 | 237.820 |
| **Meir/minninýtsla** | **2.520** | **3.068** | **1.946** | **3.621** | **-5.415** | **9.470** |
| **Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í %** | -1,2 | -0,5 | -1,6 | 6,3 | -2,5 | 4,1 |
| **Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í %** | 1,3 | 1,6 | 1,0 | 1,7 | -2,5 | 4,1 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Felags fyri árini 2003 til 2005 er, at upprunaliga játtanin var hægri enn staðfestu tølini. Grundað á framskrivingar hevur landsstýrismaðurin í almannamálum lagt fram uppskot um at lækka játtanina á økinum, og er hetta samtykt á heysti hesi ár.

Eftirfylgjandi er staðfest ein meirnýtsla fyri árini 2003 til 2005.

Sambært frágreiðing frá landsgrannskoðarunum upplýsti landsstýrismaðurin í almanna-málum, at eftirfylgjandi staðfesta meirnýtslan í nevnda tíðarskeiði skyldast, at fleiri umsóknir vóru játtaðar í seinnu helvt av árinum enn upprunaliga varð roknað við.

Mett verður, at í eykajáttanarlógum, sum verða samtyktar á heysti, eigur í størri mun av verða tikin atlit til broytingar, sum eru staðfestar í tørvinum á økinum.

Í 2006 er talan um eina eykajáttan frá september 2006 upp á 9 mió.kr. vísandi til, at "Almannastovan hevur avgreitt størsta partin av fyritíðarpensjónsumbønunum, sum komu frá Færøernes Ulykkeforsikringsråd (FUR) í sambandi við, at avgerðarmyndugleikin varð fluttur frá FUR til Almannastovuna - talan er um yvir 100 gamlar umsóknir."

Sambært frágreiðing frá landsgrannskoðarunum upplýsti landsstýrismaðurin, at metingin, sum varð gjørd í august 2006, ikki helt, tí Almannastovan avgreiddi fleiri av omanfyrinevndu málum enn tey, sum vóru við í metingini.

Í 2007 varð lagt fram eykajáttanarlóg, har søkt varð um at lækka játtanina á økinum við 4,4 mió.kr. Uppskotið fall burtur, tá ið nýval varð útskrivað.

Játtanin á høvuðskonto Fyritíðarpensjón er lógarbundin, og staðfesta útreiðslan fyri árini 2003 til 2006 liggur 1-2% við síðuna av upprunaligu metingini av útreiðslunum, tá ið hædd er tikið fyri meirútreiðsluni av játtanunum orsakað av umsóknum, sum áður vóru viðgjørdar av FUR.

Í 2007 liggur staðfesta nýtslan 2,5% niðanfyri upprunaligu mettu, meðan talið fyri 2008 er 4,1% omanfyri upprunaligu metingina. Í 2008 varð biðið um eykajáttan, men henda var ikki samtykt.

Samanumtikið verður mett, at upprunaliga metingin av útreiðslunum til fyritíðarpensjón er rímiliga neyv fyri árini 2003 til 2007, tá ið hædd verður tikið fyri serligu eykaútreiðslunum fyri 2006. Hinvegin verður mett, at eykajáttanirnar fyri árini 2003 til 2006 ikki eru nóg neyvar sæð í mun til tey eftirfylgjandi staðfestu tølini.

Upprunaliga metingin av útreiðslunum til fyritíðarpensjón fyri árini 2007 og 2008 hevur hinvegin verið minni neyv við frávikum upp á ávikavist -2,5% og 4,1%.

## 5.12 Samandráttur

Samanumtikið kann sigast, at tað generelt hevur verið rímiligt samsvar millum upprunaligu játtanirnar og staðfestu útreiðslurnar viðvíkjandi rakstrarjáttanunum, meðan frávikið í fleiri førum hevur verið nakað størri viðvíkjandi teimum lógarbundnu játtanunum.

Niðanfyri eru tølini fyri árini 2003 til 2008 fyri ávikavist rakstrarútreislurnar og lógarbundnu útreiðslurnar undir einum samanborin við játtanartølini fyri árið.

***Talva 71: Játtanar- og roknskapartøl fyri rakstrarútreiðslurnar undir einum fyri árini 2003 til 2008***

| Rakstrarjáttanir til samans | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 348.444 | 372.092 | 398.259 | 444.712 | 470.591 | 513.424 |
| Eykajáttan | -1.476 | -2.138 | -2.833 | 5.859 | - | 5.399 |
| **Játtan til samans** | **346.968** | **369.954** | **395.426** | **450.571** | **470.591** | **518.823** |
| Staðfest tøl | 345.079 | 362.199 | 390.062 | 437.093 | 471.103 | 517.662 |
| **Meir/minninýtsla** | **-1.889** | **-7.755** | **-5.364** | **-13.478** | **512** | **-1.161** |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | -1,0 | -2,7 | -2,1 | -1,7 | 0,1 | 0,8 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | -0,5 | -2,1 | -1,4 | -3,0 | 0,1 | -0,2 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Sum tað sæst omanfyri eru øll árini uttan 2007 talan um eina minninýtslu fyri allar kannaðar høvuðskontur undir einum í mun til endaligu játtanina og fyri árini 2003 til 2006 eisini eina minninýtslu fyri allar konturnar undir einum í mun til upprunaligu játtanina.

Í 2006 vóru 5,9 mió.kr. givnar í eykajáttan, men endaliga nýtslan lá niðanfyri upprunaligu játtanina. Ein av orsøkunum til frávikið her skyldast, at eykajáttanin varð latin so seint, at virksemið á stovnunum var skert, tí fyrilit skuldu takast fyri, at ein møgulig eykajáttan ikki varð veitt.

***Talva 72: Játtanar- og roknskapartøl fyri lógarbundnu útreiðslurnar undir einum fyri árini 2003 til 2008***

| Lógarbundnar útreiðslur til samans | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarlóg | 276.519 | 311.626 | 317.803 | 299.584 | 315.607 | 350.400 |
| Eykajáttan | 29.555 | -10.709 | 2.047 | 11.346 | - | - |
| **Játtan til samans** | **306.074** | **300.917** | **319.850** | **310.930** | **315.607** | **350.400** |
| Staðfest tøl | 300.912 | 307.337 | 320.817 | 315.810 | 327.334 | 375.317 |
| **Meir/minninýtsla** | **-5.162** | **6.420** | **967** | **4.880** | **11.727** | **24.917** |
| Meir/minninýtsla í mun til upprunaliga játtan í % | 8,8 | -1,4 | 0,9 | 5,4 | 3,7 | 7,1 |
| Meir/minninýtsla í mun til endaliga játtan í % | -1,7 | 2,1 | 0,3 | 1,6 | 3,7 | 7,1 |

*Kelda: Landsroknskapirnir fyri árini 2003 til 2008 og Búskaparskipan Landsins.*

Lógarbundnu útreiðslurnar vísa hinvegin eina meirnýtslu í mun til endaligu játtanina øll árini uttan í 2003 og øll árini uttan í 2004 eina meirnýtslu í mun til upprunaligu játtanina.

Meirnýtslan í mun til upprunaligu játtanina hevur fyri øll árini uttan 2004 og 2005 verið rímiliga stór.

Stóra frávikið í 2003 skyldast serliga meirútreiðslur til hjálpitól, í 2005 fyritíðarpensjón, í 2007 hjálpitól og meirútreiðslur til brekað børn og í 2008 fyritíðarpensjón og endurútbúgving.

Í viðmerkingunum til einstøku økini er gjørt vart við, at umsitingin í onkrum førum møguliga átti at havt tikið hædd fyri meirinýtsluni antin í upprunaligu játtanini og/ella í eykajáttanunum.

Fyri at betra arbeiðið við at gera játtanartøl verður mælt til fylgjandi:

- at neyðugar lógarbroytingar verða gjørdar á teimum økjum, har orðingin í lógini er ógreið
- at kunngerðir verða gjørdar í teimum førum, har hetta verður fyriskrivað í lógartekstinum. Endamálið við kunngerðunum skal vera at fáa neyvari ásetingar um hvørjar veitingar kunnu latast í teimum einstøku førunum
- at betrað verður um hagtalsgrundarlagið við at fáa eina skipaða skráseting av virkseminum á teimum einstøku økjunum. Hetta krevur møguliga íløgur í nýggjar skrásetingarskipanir og/ella útbygging av verandi skipanum
- at ásetingin í nýggju játtanarlógini verður hildin um at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyri 1. apríl leggur fram uppskot til løgtingssamtykt, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár, býtt á greinar. Mett verður, at verandi mannagongd, har endaligi karmurin og býtið millum einstøku greinarnar sum høvuðsregla ikki hevur verið ásett fyrr enn í seinnu helvt av september hevur darvað fíggjarlógararbeiðinum.
- at mannagongdir verða skipaðar, sum trygga, at generell eykajáttanaruppskot verða avgreidd fyrr upp á árið enn vanligt hevur verið seinnu árini, har eykajáttanaruppskot ikki eru endaliga avgreidd í tinginum fyrr enn í seinnu helvt av november. Hetta kann antin gerast við, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggur uppskotið fyrr fyri tingið og/ella at avgreiðslutíðin í tinginum verður stytt. Mett verður, mannagongdin seinastu árini ikki er nøktandi, tí við hesi mannagongd er árið so langt liðið tá eykajáttanarlógin verður samtykt, at tað er torført at gera neyðugar tillagingar í virkseminum fyri restina av árinum.

Sum nevnt omanfyri eru ymisk sjónarmið viðvíkjandi spurninginum um, hvørt tað er neyðugt at biðja um eykajáttan, tá ið talan er um meirnýtslu á lógarbundnu útreiðslum. Mælt verður til, at greiða fæst á spurninginum.

# 6 Fyrisitingarlig greining og fíggjarstýring

Ásetingarnar um hvussu landsins almenna roknskaparhald skal skipast eru at finna í løgtingslóg nr. 33 frá 23. mars 1994 við tilhoyrandi kunngerð. Galdandi kunngerð er frá mars 2007. Í kunngerðini stendur í grein 1, "at roknskaparverkið skal tryggja eina munadygga búskaparfyrisiting við at skráseta upplýsingar, sum skulu verða nýttar til búskaparliga ráðlegging, stýring og eftirlit við virkseminum á øllum stigum í landsfyrisitingini".

Niðanfyri er greitt frá, hvussu mannagongdirnar hava verið, sum skulu tryggja, at játtanirnar hava verið hildnar eftir at hava greitt frá bygnaðinum á ávikavist Nærverkinum og Almannastovuni.

## 6.1 Bygnaður

### 6.1.1 Nærverkið

Niðanfyri er bygnaðurin á Nærverkinum vístur við tilskilan av staðfestum útreiðslum fyri 2008.

***Mynd 18: Bygnaðurin á Nærverkinum***




*Kelda: Nærverkið.*

*Meginskrivstovan*

Meginskrivstovan er karmum um yvirskipaðu leiðsluna fyri Nærverkið. Tvørgangandi uppgávur fyri alla skipanina verða samskipaðar á Meginskrivstovuni. Hon leiðir allar tænasturnar, umsitur játtanir og roknskaparhald, hevur lønar- og starvsfólkaumsitingina fyri alla skipaninia, KT-umsitingina, journalleiðsluna og aðrar tvørgangandi fyrisitingarligar uppgávur. Stjórin og deildarleiðararnir fyri Heimatænastuna, Stuðul- og Trivnaðartænastuna og Børn og ung halda til á Meginskrivstovuni.

Á høvuðsskrivstovuni starvast 19 starvsfólk.

*Stápar*

Undir leiðarunum á Heimatænastuni eru 6 økisleiðarar, sum hava ábyrgdina av heimahjálp og eldrasambýlunum, í teirra øki. Harumframt eru leiðarar á øllum røktarheimunum.

Undir leiðaranum á Stuðuls- og Trivnaðartænastuni eru leiðarar á ymsu stovnunum. Arbeitt verður í løtuni við at samskipa virksemið á økinum hjá Trivnaðartænastuni, soleiðis at tann einstaki leiðarin hevur ábyrgd av fleiri stovnum, vanliga trimum.

Undir Stuðulsskipanini til vaksin eru settir tveir økisleiðarar umframt ein leiðari er settur á heiminum fyri sinnisveik.

Arbeitt verður í løtuni við at samskipa virksemið undir Trivnaðar- og Stuðulstænastuni.

Økið Børn og ung er flutt til Nærverkið hin 1. september 2009 frá Almannastovuni.

Undir deildarleiðaranum fyri Børn og ung eru settir leiðarar á teimum ymsu stovnunum.

Áleið 1.600 fólk starvast í ymsu stápunum hjá Nærverkinum.

*Rakstrarjáttan til Nærverkið*

Rakstrarjáttanin til Meginskrivstovuna verður umsitin av stjóranum, sum einsamallur hevur ræðisrættin til kontuna. Tað er soleiðis stjórin sjálvur, sum beinleiðis góðkennir mánaðarliga roknskapin yvir fyri Almannamálaráðnum.

*Aðrar rakstrarjáttanir*

Stjórin í Nærverkinum varðar av játtanini til einstøku høvuðskonturnar undir Nærverkinum.

Dagliga umsitingina av játtanunum verður latin leiðarunum av ymsu tænastudeildunum, sum síðani deilir játtanina víðari til ávikavist økis- ella stovnsleiðarar.

Hvør einstakur økis- ella stovnsleiðari hevur ábyrgd yvir fyri leiðaranum at halda játtanina og skal mánaðarliga vátta rættleikan av roknskapartølunum yvir fyri Nærverkinum. Verður játtanin ikki hildin, hevur Nærverkið møguleika at leggja upp í, t.d. við at lata tað fáa avleiðingar.

Heimildin hjá leiðaranum at leggja uppí við at siga stovnsleiðaran úr starvi er tó ikki galdandi viðvíkjandi teimum røktarheimunum, sum eru sjálvsognarstovnar. Hesi eru skipað

við einum stýri, sum setur ein dagligan leiðara at standa fyri rakstrinum av heiminum, og er tað bara stýrið, sum kann siga dagliga leiðaran úr starvi.

Fyri sjálvsognarstovnarnar er sostatt galdandi, at tað ikki er samsvar ímillum, hvør skal valda og hvør skal gjalda, og kann tað gera tað trupult at hava eina nøktandi fíggjarstýring. Tað er ofta eisini trupult at fáa mánaðarliga góðkendar roknskapir frá sjálvsognarstovnunum.

Økis- og stovnsleiðarar hava fyrst og fremst røktar- ella pedagogiska útbúgving og bara í avmarkaðan mun fíggjarliga útbúgving. Arbeitt verður við at styrkja fíggjarstýringina úti í økjunum.

*Visitatiónsnevndir*

Tað finnast ongar yvirskipaðar visitatiónsreglur ella mannagongdir fyri virksemið hjá visitatiónsnevndunum og vandi er tískil fyri, at borgarar verða viðgjørdir ymiskt alt eftir hvar í landinum teir búgva.

Tað er eisini ymiskt frá øki til øki, hvussu nógvar visitatiónsnevndir eru. T.d. kann nevnast, at í Tórshavnar kommunu er ein felags upptøkunevnd fyri alt økið, meðan tað er ymiskt, hvussu tað er skipað aðrastaðni.

Mælt verður til, at reglur verða gjørdar um virksemið hjá visitatiónsnevndunum.

Mett verður, at tað hevði verið ein fyrimunur við eini meira sentralt stýrdari visitatión, tí hetta hevði kunnað betrað um bæði fakligu og fíggjarligu stýringina á økinum.

Á fakliga økinum hevði røktartyngdin í hvørjum øki verið meira týðulig og harvið kundu stovnsplássini tillutast teimum, sum hava størstan tørv.

Á fíggjarliga økinum kundi hetta betrað um møguleikarnar at stýrt virkseminum, soleiðis at sum mest fekst fyri játtanina.

Visitatiónin skal eisini fevna um tænastuna, sum verður veitt úti í privatum heimum av heimahjálpunum og stuðlunum.

## 6.1.2 Almannastovan

Niðanfyri er bygnaðurin á Almannastovuni vístur.

***Mynd 19: Bygnaðurin á Almannastovuni***




*Kelda: Almannastovan.*

Almannastovan hevur 4 økisdeildir runt um í landinum, sum hava hvør sín leiðara. Høvuðsuppgávan hjá økisdeildunum er avgreiðsla av fyrispurningum í sambandi við vanliga forsorg og annars at taka ímóti fyrispurningum á øðrum økjum, sum Almannastovan varðar av.

Veitingardeildin, sum umsitur áleið 70% av samlaðu játtanini hjá Almannastovuni, avgreiðir m.a. allar fólka- og fyritíðarpensjónir.

Á arbeiðsmarknaðardeildini verða øll endurbúgvingarmál í víðari merking umsitin.

Hjálpartólamiðstøðin hevur dagligu umsitingina av ikki kropsbornum tólum um hendi.

*Rakstrarjáttan til Almannastovuna*

Rakstrarjáttanin til Almannastovuna verður umsitin av stjóranum av stovninum, sum einsamallur hevur ræðisrættin á kontuni. Tað er soleiðis stjórin sjálvur, sum beinleiðis góðkennir mánaðarliga roknskapin fyri Almannamálaráðnum.

*Aðrar rakstrarjáttanir*

Stjórin í Almannastovuni varðar av játtanini til einstøku høvuðskonturnar undir Almannastovuni.

Dagliga umsitingin av játtanunum verður latin leiðarunum av ymsu deildunum. Ábyrgdin hjá einstaka leiðaranum er fyrst og fremst at trygga, at øll útgjøld og veitingar eru í samsvari við galdandi lóggávu. Hetta verður m.a. gjørt við eini skipaðari mannagongd, har tað hvønn mánað verða tiknar stakroyndir á hvørjum øki til eftirkannan av, at arbeiðið hjá einstøku málsviðgerðunum er í tráð við galdandi lóggávu.

Mett verður, at tað er ein fyrisitingarligur trupulleiki, at Almannastovan hevur rakstrarligu ábyrgdina av ávísum kontum, har dagligi ræðisrætturin til kontuna liggur hjá øðrum parti av almennu umsitingini, t.d. innan hjálpiráð. Undir verandi skipan er ikki samsvar ímillum hvør skal gjalda og valda umframt at umsitingin á Almannastovnuni hevur munandi verri við at eftirkanna, at veitingarnar eru í tráð við galdandi lóggávu.

Mælt verður til, at arbeiðið við at umskipa tey øki, har hesin trupulleikin ger seg galdandi, verður uppraðfest.

## 6.2 Roknskaparuppfylging

Føroya Gjaldstova hevur gjørt eina mannagongd, sum fyriskrivar hvussu roknskaparuppfylgingin hjá almennu stovnunum skal skipast.

Í mannagongdini er fyriskrivað, at:

- hvør einstakur stovnsleiðari eina ferð um mánaðin yvir fyri aðalráðnum skal vátta rættleikan av roknskapinum fyri stovnin og
- aðalstjórin eina ferð um mánaðin vegna landsstýrismannin yvir fyri Fíggjarmálaráðnum skal vátta rættleika av greinaroknskapinum fyri tíðarskeiðið.

Hóast mannagongdin, sum er lýst omanfyri, hevur verið galdandi í fleiri ár, so er upp á fyrispurning upplýst, at til og við 2008 hevur hendan mannagongdin ikki verið neyvt fylgd í Almannamálaráðnum. Hetta sæst eisini aftur í frágreiðingunum frá landsgrannskoðaranum fyri fíggjarárið 2007.

Í 2009 er mannagongdin í Almannamálaráðnum tó munandi strammað upp, og nú verður fylgt væl við, at allar váttanir frá stovnsleiðarunum verða latnar Almannamálaráðnum, soleiðis at aðalstjórin kann gera neyðugu váttanina um rættleikan av greinaroknskapinum til Fíggjarmálaráðið til tíðina.

Váttanirnar frá stovnsleiðarunum og aðalstjóranum hava higartil verið í pappírformi, men frá september 2009 er galdandi, at øll roknskapargóðkenning fer fram elektroniskt í Roknskapargóðkenningarskipanini (RGS). Sambært nýggju mannagongdini skal aðalstjórin í seinasta lagi 1 mánað og 6 dagar aftan mánaðarlok hava góðkent greinaroknskapin. Er roknskapurin ikki váttaður innan settu tíðarfreistina, verður greinaroknskapurin stongdur við viðmerking um, at roknskapurin er stongdur uttan at vera góðkendur.

Niðanfyri er greitt frá, hvussu roknskaparuppfylgingin er skipað ávikavist í Almannamálaráðnum, á Almannastovuni og í Nærverkinum.

### 6.2.1 Mannagongdin í Almannamálaráðnum

Hvønn mánað móttekur Almannamálaráðið eina váttan frá stjórunum á ávikavist Nærverkinum og Almannastovuni, har hesir yvir fyri Almannamálaráðnum vátta rættleikan av roknskapartølunum fyri undanfarna mánað. Tað, sum stjórarnir vátta[16], er, at:

- bókhaldið er fullfíggjað og í lagi og at roknskapurin sýnir nýtsluna fyri tíðarskeiðið,
- at nýtslan er hóskandi fyri virksemið í farna tíðarskeiði og
- at neyðug tiltøk eru sett í verk, um fyritreytirnar fyri játtanini eru broyttar, soleiðis at tær ikki koma at halda.

Á oyðublaðnum, sum verður nýtt, er møguleiki hjá stjóranum at gera viðmerkingar til undanfarna skeið, t.d. um tekin eru um, at játtanin ikki fer at halda.

Í Almannamálaráðnum verður fylgt við, at váttanir verða móttiknar frá øllum stovnunum, og um neyðugt verður rykt eftir hesum.

Fyri hvønn mánað fyriliggur eitt yvirlit yvir allar stovnar undir ráðnum, har samlaða játtanin og játtanin býtt á mánaðir sæst umframt staðfest tøl fyri mánaðin. Við støði í hesum upplýsingum verður frávikið í krónum og prosentum roknað. Hvør einstøk konta verður gjøgnumhugd, og neyðugar viðmerkingar verða gjørdar, t.d. um umbøn um eykajáttanarlóg er umbiðin. Viðmerkingarnar verða gjørdar til ymsu stovnarnar, lutvíst við støði í innkomnum váttanum frá stjórunum og lutvíst við støði í kunnleikanum, sum ráðið hevur um ymsu stovnarnar.

Í seinasta lagi 1 mánað og 6 dagar aftaná mánaðarlok skal aðalstjórin vegna landsstýrismannin yvir fyri Fíggjarmálaráðnum vátta rættleikan av roknskapartølunum fyri undanfarna roknskaparskeið fyri greinaroknskapin. Tað, sum aðalstjórin vegna landsstýrismannin váttar[17], kann samanfatast til:

- at allir játtanarroknskapirnir, ið liggja undir greinaroknskapinum, eru góðkendir sambært galdandi reglum,
- at bókhaldið er fullfíggjað og í lagi og at roknskapurin sýnir nýtsluna fyri tíðarskeiðið,
- at nýtslan er hóskandi fyri virksemið í farna tíðarskeiði og
- at neyðug tiltøk eru sett í verk, um fyritreytirnar fyri játtanini eru broyttar, soleiðis at tær ikki koma at halda.

Hvønn mánað ger umsitingin eitt samanfatandi notat til landsstýrismannin um gongdina á ymsu høvuðskontunum, sum ráðið varðar av.

[16] Eitt fullfíggjað skjal yvir hvørja váttan stovnsleiðararnir geva er at síggja sum skjal nr. 2

[17] Eitt fullfíggja skjal yvir hvørja váttan aðalstjórin skal geva er at síggja sum skjal nr. 3

### 6.2.2 Mannagongdin í Nærverkinum

Hvønn mánað móttekur Nærverkið eina váttan frá økis- og stovnsleiðarunum, har teir yvir fyri Nærverkinum vátta rættleikan av roknskapartølunum fyri undanfarna mánað. Tað, sum økis- og stovnsleiðararnir vátta, kann samanfatast til:

- at ásettu mannagongdirnar í roknskaparreglugerðini eru hildnar, íroknað at bókhaldið er fullfíggjað og í lagi og at roknskapurin sýnir nýtsluna fyri tíðarskeiðið,
- at nýtslan er hóskandi fyri virksemið í farna tíðarskeiði og
- at neyðug tiltøk eru sett í verk, um fyritreytirnar fyri játtanini eru broyttar, soleiðis at tær ikki koma at halda.

Hvønn mánað verður kannað, hvørjir stovnar senda ásettu fráboðanina inn til Nærverkið, Meginskrivstovuna. Fyriliggur kravda váttanin ikki, verður rykt eftir hesi og ikki innkomnar váttanir verða fráboðaðar Almannamálaráðnum.

Hvønn mánað verða roknskapirnir hjá teimum ymsu stovnunum gjøgnumgingnir av Nærverkinum, framrokningar verða gjørdar og mett verður um hvørt játtanin kann væntast at halda. Verður mett, at játtanin ikki kemur at halda, verða leiðararnir kallaðir inn til samráð og tosað verður um, hvat kann/skal gerast.

Í ávísum førum hevur tað fingið avleiðingar, at leiðararnir ikki hava klárað at hildið seg innanfyri játtanina.

Sum víst á omanfyri verður mett, at skipanin við sjálvsognarstovnum, har stýrið hevur setanarmyndugleikan av leiðaranum, er trupul, tí Nærverkið ikki hevur nakra heimild at sekta meirnýtslu ella tað, at leiðararnir ikki innsenda kravdu roknskaparupplýsingarnar mánaðarliga. Í frágreiðingini frá landsgrannskoðaranum fyri 2008 vísir landsstýrismaðurin á, at meirnýtslan á Røktarheimskontuni skyldast manglar í leypandi rapporteringunum frá sjálvsognarstovnum við teirri avleiðing, at framrokningarnar ikki hava hildið. Biðið varð um eykajáttan upp á 2 mió.kr., men grundað á feilir í rapporteringini var framrokningin ikki í lagi, og tískil varð ein meirnýtsla staðfest.

Ein annar trupulleiki við sjálvsognarstovnunum er, at roknskaparliga skrásetingin ikki verður gjørd í Búskaparskipan Landsins, men í sjálvstøðugum bókhaldum. Samlirapporteringar skulu so mánaðarliga skrásetast í Búskaparskipan Landsins.

Frá 1. januar 2010 at rokna hevur Almannamálaráðið sett fram krav um, at allir sjálvsognarstovnar skulu bóka beinleiðis í Búskaparskipan Landsins. Fyrimunurin við eini beinleiðis skráseting fram um samlibókingar er m.a. at umsitingin leypandi kann fylgja við gongdini og meta um tíðargreiningin v.m. er í lagi. Grundarlagið undir framskrivingunum skuldi sostatt blivið betur.

### 6.2.3 Mannagongdin á Almannastovuni

Roknskaparuppfylgingin á Almannastovuni er skipað soleiðis, at stjórin váttar mánaðarliga roknskapin eftir at fíggjardeildin hevur útfylt váttanarskjølini fyri tær ymsu undirkonturnar.

Leiðararnir av ymsu deildunum hava higartil ikki formliga váttað rættleikan av tølunum fyri teirra deild fyri einkultu tíðarskeiðini, men hava saman við stjóranum gjøgnumgingið hesi og tosað um orsøkirnar til møgulig frávik í mun til játtan.

Í løtuni verður arbeitt við eini mannagongd, har leiðararnir í framtíðini formliga skulu góðkenna ein útvaldan part av roknskapartølunum hvønn mánað. Sæð í mun til støddina av teimum játtanum, sum Almannastovan umsitur, verður mett, at arbeiðið við at draga deildarleiðararnar meira inn í eina formliga góðkenningarmannagongd av teimum ymsu deildarroknskapunum eigur at verða uppraðfest.

So leingi ongin mannagongd er fyriskipað, har deildarleiðararnir meiri formliga eru inni í góðkenningini av deildarroknskapunum, kann verða trupult eftirfylgjandi at staðfesta ábyrgd.

Ætlanin er framhaldandi at hava vanliga raksturin av Almannastovuni miðsavnaðan hjá ovastu leiðsluni við teirri grundgeving, at hetta gevur betur møguleika fyri at stýra virkseminum á stovninum.

Frá 1. januar 2009 at rokna verða kravdu roknskaparváttanirnar sendar Almannaráðnum hvønn mánað.

### 6.2.4 Tíðargreining

#### *6.2.4.1 Frítíðarløn og uppspard yvirtíð*

Generelt er tað soleiðis, at løn fyri yvirtíð og løn í sambandi við frítíð verður útreiðsluførd, tá ið hon verður útgoldin, og ikki tá ið rætturin til lønina er vunnin.

Sambært Nærverkinum og Almannastovuni verður ikki mett, at tíðargreining av skyldugari yvirtíð er ein trupulleiki, tí talið av upparbeiddum tímum verður hildið á einum lágum støði.

Manglandi tíðargreining av útreiðsluni til ikki avhildna frítíð hevur serliga týdning í teimum førum, at umskipanir verða framdar við teirri avleiðing, at fólk verða søgd úr starvi. Er skyldan ikki útreiðsluførd so hvørt kann talan gerast um munandi eingangsupphæddir, sum hædd ikki upprunaliga er tikin fyri.

#### *6.2.4.2 Skráseting av skyldugum útreiðslum*

Í sambandi við mánaðarligu roknskapirnar er tað umráðandi, at tíðargreiningin er í lagi, soleiðis at framskrivingarnar kunnu verða gjørdar á einum nøktandi grundarlagi. Sum dømi kann nevnast, at rokningarnar fyri vard størv og stovnsuppihald uttanlands ofta verða sendar Almannastovuni fyri fleiri mánaðir í senn. Verður hædd ikki tikið fyri hesum leypandi, verða roknskapirnir fyri einkultu tíðarskeiðini misvísandi, og kann hetta fáa beinleiðis ávirkan á framskrivingarnar.

Tískil mugu leypandi skrásetingarnar taka hædd fyri kendum skyldum, hóast rokningarnar ikki fyriliggja enn.

Sum er letur tað seg ikki gera at skráseta størri keyp í Búskaparskipan Landsins (rekvisitiónir). Ein betran í skrásetingini á hesum øki vildi betra um neyvleikan í framrokningunum, serliga í teimum førum at talan er um størri innkeyp.

## 6.3 Vaktplanskipan

Nógvir stovnar undir almannaráðnum nýta eina teldutøka skipan (vaktplanskipan), tá ið arbeiðið á stovninum verður lagt til rættis. Skipanin er eitt gott amboð til at leggja arbeiðstíðirnar hjá hvørjum einstøkum starvsfólki til rættis, soleiðis at tey í best møguligan mun nøkta tørvin hjá stovninum.

Upplýst er, at teldutøka vaktplanskipanin uttan trupulleikar kundi verið nýtt til meira enn bara at leggja til rættis arbeiðsvaktir. Við at lagt inn lønartalvur og lønarupplýsingar um tey ymsu starvsfólkini, hevði verið møguligt at sæð, hvat tær ætlaðu vaktirnar kosta í lønum bæði fyri eitt tíðarskeið og fyri árið sum heild. Sjálvandi kunnu óvæntaðar lønarútreiðslur koma fyri, so sum langtíðarsjúka.

Eisini hevði verið møguligt at sæð, hvat møguligar broytingar í ætlaðu vaktunum hjá starvsfólkunum høvdu merkt fyri lønarútreiðslurnar hjá stovninum.

Umframt at verið ein týðandi partur av fíggjarligu stýringini av einstøku stovnunum kundi vaktplanskipanin eisini verið nýtt í stýringini av samlaðu játtanini á økinum. Um allir stovnar nýttu henda partin av vaktplanskipanini hevði t.d. verið møguligt at simulerað, hvat ein lønarhækking kostar hjá hvørjum einstøkum stovni og á økinum sum heild.

Mett verður, at hesin parturin av vaktplanskipanini kundi verið við til at betra játtanartilgongdina og fíggjarstýringina á ymsu stovnunum og á ymsu økjunum sum heild.

## 6.4 Mál og avriksstýring

Roknskaparkunngerðin, sum kom í gildi í 2007 eins og tann, sum var galdandi frammanundan hava ásetingar um, at:

- fyri at lýsa virksemið á stovninum, skulu í hóskandi mun skrásetast nøgdarupplýsingar, sum fevna um tað, stovnurin avrikar, og um tilfeingisnýtslu (t.d. tíðarnýtslu hjá starvsfólkum) o.a.
- roknskaparskrásetingin skal kunna geva grundarlag fyri at lýsa, hvat tað einstaka virksemið og ymsu veitingarnar kosta ella væntandi koma at kosta, og eisini hvørji viðurskifti eru avgerandi fyri nýtsluna av tilfeingi til framleiðslu. Eisini skal innanhýsis roknskapurin kunna geva grundarlag fyri at lýsa produktivitetin, t.e. lutfallið millum framleiðslutáttir og framleiðslunøgd.

Eitt av endamálunum við kravdu skrásetingunum er at kunna gera upp eindarprísin av ymsu veitingunum. Eisini skal innanhýsis roknskapurin kunna geva grundarlag fyri at lýsa produktivitetin, t.e. lutfallið millum framleiðslutáttir og framleiðslunøgd.

Tað kann staðfestast, at krøvini í nevndu kunngerðum ikki eru lokin, m.a. kann nevnast, at tað á nógvum økjum ikki fyriliggja skrásetingar um nøgdarupplýsingar ella tíðarnýtslu, og tískil er í fleiri førum ikki møguligt at siga, hvat ymsu veitingarnar kosta.

Ásannandi, at tað sum higartil hevur verið gjørt ikki er gott nokk, hevur landsstýrið í nøkur ár arbeitt við at innføra mál- og avriksstýring eftir nøkulunda somu meginreglum sum í hinum norðurlondum.

Ætlanin gongur í stuttum út upp á, at stovnarnir saman við ráðunum skulu áseta hvørji mál og úrslit skulu náast komandi tíðina fyri tey ábyrgdarøki, sum stovnurin er settur at loysa.

Ásetingar hesum viðvíkjandi komu inn í roknskaparkunngerðini í 2007, har tað er ásett, at stovnarnir í seinasta lagi 1. januar 2010 skulu:

- seta mál og krøv til avrik í tøka tilfeinginum og í yvirskipaðum málum, sum aðalráðið hevur sett,
- tryggja, at sett mál og krøv til avrik verða rokkin og
- undir hesum tryggja, at útvegaðar verða neyðugar upplýsingar at stýra eftir, so at frávik millum ætlanir og úrslit verða fyribyrgd, gjørd sjónlig og kunnu verða rættað í neyðugan mun.

Harafturat er ásett í játtanarlógini frá mai 2009, at viðmerkingarnar til fíggjarlógaruppskotið skulu hava eina lýsing av teimum úrslitum miðað verður eftir við játtanini og upplýsingar um nádd úrslit.

Eitt av amboðunum, sum verður brúkt í hesum sambandi, er ein sokallaður avrikssáttmáli. Avrikssáttmáli er ein skrivlig avtala millum ráð og stovn um, hvørji tilskilað mál og úrslit skulu røkkast í einum fíggjarári. Ætlanin er, at ráðini skulu eftir eini felags regluskipan hava eftirlit við, hvussu stovnarnir greiða avrikskrøvini.

Fyrstu avrikssáttmálarnir vórðu gjørdir í 2007 fyri 2008. Ein tann fyrsti avrikssáttmálin varð gjørdur millum Fiskimálaráðið og Fiskirannsóknarstovuna (nú Havstovan) fyri 2008. Sambært heimasíðuni hjá Havstovuni riggaði sáttmálin væl og komið varð á mál við flestu setningum. Tó ynsktu báðir partar, at fleiri broytingar vórðu gjørdar í sáttmálanum fyri 2009, og semja er longu nú um at gera broytingar í komandi sáttmála fyri 2010. Í framtíðini er ætlanin í størri mun at leggja dent á, at virðismeta arbeiðið, sum verður framt á Havstovuni, so at tað ber til at síggja, hvat broytingar í krøvum til stovnin kosta.

Av tilfari frá Havstovuni sæst, at arbeiðið at gera ein avrikssáttmála krevur stóra fyrireiking og tillagingar kunnu verða gjørdar yvir fleiri ár.

Upp á fyrispurning er upplýst, at onki arbeiði er sett í gongd hesum viðvíkjandi á Nærverkinum, meðan ein avtala er í umbúna fyri eitt avmarkað økið á Almannastovuni.

## 6.5 Samandráttur

Samanfatandi kann sigast, at stovnarnir hava eina skipaða roknskaparuppfylging, sum í 2009 er blivin meiri formaliserað. Á Nærverkinum er gjørd ein mannagongd, har stovns- og økisleiðarar hvønn mánað formliga skulu góðkenna roknskapin fyri økið yvir fyri Nærverkinum. Á Almannastovuni verður í løtuni arbeitt við eini mannagongd, har leiðararnir í framtíðini formliga skulu góðkenna ein útvaldan part av roknskapartølunum hvønn mánað. Mælt verður til, at hetta arbeiðið verður uppraðfest.

Harumframt eru hesir veikleikar staðfestir:

- at bygnaðurin við sjálvsognarstovnum, har samsvar ikki er ímillum hvør skal gjalda og valda, ger roknskaparuppfylgingina hjá Nærverkinum av ávísum kontum trupla,
- at orsøkin til staðfestu meirnýtsluna á røktarheimsøkinum í 2008 skyldast, at fíggjarstýringin ikki var nøktandi,
- at so leingi ongin tyngdarmetingarskipan er á eldra- og serstovnaøkinum er í nógvum førum trupult at meta um orsøkina til meirnýtslu, herundir um orsøkin til meirnýtsluna skyldast fíggjarstýringina,
- at verandi vaktplanskipan verður útbygd til eisini at kunna nýtast til fíggjarligar útrokningar, t.d. avleiðingar av broyting í virksemi og broyting í sáttmálalønum,
- at í ávísum førum eru tað onnur enn Almannastovan, sum ávísa tænastur av kontum, sum Almannastovan varðar av,
- at rekvisitiónir í sambandi við størri keyp ikki kunnu skrásetast í Búskaparskipan Landsins við teirri avleiðing, at framskrivingarnar kunnu gerast truplar og
- at skipað, teldutøk hagtøl mangla á nógvum økjum við teirri avleiðing, at eindarprísurin av ymsu veitingunum ikki kann gerast upp.

Mælt verður til, at bøtt verður um teir veikleikar, sum eru nevndir omanfyri.

Harumframt verður mett, at tað hevði verið ein fyrimunur við eini meira sentralt stýrdari visitatión, tí hetta hevði kunnað betrað um bæði fakligu og fíggjarligu stýringina á tænastuøkjunum hjá Nærverkinum.

# 7 Lógarbundin kontra rakstrarjáttan

Av arbeiðssetninginum sæst, at metast skal um hvørt tær lógarbundnu játtanirnar, sum eru fevndar av kanningini, hava tørv á at verða lógarbundnar ella ikki.

Spurningurin verður ikki viðgjørdur út frá einum løgfrøðiligum sjónarmiði, men heldur við støði í einum skilnaði ímillum peningaligar veitingar og tænastu- og stuðulsveitingar, og í hvønn mun hesi játtanarsløg generelt eru lógarbundin ella ikki.

*Lógargrundarlag*

Í grein 23 í løgtingslóg um landsins játtanarskipan frá 4. mai 2009 er ásett, at:

*"Lógarbundin játtan verður nýtt til lógarbundnan stuðul, har móttakaraskari og stuðulsupphædd ella útrokningargrundarlag er ásett við lóg".*

Ein játtan er sostatt lógarbundin, tá ið skyldan at bera útreiðsluna ikki er stýrd av fíggjarlógini, men í aðrari lóg. Lógarbundnar játtanir verða sostatt fyrst og fremst nýttar, tá ið stuðulsmóttakarin í lóg hevur rætt til eina ávísa stuðulsupphædd og har støddin á stuðlinum ella útrokningargrundarlagið er lógarássett.

Í somu lóg verður í grein 15 um rakstrarjáttan ásett, at:

*"Rakstrarjáttan verður brúkt, tá ið endamálið við játtanini fyrst og fremst verður rokkið við virksemi, sum fevnir um at seta starvsfólk og at halda útreiðslurnar í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur og tænastur, útvega tilfar og rakstur av bygningum landsins"*

Lógarverkið ásetur soleiðis ein skilna millum lógarbundnar játtanir og rakstrarjáttanir.

Sambært játtanarlógini hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fingið heimild at seta í gildi neyvari reglur um m.a.

- rakstrarjáttanir, hvørjar inntøkur og útreiðslur, ið kunnu verða tiknar við og
- lógarbundnar játtanir.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur enn ikki gjørt nýtslu av nevndu heimild, og tí finnast sum er ongar nágreinandi reglur um ávikavist lógarbundnar játtanir og rakstrarjáttanir.

Mælt verður til, at nágreinandi reglur verða settar í gildi hesum viðvíkjandi.

Sum nevnt omanfyri er løgfrøðiliga síðan av spurninginum ikki nærri viðgjørd í hesum høpi. M.a. kann nevnast, at ongin meting er gjørd av, um verandi bólking av útreiðslujáttanum í ávikavist lógarbundnar- og rakstrarjáttanir er í samsvar við galdandi løggávu.

*Peningaligar veitingar og tænastu- og stuðulsveitingar*

Tær lógarbundnu útreiðslurnar, sum eru fevndar av játtanargreiningini, innihalda lutvíst peningaligar veitingar og lutvíst tænastu- og stuðulsveitingar.

Peningaligu veitingarnar eru:

- fyritíðarpensjón
- ansingarsamsýning
- endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært grein 17, stk. 3 í forsorgarlógini

Hinar lógarbundnu játtanirnar innihalda ikki beinleiðis peningaveitingar, men tænastu- og stuðulsveitingar. Hesar eru:

- endurútbúgving sambært § 18,
- hjálparamboð sambært § 18, og
- hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum sambært § 16.

Verður sammett við aðrar peningaligar veitingar, sum borgarar hava rætt til sambært ymiskum lógum sæst, at hesar generelt eru lógarbundnar, t.d. fólkapensjón, dagpeningur, stuðul til uppihaldspening, barsilsskipan og inntøkutrygd fiskimanna. Í tann mun tað verður umhugsað at broyta játtanina til peningaligu veitingarnar frá lógarbundnari játtan til rakstrarjáttan, eigur hetta at vera gjølla umhugsað, tí hetta er týðandi broyting í mun til verandi siðvenju, har peningaligar veitingar eru lógarbundnar.

Hinvegin er sum høvuðsregla galdandi, at tænastu- og stuðulsveitingar eru rakstrarjáttanir. Tí kann spurningur setast við, um hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum sambært § 16 skal vera lógarbundin, meðan rætturin til at koma á eitt heim undir serforsorgini ella eldrarøktini ikki er tað. Í báðum førum er talan um eina tænastuveiting frá tí almenna til borgara við serligum tørvi. Tað skal tó viðmerkjast, at í Føroyum eru ongi tilboð um stovnsuppihald, sum tey, sum eru nevnd í grein 16, og tískil kann ein broyting av lógartekstinum til eina rakstrarjáttan verða viðvirkandi til, at tey, sum í dag fáa veiting sambært hesi grein, onga veiting fáa.

Játtanin til vart starv er eitt sindur øðrvísi háttað enn hinar játtanirnar, tí talan er um eina peningaliga játtan, har upphæddin verður útgoldin til annan enn tann, sum hevur rætt til stuðulin sambært lógini. Um játtanin ikki er lógarbundin, kann vera ivasamt um arbeiðsgevarar eru áhugaðir í skipanini um vissa ikki er fyri endurgjaldi fyri avtalaða partin av lønini.

*Politiskur spurningur*

Spurningurin um hvørjar játtanir hava tørv á at vera lógarbundnar og hvørjar skulu vera rakstrarjáttanir er í stóran mun ein politiskur spurningur, sum má svarast við støði í hvussu samfelagið skal skipast. Ein týdningarmikil spurningur í hesum sambandi er um rættindini hjá borgaranum til ávísar tænastur skulu verða lógartryggjað ella um borgarin bara skal hava rætt til tænastuna í tann mun peningur er til tess.

## SKJAL 1:

### Játtanargreining á almannaøkinum

### Arbeiðssetningur

Føroya Landsstýri hevur gjørt av at seta í verk eina játtanargreining á almannaøkinum.

Greiningin skal fevna um høvuðskonturnar/økini:

12.21.3.08. Børn og ung (rakstrarjáttan)
12.21.6.01. Serforsorg (rakstrarjáttan)
12.21.6.04. Eldrarøkt (rakstrarjáttan)
12.21.6.10. Ansingarsamsýning (lógarbundin játtan)
12.21.6.11. Stuðulstænastan (rakstrarjáttan)
12.21.7.01. Vanlig forsorg (lógarbundin játtan)
Kanningin verður avmarkað til undirkonturnar 04, 05, 06, 08
12.21.8.05. Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan)

Fyrisitingarlig greining skal gerast av hesum høvuðskontum/stovnum:

12.21.1.04. Almannastovan (rakstrarjáttan)

12.21.6.08. Nærverkið, Meginskrivstovan (rakstrarjáttan)

**Greiningin** skal neyvt lýsa:

1) hvussu játtanirnar hava verið nýttar (hagtøl) og orsøkina til stóra útreiðsluvøksturin seinastu árini

2) orsøkina til, at útreiðslurnar á teimum lógarbundnu játtanunum vaksa so nógv skjótari enn útreiðsluvøksturin í samfelagnum annars, og eisini í hvønn mun játtanirnar hava tørv á at vera lógarbundnar.

3) hvussu játtanartilgongdin og fíggjarstýringin hevur verið

### Benchmarking

Úrslitini skulu samanberast við grannalondini Danmark, Ísland og økið Bornholm, bæði í mun til útreiðslustøði og tjóðarbúskap. Innanhýsis samanbering skal eisini gerast av stovnum innan sama økið (best practice).

### Tilmæli

Fyri hvørja høvuðskontu/hvørt økið sær skal gerast tilmæli um ítøkilig átøk, ið skulu tryggja, at sum mest fæst fyri hvørja skattakrónu, og um hvussu fíggjarstýringin og játtanartilgongdin kunnu styrkjast.

Játtanargreiningin skal vera liðug hálvan september 2009.

Játtanargreiningin verður fyriskipað av einum stýrisbólki, og verður gjørd av óvildugum ráðgevum.

Í stýrisbólkinum sita aðalstjórarnir í Fíggjarmálaráðnum, Almannamálaráðnum og løgmansskrivstovuni. Aðalstjórin í Fíggjarmálaráðnum er formaður. Skrivari er Atli Leo, ráðgevi í Fíggjarmálaráðnum.

## Skjal 2:

**GÓÐKENNINGARSKJAL FYRI GREINAROKNSKAPIN (EK 75.1)**

Játtanarroknskapurin skal verða góðkendur í seinasta lagi 5. í øðrum mánaðinum eftir mánaðarlok.

At játtanarroknskapurin er góðkendur merkir, at stovnsleiðarin, sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini

og pkt. 2.1 í roknskaparrundskrivinum, váttar:

1 at hava dagfest og áteknað FSL-játtanarroknskapin (útskrift nr. Fgj 04-01-02),
2 at játtanin og møguligar eykajáttanir eru rætt skrásettar í FSL-játtanarroknskapinum,
3 at allar inntøkur og útreiðslur eru bókaðar,
4 at allar bókingar eru konteraðar rætt á standardroknskaparkontur sambært Kontuskipan landsins,
5 at allar inntøkur og útreiðslur eru bókaðar á rætt fíggjarár sambært § 13 í roknskaparkunngerðini,
6 at bókaðu lønarútreiðslurnar eru rættar og samsvara við lønarútgjaldingar í lønarskipanum,
7 at allar saldur á fíggjarstøðuni eru rætt tiknar við, her eisini, at allar peningastovnskontur, sum stovnurin hevur ræði á, eru skrásettar á fíggjarstøðuni og stemma við kontuavrit frá peningastovnunum,
8 at ogn, skuld og nýtsla eru gjørd rætt upp,
9 at nýtslan er hóskandi í mun til virksemið farna tíðarskeiðið,
10 at neyðug tiltøk eru sett í verk, eru fyritreytirnar fyri játtanunum og lønarkarmi broyttar, so tær t.d. ikki fara at halda,
11 at samsvar er millum Búskaparskipan landsins og egnar búskaparskipanir,
12 at alt er stemmað av, so sum ásett er í roknskaparreglugerðini hjá stovninum,
13 at ásettu mannagongdirnar í roknskaparreglugerðini eru hildnar, at roknskaparreglugerðin, yvirlit yvir ábyrgdarøki og undirskriftarblað eru dagført, og at eingin brúkari er skrásettur við rættindum í Búskaparskipan landsins, sum ikki skal hava heimild til tess,
14 at allar ásetingar frá aðalstýrinum um játtanar- og roknskaparviðurskifti eru hildnar,
15 at allar almennar ognir, sum ásett í roknskaparreglugerðini, eru skrásettar í roknskapi landsins (sí eisini roknskaparvegleiðing 2004-8.0-A).

Harafturat skal verða kannað, at allar áognir, frammanundan goldnar og skyldugar upphæddir, veittar trygdir o.a. eru skrásettar í roknskapinum, so hann gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og somuleiðis av ogn og skuld við fíggjarárslok.

Niðanfyri, undir teiginum viðmerkingar og á møguligum fylgiskjølum, sum víst verður til, skal verða kunnað um viðurskifti, sum ikki eru í lagi. Viðmerkingarnar skulu verða stuttar, greiðar og viðkomandi.

Fíggjarstýring: t.d. fær hvørt heim eina ávísa játtan pr. dag pr. búfólk uttan at atlit verður tikið til hvussu tungur hvør íbúgvi er - vánalig fíggjarlig stýring

## Skjal 3:

GÓÐKENNINGARSKJAL FYRI JÁTTANARROKNSKAPIN (EK 76.1)

(EK 76.1) Føroya Gjaldstova 03-02-06

Undirritaði stovnsleiðari góðkenni við hesum játtanarroknskapin mótvegis aðalstýrinum fyri:

Stovnsnummar: Stovnsheiti: Tíðarskeið:

Dagfesting: Undirskrift stovnsleiðarans:

Játtanarroknskapurin skal verða góðkendur í seinasta lagi 5. í øðrum mánaðinum eftir mánaðarlok.

At játtanarroknskapurin er góðkendur merkir, at stovnsleiðarin, sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini og pkt. 2.1 í roknskaparrundskrivinum, váttar:

1 at hava dagfest og áteknað FSL-játtanarroknskapin (útskrift nr. Fgj 04-01-02),

2 at játtanin og møguligar eykajáttanir eru rætt skrásettar í FSL-játtanarroknskapinum,

3 at allar inntøkur og útreiðslur eru bókaðar,

4 at allar bókingar eru konteraðar rætt á standardroknskaparkontur sambært Kontuskipan landsins,

5 at allar inntøkur og útreiðslur eru bókaðar á rætt fíggjarár sambært § 13 í roknskaparkunngerðini,

6 at bókaðu lønarútreiðslurnar eru rættar og samsvara við lønarútgjaldingar í lønarskipanum,

7 at allar saldur á fíggjarstøðuni eru rætt tiknar við, her eisini, at allar peningastovnskontur, sum stovnurin hevur ræði á, eru skrásettar á fíggjarstøðuni og stemma við kontuavrit frá peningastovnunum,

8 at ogn, skuld og nýtsla eru gjørd rætt upp,

9 at nýtslan er hóskandi í mun til virksemið farna tíðarskeiði,

10 at neyðug tiltøk eru sett í verk, eru fyritreytirnar fyri játtanunum og lønarkarmi broyttar, so tær t.d. ikki fara at halda,

11 at samsvar er millum Búskaparskipan landsins og egnar búskaparskipanir,

12 at alt er stemmað av, so sum ásett er í roknskaparreglugerðini hjá stovninum,

13 at ásettu mannagongdirnar í roknskaparreglugerðini eru hildnar, at roknskaparreglugerðin, yvirlit yvir ábyrgdarøki og undirskriftarblað eru dagført, og at eingin brúkari er skrásettur við rættindum í Búskaparskipan landsins, sum ikki skal hava heimild til tess,

14 at allar ásetingar frá aðalstýrinum um játtanar- og roknskaparviðurskifti eru hildnar,

15 at allar almennar ognir, sum ásett í roknskaparreglugerðini, eru skrásettar í roknskapi landsins (sí eisini roknskaparvegleiðing 2004-8.0-A).

Harafturat skal verða kannað, at allar áognir, frammanundan goldnar og skyldugar upphæddir, veittar trygdir o.a. eru skrásettar í roknskapinum, so hann gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og somuleiðis av ogn og skuld við fíggjarárslok.

Niðanfyri, undir teiginum viðmerkingar og á møguligum fylgiskjølum, sum víst verður til, skal verða kunnað um viðurskifti, sum ikki eru í lagi. Viðmerkingarnar skulu verða stuttar, greiðar og viðkomandi.

Viðmerkingar:

## Skjal 4:

Samanbering av COFOG-tølunum millum Føroyar og Danmark í 2007

| kr. pr. íbúgva | Føroyar | Danmark |
|---|---:|---:|
| Útinnandi vald og lóggávuvald, fíggjar-og uttanríkismál | 8.980 | 4.724 |
| Fíggjarlig uttanlandshjálp | 83 | 3.101 |
| Almennar tænastur | 435 | 798 |
| Almennar samfelagstænastur, gransking og menning | - | 1.969 |
| Aðrar almennar samfelagstænastur | 2.856 | 10.769 |
| ***Aðalfyrisitingin til samans*** | **12.353** | **21.362** |
| Militært forsvar m.v. | - | 5.007 |
| Civilforsvar | - | 141 |
| ***Verja til samans*** | - | **5.148** |
| Løgreglutænastur | 1.324 | 1.685 |
| Sløkkiliðstænastur | 455 | 281 |
| Ræ ttur | 290 | 634 |
| Fongsul | 166 | 498 |
| Almenn lógar- og trygdarviðurskifti i.a.n. | 745 | 55 |
| ***Rættarmál til samans*** | **2.980** | **3.153** |
| Vanlig búskapar-, handils- og arbeiðsviðurskifti | 993 | 2.527 |
| Landbúnaður, skógrøkt, fiskiskapur og veiða | 3.021 | 335 |
| Brennievni og orka | 331 | 26 |
| Námsvirki, ídnaður og bygging | 8.877 | 40 |
| Flutningur | 4.511 | 5.315 |
| Gransking og menning í búskaparviðurskiftum | 952 | 456 |
| Búskaparviðurskifti i.a.n. | 1.759 | 233 |
| ***Vinnumál til samans*** | **20.444** | **8.932** |
| Fyriskipan av ruskburturbeining | 1.842 | 389 |
| Fyriskipan av kloakkviðurskiftum | 228 | 415 |
| Dálkingarvernd | 228 | 826 |
| ***Umhvørvisvernd til samans*** | **2.297** | **1.631** |
| Byggibúning | 973 | 1.611 |
| Økismenning | 1.614 | 111 |
| ***Íbúð og umhvørvi*** | **2.587** | **1.722** |

**Skjal 4:** *(framhald)*

| kr. pr. íbúgva | Føroyar | Danmark |
|---|---|---|
| Heilivágur, tól og útgerð | 1.200 | 1.613 |
| Heilsutænastur uttan sjúkrahús | 2.152 | 3.646 |
| Sjúkrahústænastur | 13.781 | 16.846 |
| Gransking og menning í heilsu | 145 | 32 |
| Heilsa i.a.n. | 1.428 | 831 |
| *Heilsumál til samans* | **18.706** | **22.968** |
| Frítiðar- og ítróttartænastur | 1.655 | 1.492 |
| Mentanartænastur | 1.014 | 1.878 |
| Tænastur viðvíkjandi átrúnaði og feløgum | 641 | 1.304 |
| Frítíð, mentan og átrúnaður i.a.n. | 476 | 180 |
| *Mentamál til samans* | **3.787** | **4.855** |
| Forskúli og fólkaskúli | 9.953 | 10.524 |
| Miðnámsskúli | 3.600 | 4.313 |
| Hægri útbúgving | 1.242 | 3.525 |
| Útbúgving ikki flokkað eftir stigi | 6.249 | 1.525 |
| Útbúgving i.a.n. | 1.986 | 670 |
| *Undirvísingarmál til samans* | **23.031** | **20.556** |
| Sjúka og avlamni | 10.739 | 16.394 |
| Ellistænastur og -veitingar | 19.140 | 21.258 |
| Familja og børn | 10.160 | 15.346 |
| Arbeiðsloysi | 1.469 | 8.035 |
| Býlisstuðul | 2.607 | 2.050 |
| Forsorgarhjálp i.a.n. | 21 | 3.377 |
| Almannamál annars | 3.373 | 1.776 |
| *Almannamál til samans* | **47.510** | **68.236** |
| Ikki flokkað, rentuútreiðslur | 2.752 | - |
| Útreiðslur til samans | **136.445** | **158.561** |

## Skjal 5:

Samanbering av COFOG-tølunum millum Føroyar og Danmark fyri tíðarskeiðið 2003 til 2007 (kr. pr. íbúgva)

| Aðalfyrisiting | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 9.293 | 9.008 | 10.179 | 10.961 | 12.353 |
| Danmark | 20.965 | 20.809 | 20.541 | 20.805 | 21.362 |
| Munur | -11.672 | -11.800 | -10.362 | -9.844 | -9.008 |
| **Rættarmál** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
| Føroyar | 2.329 | 2.512 | 2.483 | 2.927 | 2.980 |
| Danmark | 2.637 | 2.780 | 2.915 | 3.006 | 3.153 |
| Munur | -309 | -269 | -432 | -79 | -173 |
| **Vinnumál** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
| Føroyar | 19.237 | 21.628 | 20.109 | 21.092 | 20.444 |
| Danmark | 8.051 | 8.377 | 8.720 | 8.956 | 8.932 |
| Munur | 11.186 | 13.251 | 11.389 | 12.136 | 11.512 |
| **Umhvørvisvernd** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
| Føroyar | 2.245 | 2.574 | 2.689 | 2.720 | 2.318 |
| Danmark | 1.500 | 1.385 | 1.590 | 1.637 | 1.631 |
| Munur | 744 | 1.189 | 1.099 | 1.083 | 687 |
| **Íbúð og umhvørvi** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
| Føroyar | 1.720 | 1.764 | 1.386 | 2.138 | 2.587 |
| Danmark | 1.720 | 1.635 | 1.577 | 1.364 | 1.722 |
| Munur | 1 | 129 | -191 | 775 | 864 |
| **Heilsumál** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
| Føroyar | 15.440 | 16.024 | 16.819 | 17.417 | 18.706 |
| Danmark | 18.145 | 19.140 | 20.275 | 21.651 | 22.968 |
| Munur | -2.704 | -3.116 | -3.455 | -4.233 | -4.262 |
| **Mentamál** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
| Føroyar | 2.538 | 3.280 | 3.455 | 3.155 | 3.787 |
| Danmark | 4.210 | 4.856 | 4.604 | 4.763 | 4.855 |
| Munur | -1.672 | -1.577 | -1.149 | -1.607 | -1.068 |

**Skjal 5:** *(framhald)*

| Undirvísingarmál | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 16.867 | 17.684 | 17.688 | 19.514 | 23.031 |
| Danmark | 19.795 | 20.532 | 20.683 | 20.973 | 20.555 |
| **Munur** | **-2.928** | **-2.848** | **-2.994** | **-1.459** | **2.475** |
| **Almannamál** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
| Føroyar | 40.216 | 42.986 | 44.769 | 45.464 | 47.530 |
| Danmark | 62.679 | 64.996 | 66.198 | 67.420 | 68.236 |
| **Munur** | **-22.463** | **-22.009** | **-21.429** | **-21.956** | **-20.706** |